norden

Norður-landamál við rótum og fótum

Ritstjórnað hevur Iben Stampe Sletten

Nord 2004:12

Norðurlandamál við rótum og fótum

Nord 2004:12
© Norðurlendska ráðharraráðið, København 2004
ISBN 92-893-1039-1
Forlagsritstjórn: Iben Stampe Sletten
Grafisk verkleiðsla: Kjell Olsson
Sniðgáva: Carl-H.K. Zakrisson, www.polytype.dk
Myndir: Ivar Gjørup, www.egoland.dk
Kort: John Fowlie/studio16a
Prent: Akaprint A/S, Århus 2005
Upplag: 1000
Prentað á umhvørvisgott pappír ið lýkur krøvini
í norðurlendsku umhvørvisásetingini.
Printed in Denmark

541 312
Printed matter

Norðurlendska ráðharraráðið
Store Strandstræde 18
DK-1255 København K
Telefon (+45) 3396 0200
Telefax (+45) 3396 0202

Norðurlandaráðið
Store Strandstræde 18
DK-1255 København K
Telefon (+45) 3396 0400
Telefax (+45) 3311 1870

www.norden.org

Norðurlendska ráðharraráðið

varð stovnað í 1971 sum samstarvsstovnur millum stjórnirnar í Norðurlondum. Ráðharraráðið leggur fram uppskot til norðurlandaráðsfundir, útinnir tilmæli frá ráðnum, boðar Norðurlandaráðnum frá úrslitum í samstarvinum og leiðir arbeiðið á teimum ymsu evnisøkjunum. Samstarvsráðharrar, ið eru útnevndir av stjórnunum í einstøku londunum, samskipa samstarvið. Ráðharraráðið savnast í ymsum samansetingum, alt eftir hvørjir spurningar verða viðgjørdir.

Norðurlandaráðið

varð stovnað í 1952 sum samstarvsstovnur millum tey fólkavaldu tingini og stjórnirnar í Danmark, Íslandi, Noregi og Svøríki. Finnland gjørdist limur í 1955. Sendinevndir úr Føroyum, Grønlandi og Álandi eru partur av ávikavist donsku og finsku sendinevndunum. Í ráðnum eru 87 limir. Norðurlandaráðið er stigtakari og ráðgevandi og hevur eftirlitsuppgávur í norðurlendska samstarvinum. Stovnar í Norðurlandaráðnum eru alfundurin, formansskapurin og nevndirnar.

Norðurlendska málsamstarvið

Tann málsligi felagsskapurin er ein grundliggjandi fyritreyt fyri tí fólksliga, mentanarliga, búskaparliga og politiska samstarvinum í Norðurlondum. Málpolitiska arbeiðið í Norðurlendska ráðharraráðnum verður samskipað og stýrt av einum stýringarbólki, ið hevur hesar høvuðsuppgávur: 1) at virka sum sakkøn nevnd mótvegis Norðurlendska ráðharraráðnum og Norðurlandaráðnum, tá ið tað snýr seg um norðurlendskar málspurningar og norðurlendskan málpolitikk, 2) at virka sum samstarvsnevnd hjá teimum norðurlendsku málnevndunum og uttanlandslektarunum, 3) at virka sum stýringarbólkur fyri tvørgangandi stuðulsskipanina Nordplus mál og sostatt hava um hendi ta yvirskipaðu ábyrgdina av skipanini. Stýringarbólkurin Málráð Norðurlanda í málsamstarvinum hjá Norðurlendska ráðharraráðnum virkar við støði í hesum málsetningum: at fremja samnorðurlendska málfatan, at styrkja kunnleikan til málini í Norðurlondum, at fremja fólkaræðisligan málpolitikk og málfatan í Norðurlondum, at styrkja støðuna hjá norðurlendskum málum í og uttan fyri Norðurlond. Í Norðurlandaráðnum, samstarvsráðnum hjá teimum norðurlendsku lóggávutingunum, hava mentanar- og útbúgvingarnevndirnar ábyrgd av spurningum viðvíkjandi málsamstarvinum. Netsíður um norðurlendska málsamstarvið eru at finna fyrst og fremst á skandinavisku málunum (donskum, norskum, svenskum).

Innihald

Formæli / Fyri Málráð Norðurlanda 9

Netútgávan »Norðurlandamál við rótum og fótum« / Iben Stampe Sletten 11
Yvirlit yvir, hvussu nettilfarið er skipað 12
Kunning um greinar 13
Norðurlendsk málsøga 13
Nútíðarinnar røtur í fortíðini 13
Fjølbroyttu Norðurlond 14
Hvør maður sítt mál – málføri nú á døgum 15
Enskt mál – hóttan ella tilfeingi? 16
Mál í røring – men hvagar gongur leiðin? 17

Norðurlendsk mál í fortíð og nútíð / Arne Torp 19
Málini í Norðurlondum: Tríggjar ættir – mong mál 23
Tann indoevropeiska málættin 27
Ættarmyndilin og norðurlendsk mál 30
Tann germanska málgreinin 31
Tann germanska ljóðskúgvingin 32
Arvorð, tøkuorð og innflutt orð 33
Meginnorðurlond: Ymisk mál ella bara málføri? 35
Frástøðumál 36
Standardmál 40
Málførahøpi og standardmál í germanska máløkinum 41
Trý ella fimm mál? 43
Hví bókmál og nýnorskt? 44
Nútíðar norðurlendsk mál 44

Ættarmyndilin eina ferð enn 46
Tjúkk-l 49
Hjáljóðaviknan 49
Skarr-r 49
Søgulig flokking av norðurlandamálum eftir aldumyndlinum 52
Frá frumnorrønum til víkingatíð 52
Rúnaristurnar 52
Eysturnorrønt og vesturnorrønt 54
Í hámiðøld: Norðurnorrønt og suðurnorrønt 56
Nýggjari tíð: Útnorðurlendskt og meginnorðurlendskt 59
Hví eru meginnorðurlendskt og útnorðurlendskt fjarstøðumál? 60
Ymisk bending 60
Ymiskur framburður 65
Orðini hava mest at týða fyri fatanina 66
Er ættarmyndilin burturkast? 68
Meginnorðurlendska grannamálsfatanin
– ein høvuðstáttur í norðurlendska samlagnum 70
Grannamálsfatanin í vanda? 73
Bókmentir 74
Internet 74

Finskt / Kaisa Häkkinen 75
Finskt og ættarmál tess 75
Forsøga finna 76
Finsk málføri 76
Skeið í søguni hjá finskum 79
Fornfinskt og miðaldarfinskt 79
Gamalt skriftfinskt 80
Eldri nútíðarfinskt 80
Nútíðarfinskt 81

Nútíðarfinska ljóðkervið 82
Grundleggjandi bendingardrøg 84
Høvuðsdrøg í orðalagslæruni 90
Orðfeingið 91
Finskt nú og í næstum 94
Bókmentir 95
Internet 95

Sámisk mál / Mikael Svonni 97
Sámiskt búøki og sámisk mál 97
Søgulig sambond 98
Tíðarskeiðið frá ár 4000 til 2000 f.Kr. 99
Tíðarskeiðið frá ár 2000 f.Kr. til 1000 e.Kr. 99
Sámatal 100
Bygnaðurin í sámiskum 101
Sagnorðabending 101
Stovnskifti 102
Fallbending 102
Orðaavleiðsla 103
Tíð og háttur 104
Stavskipan og málljóð 105
Skriftmál 106
Støðan hjá málinum í samfelagnum 107
Lóggáva 107
Sámiskt í skúlanum 108
Sámiskt í fjølmiðlunum 109
Bókmentir og tónleikur 109
Samfelagið annars 110
Til kunningar 111
Bókmentir 111
Internet 111

Kalaallisut – grønlendskt / Carl Christian Olsen 113
Viðurskiftini millum talu- og skriftmál 113
Grønlendsk málføri 116
Eyðkenni fyri grønlendska málið 117
Eitt samsetingarmál (agglutinerandi mál) 117
Eitt ergativt mál 117
Bendingarviðurskifti 118
Fallbending 120
Persónendingar 121
Enklitisk ískoyti 122
Høvuðssagnorð og hjálparsagnorð 122
Menningin av kalaallisut sum skriftmáli 123
Standardgrønlendskt 124
Tøkuorð og fremmandaorð 125
Støðan hjá málinum 126
Bókmentir 127
Internet 127

Formæli

Norðurlandamál við rótum og fótum er eitt samnorðurlendskt lærubókarverk. Í árinum 2000 tók málpolitiski tilvísingarbólkurin hjá Norðurlendska ráðharraráðnum stig til eina norðurlendska málsøgu, sum var ætlað studentaskúlanæmingum. Verkætlanin varð sett í verk í samstarvi við NORDSPRÅK, ein samtøka av norðurlendskum móðurmálslærarum og lærarum, sum undirvísa í norðurlendskum sum fremmandamáli. Steen Svava Olsen varð settur sum verkleiðari, men endaliga ritstjórnin varð latin Iben Stampe Sletten.

Málráð Norðurlanda* takkar NORDSPRÅK fyri samstarvið og serliga Iben Stampe Sletten fyri hennara sera stóra og avgerandi lut í síðsta parti av verkætlanini.

Við hesum útgávuverki er ætlanin at vekja ansin hjá teimum ungu fyri týdninginum, ið málið hevur og at økja tilvitið um, at Norðurlond eru ein málsligur og mentanarligur felagsskapur, treytaður av søguligum og politiskum viðurskiftum. Endamálið er at styrkja áhugan, bæði fyri samnorðurlendska sjónarhorninum og fyri tí málsliga partinum av móðurmálsundirvísingini.

---

* Málráð Norðurlanda varð sett í 2004 í staðin fyri málpolitiska tilvísingarbólkin hjá Norðurlendska ráðharraráðnum

Norðurlandamál við rótum og fótum verður givin út sum undirvísingarbók til studentaskúlar í øllum Norðurlondum á íslendskum, føroyskum, svenskum, norskum og donskum – og verður haraftur-at til taks á internetinum um netportrið hjá Norðurlendska ráðharraráðnum: www.nordskol.org. Har liggur eisini rúgvismikið tilfar við stuttum kjaktekstum á donskum, svenskum og norskum um t.d. norðurlendsk mál og mentanir, um støðuna hjá málførum í ymsum londum og um støðuna og framtíðina hjá smáum málum í eini tíð við altjóðagerð. Nettilfarið ber væl til at fáa yvirlit yvir við at lesa kunningina niðanfyri, har tær einstøku greinarnar verða umrøddar. Til ber at økja um tilfarið so hvørt við nýggjum greinum, uppgávum o.tíl.

Málráð Norðurlanda vónar, at lærarar á øllum stigum hava hegni til at gagnnýta bókina og nettilfarið í eini undirvísing, sum kann virka fyri at fremja tann málfelagsskap millum øll Norðurlond, sum fólkini ynskja.

November 2004
Fyri Málráð Norðurlanda

Guðrún Kvaran
formaður

IBEN STAMPE SLETTEN

Netútgávan »Norðurlandamál við rótum og fótum«

Tú kanst fáa atgongd at *Norðurlandamálum við rótum og fótum* um netportrið hjá Norðurlendska ráðharraráðnum: www.nordskol.org. Nettilfarið er fyri ein part tær fýra greinarnar (2. kapittul) og fyri ein part ein rød av málsøguligum og málpolitiskum tekstum, sum eru flokkaðir eftir evni (3.-7. kapittul).

Í 3. kapitli verður úr ymsum hornum lýst, hvussu fortíðin kemur til sjóndar í nútíðar málnýtslu. 4. kapittul er um sambandið millum mál og mentanarligan samleika. 5. kapittul lýsir, hvussu málførini verða nýtt og hvørja støðu tey hava nú, og 6. kapittul umrøðir, hvussu málini í Norðurlondum verða ávirkað av enskum. Í 7. kapitli verður at enda kjakast um framtíðina hjá norðurlendskum málum í eini tíð við altjóðagerð.

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir netútgávuna av *Norðurlandamálum við rótum og fótum* og ein stutt kunning um innihaldið í greinunum.



Allar greinarnar í 2. kapitli eru bæði á íslendskum, føroyskum, norskum, svenskum og donskum, men greinarnar frá 3.-7. kapittul eru antin skrivaðar á norskum, svenskum ella donskum. Sostatt eru góðir møguleikar at lesa yrkistekstir á øllum norðurlendskum málum um:

- *Norðurlandamálin með rótum og fótum*
- *Norðurlandamál við rótum og fótum*
- *Nordens språk med røtter og føtter*
- *Nordens språk med rötter och fötter*
- *Nordens sprog med rødder og fødder*

Yvirlit yvir, hvussu nettilfarið er skipað

	Formæli	eftir Málráð Norðurlanda
1. kapittul	**Framløga**	Iben Stampe Sletten
2. kapittul	**Norðurlendsk málsøga**	
2.a	Norðurlendsk mál í fortíð og nútíð	Arne Torp
2.b	Finskt	Kajsa Häkkinen
2.c	Sámisk mál	Mikael Svonni
2.d	Kalaallisut – grønlendskt	Carl Christian Olsen
3. kapittul	**Nútíðarinnar røtur í fortíðini**	
3.a	Om Etymologi (á donskum)	Zakaris Hansen
3.b	Finskan frysbox för germanska ord (á svenskum)	Birgitta Abrahamsson
3.c	Den danske tunge (á donskum)	Kristján Árnason
4. kapittul	**Fjølbroyttu Norðurlond**	
4.a	Sidemål nå igjen – fy faen! (á norskum)	Gunnar Simonsen
4.b	På svenska i Finland (á svenskum)	Birgitta Abrahamsson
4.c	Minoritetsspråk i Norden (á svenskum)	Marie-Louise Wentzel
4.d	De nordiske specialtegn (á norskum)	Arne Torp
4.e	Vet du noe om navn i Norden? (á norskum)	Gunnar Simonsen
4.f	Den islandske navneskik (á norskum)	Ari Páll Kristinsson
5. kapittul	**Hvør maður sítt mál – málføri nú á døgum**	
5.a	Får du tala ditt eget språk? (á svenskum)	Marie-Louise Wentzel
5.b	Dialektar – ei historie om dei pene, dei korrekte eller dei gale? (á norskum)	Gunnar Simonsen
5.c	Farvel til dialekterne i Danmark (á donskum)	Lisbeth Nyborg
5.d	Findes der dialekter på Færøerne? (á donskum)	Zakaris Hansen
5.e	Island – landet uden dialekter? (á donskum)	Kristján Árnason
6. kapittul	**Enskt mál – hóttan ella tilfeingi?**	
6.a	Om purismen (á donskum)	Kristján Árnason
6.b	Engelsk tur-retur (á donskum)	Lisbeth Nyborg
6.c	Om domænetab (á donskum)	Lisbeth Nyborg
6.d	Have a nice day, hörru! (á svenskum)	Marie-Louise Wentzel
7. kapittul	**Mál i røring – men hvagar gongur leiðin?**	
7.a	Hvor går språket? (á norskum)	Gunnar Simonsen
7.b	Ord på väg (á svenskum)	Marie-Louise Wentzel
7.c	Fra runer til sms (á donskum)	Lisbeth Nyborg
7.d	Globalsprog – nationalsprog – lokalsprog (á donskum)	Lisbeth Nyborg
7.e	Uddør de nordiske sprog? (á donskum)	Lisbeth Nyborg

Kunning um greinar

Norðurlendsk málsøga (2. kapittul)

Í mest týðandi táttinum av útgávuni: »Norðurlendsk mál í fortíð og nútíð« *(2. partur a)* verður farið ígjøgnum menningina frá einum frumnorrønum samupphavi til nútíðar norðurlendsk mál. Sagt verður frá líkskapi og byrjandi muni á orðfeingi, orðagerð og setningabygnaði og um gamla ávirkan, m.a. av latíni og lágtýskum. Eisini verður røtt um, hvat tveir málbroytingarmyndlar, ættarmyndilin og aldumyndilin eru nýtiligir til sum málvísindalig amboð.

Annar kapittul rúmar eisini teimum trimum greinunum: »Finskt« *(2. partur b)*, »Sámisk mál« *(2. partur c)* og »Kalaallisut-grønlendskt« *(2. partur d)*, har lesarin verður kunnaður um bygnaðin og søguna hjá nevndu málum og um málsligu støðuna í teimum londum, har málini verða talað.

Hesin kapittul svarar eitt nú spurningunum: Hava øll fólk í Norðurlondum einaferð skilt hvør annan uttan himpr? Nær og hvussu broyttist frumnorrøna málið til nútíðar málini, íslendskt, føroyskt, svenskt, norskt og danskt? Og hví eru finskt, sámiskt og grønlendskt ikki norðurlendsk mál?

Nútíðarinnar røtur í fortíðini (3. kapittul)

Síðan koma tríggir tættir, sum úr ymsum hornum lýsa, hvussu fortíðin sæst aftur í nútíðar málnýtslu:

3. partur a. Fyrst er ein táttur um upprunafrøði, t.e. vísindini um søguna hjá einstøkum orðum. Upprunafrøði stendur í andsøgn til almennu málsøguna. Orðasøga er mentanarsøga – tað vátta upprunafrøðiligar lýsingar av norðurlendsku orðunum *orð*, *stakkal* og *bein* og av landsnøvnunum. Málsøga er bæði mentanarsøga og fyri ein part landssøga.

3. partur b. Annar táttur vísir, hvussu finskt virkar sum »frystiboks« fyri eina hóp av norðurlendskum orðum, sum eru tikin inn í finska málið fyri meira enn 2000 árum síðani. Av tí at finskt hevur ikki verið fyri nær til so nógvum ljóðbroytingum sum tey norðurlendsku málini, eru tøkuorðini ofta varðveitt í upprunalíki, bert lagað eftir finskari ljóðskipan.

3. partur c. Ein stórur munur millum nútíð og miðøld er, at fólk úr øllum økinum frá norðbúgvabygdunum í Grønlandi til Álands og frá Norðurnoregi til Jútlands eftir øllum at døma hava skilt hvør annan og hava havt somu reglur fyri rúnaristur. Í síðsta tátti í hesum

parti er stutt kunning um »Danska tungu,« sum samnorðurlendska mentanarmálið varð nevnt, og um teir rithøvundar og tátíðar »málvísindamenn«, sum nýttu og mentu hetta mál.

Fjølbroyttu Norðurlond (4. kapittul)

4. partur a. Neyvan eru onnur viðurskifti, ið hava líka stóran týdning fyri mentanarliga samleikan sum málið. Menningin av einum norskum skriftmáli var ein staðfesting av sjálvstøðu landsins; men hetta trokaði ikki tað danska burtur, og tí hava norðmenn í sløk 120 ár havt tvey almenn skriftmál, bókmál og nýnorskt – í ymsum brigdum. Í fyrsta tátti í kapitlinum »Sidemål nå igjen ...« er ein søgulig lýsing av serligu norsku málstøðuni, og røtt verður um málsligu framtíðina. Er tað rímiligt, at næmingar skulu upp bæði í sínum høvuðsmáli og síðumáli, tá ið tað reint málvísindaliga er ivasamt at tala um tvey mál? Og kann spjaðingin møguliga økja um sosialar ójavnar?

4. partur b. Í Finnlandi eru bæði finskt og svenskt almenn mál. Veitst tú ikki alt fyri eitt, hvat mál ávikavist finnlandssviar og svøríkisfinnar tala – og hvat munurin millum finnar og finnlendingar er – verður tú klókari, um tú lesur táttin »På svenska i Finland«. Nú er ikki longur kravt at læra bæði málini, men hvat hendir við tvímælinum og norðurlendska samhaldinum, um svenskt oftari og oftari verður valt frá?

4. partur c. Tátturin um »Minoritetsspråk i Norden« elur fram eina mynd av málsliga margfeldinum við einum yvirliti yvir tey mál, ið eru móðurmál hjá pørtum av íbúgvunum í Norðurlondum, men hvørki eru høvuðsmál, málføri ella innflytaramál. At sámiskt og romani eru vard av evropeiska sáttmálanum um landspartamál og minnilutamál frá 1998, vita kanska tey flestu, men tað er í grundini eisini galdandi fyri málið hjá eitt nú kvænum í Noregi, torndalsfinnum í Svøríki, tartarum og fornrussum í Finnlandi og týska minnilutanum í Danmark.

4. partur d. Við einum norðurlendskum máli sum móðurmáli verður tú varur við málslig serdrøg, tá ið tú sendir teldupost um enskmælt forrit – og úrslitið verður ein »stavgreytur«. Flestu skriftmál við latínskum stavraði eru bøtt við serstavum. Í hesum tátti verður sagt frá søguni um eksotisku norðurlendsku bókstavirnar æ/ä, ø/ö, å, þ og ð.

Fólkanøvn eru serligt samnorðurlendskt fyribrigdi. Mong børn eita enn á døgum nøvn við túsund ára rótum í norðurlendskum,

men fleiri aðrar bylgjur enn tann norðurlendska hava ávirkað valið av nøvnum og navnasniðum. Kapittulin endar við tveimum brotum um ávikavist navnasið í norðurlendskum yvirhøvur *(4. partur e)* og tann serliga siðin í Íslandi *(4. partur f)*.

Hvør maður sítt mál – málføri nú á døgum (5. kapittul)

Varð Kalmarsamveldið ikki loyst sundur í 16. øld, høvdu vit kanska umrøtt svenskt, norskt, danskt, føroyskt og íslendskt sum norðurlendsk málføri! Men nú hevur hvørt landið sítt serliga mál – og málføri – eitt nú suðuroyarmál, norrlendskt, bornholmskt ella jämtlendskt.

5. partur a. At fólk skilja hvør annan er ikki bert treytað av málkunnleika, men fyri ein stóran part eisini av hugburði. Fyrsti partur í hesum kapitli veitir okkum innlit í, hvussu tolsemið er við málførum í ávikavist Finnlandi, Svøríki, Noregi og Danmark.

5. partur b. Nú á døgum hevur nýtslan av málførum ógvuliga ymiska støðu – og harvið útbreiðslu – í ymsu Norðurlondunum. Men ymisk viðurskifti kunnu ávirka gongdina. Møguliga kemur eitt mótrák ímóti altjóðagerðini, ið er útjaðaranum til fyrimunar. Mundu málførini tá fingið ein øðrvísi leiklut? Í partinum »Dialekter – ei historie om dei pene, dei korrekte eller dei gale?« verður m.a. kjakast um støðuna hjá málførunum í almennu miðlunum við atliti at regluskipaðum talumáli. Teir mongu spurningarnir í hesum partinum kunnu íbirta nógv mentanarpolitiskt kjak.

5. partur c. Ofta verða viðurskiftini millum ríkismál og málføri øsandi lýst soleiðis: »Eitt mál er eitt málføri við heri og flota« (Max Weinreich). Í táttinum »Farvel til dialekterne i Danmark« verður umrøtt, hvar »Herur og floti« hjá danska ríkismálinum hava verið serliga sterkir. Sum talumálsbrigdi ræður ríkismálið at kalla í øllum almennum samskifti, og málføri verða bert havd til húsbrúk. Í grundini halda tey, ið siga nakað um tað, at fongur er í at duga fleiri málbrigdi; hví tykist tað ikki so, tá ið samanum kemur?

5. partur d. Tó at málføri eru næstan burturdottin í Danmark, eru tey enn livandi í Føroyum, her málið er nógv fámentari! Kanska tí at fyri hálva 19. øld var einki reglubundið skriftmál, har málførini vórðu savnað og javnað. Munir í framburði verða góðtiknir, men tolið er ikki tað sama, tá ið talan er um frábrigdi í málæru og orðfeingi – eitt nú tá ið orð hava ymisk kyn og harvið eisini ymsa bending norðanfyri og sunnanfyri. Les meir í greinini: »Findes der dialekter på Færøerne?«

5. partur e. Í Íslandi er gongdin tann, at staðbundin málbrigdi kámast. Ógreitt er, hví málið verður einsháttað, men kanska kemur tað av tí, at ljóðbroytingarnar hava verið so smáar síðan miðøld og at rættskrivingin er tí lítið og einki broytt frá fornískendskum. Fornsøgumálið virkar mangan sum fyridømi fyri nútíðar talumál, og málsligt støðufesti hevur við sær, at broyttur framburður lættliga kennist vanvirðiligur. Les meira í greinini: »Island – landet uden dialekter?«

Enskt mál – hóttan ella tilfeingi? (6. kapittul)

Málsliga samskiftið millum norðurlond hevur gjøgnum tíðirnar havt avgerandi týdning fyri málgongdina, og ikki er alt farið fram í stillum. Nú á døgum er tað samskiftið við enskt, ið vekur mestan ans bæði til ilt og gott og sum elvir til mikið kjak, ið ber dám av málreinsing.

6. partur a. Í fyrsta tátti verður greitt frá hugtakinum *purisma* ella strembanini eftir at halda málið »reint« við at nýta og mæla til ávís orð og orðasnið, ið eru mett at hóska til málið. Onnur orð verða hildin at vera »órein« og verða tí lúkað burturúr. Tað ber til at tala um málreinsing bæði á persónligum og á hægri málpolitiskum stigi. Í greinini verður rætt um hugburð og mannagongd í Danmark, tí minst puristiska Norðurlandinum og í Íslandi, tí mest puristiska.

6. partur b. Tíðir skifta. Í norðurlendskum málum er tøkan úr enskum alsamt vaksandi og hongur saman við politiska og figgjarliga harradøminum hjá USA eftir annan heimsbardaga, men so hevur ikki altíð verið. Eftir at danskir og norskir víkingar løgdu partar av Onglandi undir seg, virkaðu norrønt og fornenskt lið um lið í fleiri hundrað ár og blandaðust so smátt um smátt. Mong av vanligastu orðunum í enskum stava tískil frá máli, ið einaferð varð tosað í núverandi Týsklandi, Danmark og Noregi. Søguligu viðurskiftini ímillum enskt og norðurlendskt verða viðgjørd í greinini »Engelsk tur-retur«.

6. partur c. Tað er einki nýtt í tí, at tikið verður frá teimum, ið hava valdið og teimum, ið tørvur er á at samskifta við – eitt annað er, at eitt heilt mál verður avloyst av einum øðrum! Tøkan av enskum og amerikonskum orðum til miðlar, handil og tøkni er nú so umfatandi, at summi halda tað fara at treingja tjóðarmálið fullkomiliga burtur. Greinin snýr seg um málsligan *økismiss*. Kann ella eigur at

verða lagt uppí? Eitt forboð fyri enskum er óhugsandi, og eitt krav um at nýta tjóðarmálið er nyttuleyst – men hvat er so at gera?

6. partur d. Í øllum Norðurlondum eru tað tey ungu, sum eru høvuðsinnflytarar úr enskum og amerikonskum. Mong fata seg sjálv sum tvímælingar og hava einki ímóti at geva heimamálinum ein altjóða dám við at nýta ensk frøðiorð og hugtøk, men hví er tað nú snildari at *shoppa* enn at fara til handils? Hví ljóða týðingar av eitt nú *fast food* láturligar? Hví skulu vit yvirhøvur geva okkum far um, hvat *big pack* ella *disc man* eitur í fleirtali á føroyskum? Tátturin »Have a nice day, hørru« gevur ikki svarið, men fleiri spurningar og dømi.

Mál í røring – men hvagar gongur leiðin? (7. kapittul)

7. partur a. Øll livandi mál eru áhaldandi í røring. Talumálið broytist, tá ið fólk møta hvør øðrum, lurta, ávirkast og kanska broyta málburðin eitt sindur, og hóast afturhaldandi ávirkanina av orðabókum, málnevndum og lærarum verður eisini skriftmálið broytt áhaldandi. Ber til at stýra gongdini? Og hví royna vit at gera tað? Í fyrsta parti í kapitlinum verður spurningur settur: »Hvor går språket?« og hugt verður eftir, hvussu ymsu Norðurlondini taka sær av málbroytingum.

7. partur b. Málið broytist alsamt skjótari, so orðabøkur verða skjótt avoldaðar. Ein merking verður flutt úr einum høpi í annað, og ein hjámerking kann skjótt gerast høvuðsmerking. Í kunningarsamfelagnum koma broytingar við slíkari ferð, at ikki bert tey gomlu hava ilt við at fylgja við. Í táttinum »Ord på väg« verður nomið við ymsar broyttar merkingar og tær misskiljingar, ið kunnu standast av teimum.

7. partur c. Málsøgan er ikki bert bundin at skiftandi orðfeingi, bending og ljóðlæru, men eisini at, hvussu tilfar og kynstur eru ment til at festa, goyma og varpa mál út – undir einum nevnt *miðlar*. Tátturin »Fra runer til sms« gevur eina hóming av, hvønn týdning nýggir miðlar hava havt fyri útlátsins innihald, snið og virki. Fjarritarin, telefonin, útvarpið, sjónvarpið, teldan og fartelefonin

hava hvør í sínum lag ávirkað menniskjans samveru- og samskiftishættir á undursaman hátt. Eingin hevði t.d. kunnað sæð fyri sær, hvat fartelefonin fekk at týða fyri barna- og ungdómsmentanina – og vert er at geva gætur, at sms-málið og rúnaristurnar hava ymiskt í felag.

7. partur d. Í táttinum »Globalsprog – nationalsprog – lokalsprog« verður farið inn á spurningin: Hvussu fer at gangast norðurlendsku málunum og alnorðurlendsku fatanini í 21. øld? Higartil hevur gongdin í Norðurlondum verið tann, at málini eru alsamt gliðin sundur, tí síðan sameindu »donsku tungu« er av tjóðskaparligum og politiskum grundum lagdur sjógvur ímillum londini málsliga. Nú hevur altjóðagerðin eina javnandi ávirkan við enskum sum altjóða máli. Men myndin er ikki eintýdd. At enskt verður nýtt sum *lingua franca* tykist í løtuni sum ein missur fyri norðurlendska samanhaldið, men kemur kanska í øðrum umfari at styrkja fólkaræðið. Frá tí degi verða íslendingar, føroyingar, finnar, grønlendingar og sámar, ið áður hava verið partar í samstarvinum á fremmandamáli, í hvussu er á jøvnum føti við danir, norðmenn og sviar ...

7. partur e. Óttin fyri framtíðini hjá teimum norðurlendsku málunum kemur serliga av tí ávirkan, ið enskt hevur fingið sum ungdómsmál, handilsmál og miðlamál. Men tey norðurlendsku málini eru í løtuni ikki í vanda fyri at doyggja út. Onkur sámisk mál eru tó longu burtur, og um allan heim hvørva mál og mentanir sum ongantíð áður. Sambært útrokningum hjá málgranskarum er helvtin av teimum 7300 málunum, ið vit vita um, burtur um 100 ár. Í miðal doyr eitt mál út tíggjunda hvønn dag, og nú internetið vinnur fram, er vandin fyri máldeyða upp aftur størri. Spurningurin í hesum parti »Uddør de nordiske språk?« er tí ikki óviðkomandi. Tað eru hugurin og evnini hjá teimum ungu og møguleiki teirra til at tala málið, ið gera av, hvørja lagnu tað fær. Hvørja málsliga framtíð vilja vit hava? Og hvønn leiklut vilja vit, at norðurlendsku málini skulu hava í framtíðini?

Góðan lestrarhug!

Týtt úr donskum hevur Óli Jákup Niclasen

ARNE TORP

Norðurlendsk mál í fortíð og nútíð

Málíkskapur og málmunur, málættir og málskyldskapur

Fólk hava til allar tíðir gáað eftir, at orð í ymsum málum líkjast, og tey hava gjørt sær hugsanir um, *hví* líkskapur og munur eru millum mál. Í tí kristna Evropa varð vanliga hildið, at øll menniskju upprunaliga høvdu talað hebráiskt. Tað var jú málið í Gamla testamenti, og sostatt máttu Ádam og Eva eisini hava talað hebráiskt í Paradísi. Frágreiðingin, hví ein ørgrynna av ymsum málum seinni tók seg upp, var eisini at finna í Bíbliuni, í 11. kapitli í 1. Mósebók. Her verður sagt frá, at menniskjuni í felag ætlaðu at byggja eitt torn, sum skuldi røkka heilt til himmals, men hesa ætlan helt Gud lítið um, og tí legði hann uppí og blandaði mál teirra soleiðis, at tey ikki longur skiltu hvør annan. Tískil sleptu tey ætlanini og spjaddust í staðin út um allan heimin.

Søgnin um Bábilstornið

Henda søgn hevur helst tikið seg upp við støði í einum ovurstórum torni, sum var ein partur av tempulbygningunum í býnum Bábylon við Evfrat. Navnið Bábylon merkir 'Gudanna portur', men ísraelar tulkaðu tað sum snið av tí hebráiska sagnorðinum *balal*, sum merkir 'at ørkymla, órógva', og soleiðis varð frumsøgnin um tað sonevnda Bábilstornið til. Máliskan *bábilskur hurlivasi* = 'ruðuleiki', sum er til í mongum evropeiskum málum, vísir upprunaliga til ta støðu, sum kom í, eftir at Gud hevði lagt uppí og steðgað byggingini av torninum við at blanda tungumálini.

Ástøðið um hebráiskt sum frummál er ikki tað einasta, sum hevur verið uppi frá gamlari tíð. Svenski vísindamaðurin *Olof Rudbeck* (1630-1702) legði í einum stórætlaðum verki í trimum bindum við heitinum *Atlantica* fram ástøðið um, at oyggjaríkið Atlantis, sum

forngrikski heimspekingurin Platon vildi vera við hevði ligið úti í Atlantshavi, áðrenn tað eftir einari nátt fór undir kav, í roynd og veru var Svøríki. Men ikki nóg mikið við tí: Svenskt var eisini frummálið, sum bæði grikskt, latín og hebráiskt eru sprottin úr.

At tað var minst líka ótrúligt og ósannlíkt ástøði sum frumsøgnin sjálv um Atlantis, komu fólk heilt skjótt eftir. Longu fimmti ár seinni gjørdi landsmaðurin *Olof von Dalin* gjøldur burtur úr hugflognum hjá Rudbeck á henda hátt (í føroyskari týðing):

> Sjálvt navnið Ádam er reint svenskt: Ádam varð skapaður av *mold*, av *dusti*. Tað er jú *Av damm* (svenskt *damm* = dust). Tá ið V verður tikið burtur av *Av damm*, fáa vit Adam.
>
> Eva er eisini reint svenskt navn. Tá ið maðurin vaknaði og sá sín vakurleika við ikki so frægt sum einum fikublaði fyri, er tað natúrligt, at hann undraðist og segði: *He*! *Hva*? Og úr teimum tveimum orðunum spyrst beinanvegin: *Heva*?

Ástøðið um, at hebráiskt var upphavið til øll onnur mál, var ikki lætt at prógva – og tað var jú heldur ikki rætt, vísti tað seg seinni. Men áðrenn nakað vísindaligt háttalag kundi vísa á ella prógva, hvussu mál vóru í ætt, var tað heldur ikki møguligt at mótprógva slík ástøði, sum at hebráiskt ella svenskt mátti vera tað frummálið, sum øll heimsins mál eru runnin úr.

Eitt slíkt háttalag kom tó fram fyrst í 19. øld við uppdagingini av tí, sum vit nevna *arvafrøðiligur (genetiskur) málskyldskapur*. Við teimum sonevndu *søguliga-samanberandi málvísindunum* fekst eitt neyvt amboð til at kunna avgera, *hvaðan* líkskapurin millum mál stavaði. Hann kann nevniliga stava frá:

1. almennum umstøðum í tí fyrstu málinnlæringartilgongdini, sum gera, at orð av slagnum *mamma* og *pápi* í stórum dráttum eita umleið tað sama um allan heim
2. orðatøku, sum t.d. upprunaliga grikska orðið *demokrati* ella arábiska orðið *alkohol*. Tey eru eisini at finna um stórar partar av heiminum
3. at mál, sum í dag kunnu vera rættiliga ymisk, hava flutt seg í ørsmáum stigum í nógv ættarlið frá einum felags upphavi.

Bara í tí síðsta førinum ber til at tala um arvafrøðiligan málskyldskap.

Tað søguliga samanberandi háttalagið

Um eitt ávíst ár skuldi verið sett fyri, nær ið søgulig málvísindi, soleiðis sum vit kenna tey í okkara tíð, tóku seg upp, hevði tað verið árið 1786. Tað var nevniliga tá, at tann bretski eysturlandafrøðingurin Sir William Jones helt ein fyrilestur fyri The Royal Society í Calcutta í India, har hann m.a. umrøddi tað gamla indiska málið sanskrit á henda hátt:

The Sanskrit language, whatever its antiquity, is of a wonderful structure; more perfect than the Greek, more copious than the Latin, and more exquisitely refined than either; yet bearing to both of them a strong affinity, both in the roots of verbs and forms of grammar, than could possibly have been produced by accident; so strong, indeed, that no philologer could examine the Sanskrit, Greek and Latin, without believing them to have sprung from some common source, which, perhaps, no longer exists.

Hugsanin, sum Jones kemur fram við her, er sostatt, at fleiri mál, sum longu fyri tvey túsund árum síðan vóru rættiliga ólík, eina ferð í eini uppaftur fjarari fortíð hava ment seg úr einum felags frummáli, sum »perhaps, no longer exists«, sum hann orðar tað – hann kundi helst havt slept fyrivarninum »perhaps«, men annars var hugsan hansara púra rætt, sum tað skjótt skuldi vísa seg.

Fyrilesturin vakti ans eisini í Evropa, og skjótt vóru málgranskarar í ferð við at royna at finna út av, hvussu tað samband, sum Jones hevði bent á, kundi prógvast við strongum vísindaligum háttalag. Týðandi nøvn í hesum sambandi eru týskararnir *Franz Bopp* (1791-1867) og *Jacob Grimm* (1785-1863), og teir og aðrir løgdu grundarlagið undir alla seinni gransking av indoevropeiskum málum. Eisini her í Norðurlondum høvdu vit ein granskara við altjóða umdømi á sama stigi sum teir báðir áðurnevndu týskararnir, danan *Rasmus Rask* (1787-1832), sum í sínum stutta lívi gjørdi grundleggjandi kanningar í indoevropeiskum, ikki minst í norðurlendskum, men hann hevði eisini áhuga fyri málum uttan fyri ta indoevropeisku málættina, t.d. finskum og sámiskum.

Í sama tíðarskeiði, sum tað søguliga-samanberandi háttalagið mentist, hendi ómetaliga nógv í náttúruvísindum – ikki minst í lívfrøði, har ið menningarlæran hjá Darwini var ein avgjørdur varði á vegnum. Lívfrøðingar og málfólk fóru at kalla samstundis í holt við at nýta tann sonevnda *ættarfrymilin* fyri at vísa, hvussu bæði



1. mynd: Norðurlond – landafrøðiligt øki og siðbundin mál

núlivandi verur og nútíðar mál høvdu ment seg úr undanfarnum skapi og sniðum. Hesi ættartrø hava mótsett rættiligum skógartrøum vanliga røturnar í erva og greinarnar vaksandi niðureftir (sí t.d. 4. mynd niðanfyri).

Málini í Norðurlondum: Tríggjar ættir – mong mál

Í Norðurlondum eru bæði mál, sum eru nær skyld, og mál, sum eru av heilt ymsum málættum. Tað politiska-landafrøðiliga økið, sum vit nevna Norðurlond, røkkur heilt úr Grønlandi í vestri um Ísland og Føroyar til Finnlands í eystri – við Danmark, Noregi og Svøríki í miðjuni. Í hesum stóra øki verða mál talað, sum fyri ein part hava felags upphav og fyri ein part ikki (sí 1. mynd).

Síðan seinast í 18. øld hava málgranskarar vitað, at mál broytast við tíðini á ein slíkan hátt, at til ber at seta upp sonevndar lógir fyri, hvussu ljóðini á einum stigi í málmenningini svara til eldri og yngri stig í sama máli. *Ljóðlógirnar* eru eitt av týdningarmestu amboðunum í tí søguliga-samanberandi háttalagnum, tí við hesum lógunum hevur tað eydnast at staðfesta eina rød av *málættum*, t.e. bólkum av málum, sum hava ment seg úr einum felags upphavi. Hvussu hesar lógir virka í royndum, skulu vit hyggja nærri at seinni.

Fyrst skulu vit bara hyggja at, hvussu ljóðligur líkskapur kann verða nýttur til at staðfesta ymsar málættir. Vit skulu í tí sambandi bera saman tey fimm fyrstu talorðini í fýra málum í indoevropeisku málættini, nevniliga norskum, týskum, enskum og fronskum, og síðan tey somu talorðini í sámiskum, finskum og ungarskum, sum eru av tí uralsku ættini.

indoevropeiskt				**uralskt**		
norskt	*týskt*	*enskt*	*franskt*	*sámiskt*	*finskt*	*ungarskt*
en/ein	eins	one	un	okta	yksi	egy
to	zwei	two	deux	guokte	kaksi	kettö
tre	drei	three	trois	golbma	kolme	három
fire	vier	four	quatre	njeallje	neljä	négy
fem	fünf	five	cinq	vihtta	viisi	öt

2. mynd: Fimm tey fyrstu talorðini í nøkrum indoevropeiskum og uralskum málum

Sum vit síggja, líkjast tølini rættiliga nógv í trimum teimum fyrstu av hesum málunum, og tað kemst av, at tey eru av somu greinini á tí indoevropeiska »trænum«, nevniliga teirri *germonsku*. Franskt er harafturímóti av tí *romansku* greinini, sum hevur ment seg úr latíni, sum er eitt sonevnt *italiskt* mál. Tey fronsku tølini líkjast tí nógv minni tølunum í trimum teimum fyrstu teigunum, men framvegis síggja vit ein vissan líkskap. Tey uralsku tølini harafturímóti eru heilt øðrvísi enn tey indoevropeisku, men sýna afturfyri sínámillum líkskap. Í teimum uralsku málunum síggja vit, at sámiskt og finskt mugu vera av eini aðrari grein enn ungarskt.

Tá ið tað snýr seg um heilt ólíkar málættir, hevði tað harafturímóti verið bæði óvæntað og ósannlíkt, at talorðini høvdu líkst hvørt øðrum, og sum vit síggja, gera tey tað heldur ikki. Indoevropeiskt og uralskt eru sostatt tvær ymsar málættir, júst tí at tað ikki við ljóðlógum ber til at føra prógv fyri einum felags upphavi.

Í einari og somu málætt kunnu vit harafturímóti brúka ljóðlógirnar til at staðfesta ymsar undirbólkar. Sum vit síggja av hesum dømum, kunnu verandi mál í einari málætt ofta vera rættiliga ólík, júst á sama hátt sum fjar skyldfólk eru tað í tí lívfrøðiliga heiminum. Um so er, at tey eru av somu ætt, eru tey hinvegin ment úr einum og sama »frummáli«. Hetta frummál hava vit ofta ikki nakað ítøkiligt prógv um í skrivligum ella øðrum minnismerkjum, júst sum vit heldur ikki vita serliga nógv um, hvussu forfedrar okkara í fyrndini sóu út.

Í málvísindum kunnu granskarar hinvegin rættiliga sannlíkt endurskapa slík ókend »frummál« við tí søguliga-samanberandi háttalagnum. Hetta háttalag miðar m.a. eftir at bera saman bæði núverandi mál og ikki minni tey ítøkiligu sniðini, sum vit hava prógv um í skrivligum frásøgnum. Í Norðurlondum eru nú á døgum mál, sum eru av trimum ólíkum ættum, og sambandið millum tey einstøku málini í hvørjari ætt verður ímyndað sum í 3. mynd.

Tað er tískil týdningarmikið at skyna á *norðurlendskum málum* – sum er felagsheiti fyri tann norðurgermanska undirbólkin av tí indoevropeisku ættini: danskt, svenskt, norskt, føroyskt og íslendskt – og *málunum í Norðurlondum*, sum eisini fevna um mál úr bæði tí uralsku málættini: sámiskt og finskt – og úr tí eskimoisku-aleutisku ættini: grønlendskt.

Ta indoevropeisku málættina skulu vit seinni siga nógv meira um, men fyrst skulu bara sigast nøkur fá orð um hinar báðar málættirnar.



3. mynd: Málættirnar og málini í Norðurlondum

Grønlendskt er av tí *eskimoisku-aleutisku* ættini, tí grønlendingar ella inuittar, sum teir nevna seg sjálvar, hava síni málsligu ættarfólk vestanfyri – í Norðuramerika – úr Norðurkanada og Alaska til oyggjabólkin Aleuturnar sunnan fyri Beringshavið.

Ættarnavnið *uralskt* sigur frá, at málgranskarar meta, at finnar og sámar hava sínar málsligu røtur í námind av Uralfjøllunum í Russlandi. Tann uralska ættin fevnir – umframt um ymsar smáar málbólkar í Russlandi – eisini um eitt stórt evropeiskt mál, nevniliga *ungarskt*, og um *estiskt*, sum bæði málsliga og landafrøðiliga er granni hjá finskum. Í roynd og veru eru finskt og estiskt so nær í ætt, at tey fyri ein part eru sínámillum fatilig. Men fatanin gongur í stórum dráttum bara annan vegin – estar skilja nógv betur finskt, enn finnar skilja estiskt!

Tað er eisini galdandi nógva aðrastaðni í heiminum, at fólk í einum lítlum málsamfelag oftast eru nógv raskari at skilja tað »stóra« málið enn øvut. Tað síggja vit m.a. eisini í sambandinum millum smá og stór *norðurlendsk* mál: Best liggur fyri hjá okkum føroyingum, sum eru tað minsta samfelagið. Vit skilja í roynd og veru væl *øll* norðurlendsk mál – íroknað eitt sindur av íslendskum. Á aftasta beinki enda hinvegin ofta sviar, sum eru tað størsta norðurlendska málsamfelagið – nærum 9 milliónir í tali: Kanningar hava víst, at sviar skilja verri bæði danskt og norskt, enn danir og norðmenn skilja svenskt.

Sámiskt kann málsliga neyvan roknast sum bara *eitt* mál, tí tey ólíkastu sámisku »málførini« eru eins ólík og t.d. meginnorðurlendskt

og týskt eru tað, t.e. at tað ikki ber til at skilja tey sínámillum (sí brotið um sámiskt, 2c). Hetta hevur við sær, at sámar úr ymsum málføraøkjum ofta ikki kunnu tosa saman á sámiskum, men mugu í staðin nýta eitt felags fremmant mál; í royndum verður tað tí meirilutamálið í landinum (norskt, svenskt, finskt ella russiskt). Eitt slíkt felags fremmandamál, sum verður brúkt av fólki við ólíkum móðurmálum, tá ið tey tala saman, nevna vit eitt *lingua franca*.

Lingua franca

Lingua franca verður í dag nýtt um eitt og hvørt mál, sum fólk við ymsum móðurmálum nýta sum felags samskiftisamboð, uttan at nakar av teimum hevur tað sum móðurmál. Í okkara tíð er tað fyrst og fremst enskt, sum hevur henda leiklut í stórum pørtum av heiminum, men t.d. í tí, sum áður var Sovjetsamveldið, er tað oftast russiskt, og í Afrika kunnu tað vera ymisk gomul evropeisk hjálandamál (enskt, franskt, portugisiskt), men eisini meira staðbundin afrikonsk mál (t.d. swahili í Eysturafrika).

Heilt bókstavliga merkir *lingua franca* hinvegin 'franskt mál', men hetta heiti vísti upprunaliga ikki til tað, sum vit nú á døgum kenna sum franskt, men til eitt sonevnt *þidginmál*, t.e. eitt einfaldað hjálparmál, sum eingin hevur sum móðurmál, men sum bara verður nýtt, tá ið fólk hvør við sínum móðurmáli tosa saman. Hetta upprunaliga *lingua franca* var tá eitt slíkt pidginmál við ógvuliga einfaldaðari mállæru grundað á orð úr ymsum romanskum málum (serliga provençalskum, italskum og sponskum), og tað varð nýtt í handilssamskifti við Miðjarðarhavið í fleiri hundrað ár, frá miðøld og fram til 19. øld. Á okkara døgum eru nógv pidginmál í øðrum pørtum av heiminum, oftast grundað á orð úr evropeiskum hjálandamálum (serliga enskum og fronskum).

Áður var eisini eitt pidginmál í Norðurlondum, tað var russaranorskt, sum varð nýtt í tí sonevnda pomorhandlinum, ið fór fram millum russar og norðmenn í Norðurnoregi frá 18. øld og fram til fyrra heimsbardaga. Orðini í russaranorskum vóru partvíst tikin úr russiskum og partvíst úr norskum, men eisini úr ymsum øðrum evropeiskum málum (enskum, týskum, niðurlendskum).

Ávísingar til internetatsetur, har tú kanst lesa meiri um *lingua franca*, *russaranorskt* og *þomorhandilin*, eru á síðu 74.

Tað er nú ikki serliga óvæntað, at mál, ið ikki hava felags upphav, eru ógvuliga ymisk. Men eisini í teimum einstøku málættunum eru ofta stórir munir millum tey ymsu málini. Tað er í stóran mun galdandi í tí uralsku ættini og ikki minni í tí indoevropeisku ættini, sum vit nú skulu hyggja eitt sindur nærri at.

Tann indoevropeiska málættin

Tann fyrsti, sum teknar ættartræ fyri ta indoevropeisku ættina, er týskarin *August Schleicher* (1821-68). Hansara ættartræ sær soleiðis út:



4. mynd: Indoevropeiska ættartræið hjá Schleicher. Tey fýra nútíðarmálini, sum standa niðast í »trænum« við skákskrift, eru ikki við hjá Schleicher; tey eru skoytt uppí her. Hví júst hesi málini eru tikin sum dømi, verður greitt frá niðanfyri.

Tað skal fatast á tann hátt, at Schleicher hugsaði sær, at frumindoevropeiskt fyrst býtti seg í tvær »greinar« – »áriskt-grikskt-italo-keltiskt« og »germano-sláviskt« – síðan býtti hvør av hesum bólkum seg aftur í tvey o.s.fr. Hvørt av hesum sundurbýtum var sostatt eitt úrslit av, at málførismunir høvdu tikið seg upp í einum upprunaliga

einvorðnum indoevropeiskum frummáli. Slíkir málføramunir taka seg serliga upp, eftir at ymsir bólkar av tí upprunaliga fólkabólkinum eru farnir »heimanífrá« (hvar ið tað enn kann hava verið, veit eingin við vissu) og hava sett seg niður á heilt ymsum støðum.

Tað indoevropeiska frummálið

Upphavið til tey indoevropeisku málini liggur framvegis í hálvmyrkri, bæði tá ið tað ræður um tíð og stað. Vanligasta hugsanin er, at øll tey indoevropeisku málini ganga aftur til eitt frumsnið, sum var eitt eindarmál fyri um leið 5-6000 árum síðan og varð talað av einum fólkabólki, sum búði onkustaðni norðan fyri ella sunnan fyri Svartahavið – her eru granskarar ikki samdir.

Tann fyrsti bólkurin, sum fór »heimanífrá«, var eftir øllum at døma tey, sum seinni eru kend sum *hetittar*, eitt gamalt mentafólk í Eysturásia. Summir granskarar meina, at henda útflyting fór fram fyri minst 4.000 árum síðan. Seinni eru teir ymsu bólkarnir – *indoiranar, slavar, keltar, germanar* – farnir í ymsar ættir, soleiðis at vit so við og við fingu indoevropeisk mál um alt Evropa og ein stóran part av Ásia. Við hjálandatøku í nýggjari tíð hava indoevropeisk mál sum enskt, spanskt, franskt og portugisiskt breitt seg til allar heimspartar.

Sonevndar *geolektir* – t.e. landafrøðiligir talumálsmunir ella tað, sum vit eisini nevna *málføri* – taka seg vanliga upp av náttúrubundnum lendisforðingum av onkrum slag. Tað, sum ger mun á málførum, er fyrst og fremst stór landafrøðilig frástøða ella landslag við høgum fjøllum og ógongdum skógum ella mýrilendi, ið tarna øllum dagligum samskifti. Tað er ikki fyrr enn við nútíðar fjølmiðlum – serliga teimum elektronisku – at vit fyri fyrstu ferð í søguni eru før fyri at samskifta við hvønn tað skal vera uttan at hugsa um náttúrubundnar forðingar ella frástøðu. Útflyting til fjarlagin øki hevði tí í gamlari tíð av sonnum við sær, at málføramunir tóku seg upp. Hesir málføramunir hava so við tíðini vaksið seg størri og forðað fyri øllum málsligum samskifti millum teir ymsu útflytarabólkarnar.

Um vit fata »træið« á 4. mynd sum eina framseting av veruligum líkskapum og munum millum ólík mál nú á døgum sæst, at myndilin hóskar heilt væl: Mál, sum eru av somu grein, eru líkari

Málmenning: Mistak oman á mistak í tað óendaliga …

Tá ið ein fólkabólkur, sum upprunaliga talar sama mál, verður býttur sundur í fleiri bólkar, sum ikki longur hava samband hvør við annan, fær tað so við og við stórar avleiðingar fyri málið. Og høvuðsorsøkin, at soleiðis er, er heilt einfalt tann sannroynd, at fólk ikki liva æviga. Tí má hvørt ættarlið so at siga skapa málið av nýggjum: málið má byggjast upp í smábarnaaldri við grundarlag í tí málinum, sum barnið hoyrir í sínum umhvørvi. Tað er jú als ikki løgið, at smáir munir taka seg upp millum tað málið, sum tað eldra ættarliðið hevur, og tað málið, sum børnini »seta saman«. Sæð úr sjónarhorninum hjá eldra ættarliðnum tosa tey ungu »skeivt«, men um so er, at nóg nógv gera sama »mistak«, gerst »mistakið« við tíðini nýggj siðvenja.

Sum eitt ítøkiligt dømi kunnu vit nevna orðið *tak*, sum í dag kann hava tvær heilt ymsar merkingar: Vit kunnu tala um *tak* á einum húsum, og vit kunnu »taka eitt *tak*«, t.e. taka fastliga í okkurt. Her vóru á norrønum tvey orð, sum vórðu framborin ymist: Um at taka fastliga í okkurt varð sagt *tak*, men um »húsatak« varð orðið *þak* nýtt, við tí sama *th*-ljóðinum fremst í orðinum sum í enska *thing*. Her hava øll meginnorðurlendsku málini fyri langari tíð síðan mist *th*-ljóðið, og tað hendi fyri ein stóran part longu í miðøld. Her hava vit sostatt dømi um eitt »framburðarmistak«, sum hevur tikið seg fram um øll Meginnorðurlond. Í Íslandi er munurin millum *þ* og *t* harafturímóti varðveittur, so har eitur tað framvegis *tak* (um tað at taka í nakað) og *þak* (húsatak).

Men eisini í Íslandi er málið broytt frá eldri tíð – hóast als ikki so nógv sum í Meginnorðurlondum. Eitt dømi um hetta hava vit í sjálvljóðinum *y*, sum er vorðið *i* í íslendskum. Tað merkir eitt nú, at íslendingar bera fram nútíð av sagnorðunum *bítur* og *flýtur* sum rímorð. Eisini á føroyskum er samanfall. Vit siga /*bítur*/ og /*flítur*/ (hinvegin verða orðini skrivað ymist: *bítur* og *flýtur*). Harvið kunnu vit staðfesta, at fólk í Meginnorðurlondum hava gjørt ávís »mistøk«, sum ikki hava vunnið undirtøku í Íslandi og lutvíst í Føroyum, men íslendingar hava gjørt onnur »mistøk«, sum ikki eru vanlig aðrastaðni.

Kjarnin er sostatt, at ikki øll gera tey somu »mistøkini«, hóast málið í fyrstuni var líkt: Um fólk bara liva sundurskild nóg leingi, er eingin ivi um, at munir taka seg upp, tí fólk í ólíkum umhvørvi gera ymisk »mistøk«.

hvørt øðrum enn mál, sum eru av ymsum greinum. Franskt, pólskt og týskt eru rættiliga ólík, hóast Týskland er granni hjá bæði Fraklandi og Póllandi. At hesi trý mál kortini eru so ymisk, kemst av, at greinarnar, sum tey eru av, skiltust fyri ógvuliga langari tíð síðan. Tey hava tí havt góða tíð til at menna síni sereyðkenni.

Týskt og íslendskt eru heldur ikki mál, sum tað ber til at skilja sínámillum, men tey líkjast kortini hvørt øðrum nógv meira enn málini í teimum trimum grannalondunum, hóast so langt er ímillum Týskland og Ísland. At týskt og íslendskt eru so mikið lík, má koma av skyldskapi: bæði eru germonsk mál.

Ættarmyndilin og norðurlendsk mál

Tá ið ættarmyndilin verður brúktur til norðurlendsk mál, spyrst harafturímóti eitt úrslit burturúr, sum ikki samsvarar eins væl við tað, sum vit vanliga fata sum týdningarmiklar munir og líkskapir millum tey ymsu málini.



5. mynd: Flokking av teimum norðurlendsku málunum eftir ættarmyndlinum

Um vit »lesa« hetta træið á sama hátt, sum vit gjørdu við tað indoevropeiska træið í undanfarna broti, skuldu vit væntað, at norskt líkist íslendskum og føroyskum meira enn svenskum og donskum. Vit vita tó, at so er ikki; norðmenn skilja danskt og svenskt rímiliga væl, svenskt enntá næstan líka væl sum móðurmálið, men teir skilja hvørki íslendskt ella føroyskt. Í hesum føri er tað sostatt *ikki* rætt, at mál, sum liggja hvørt øðrum nær í »greinaverkinum«, eisini líkjast hvørt øðrum á tann hátt, at tey t.d. eru til at skilja sínámillum – tað er nevniliga ikki galdandi fyri teir tríggjar »kvistarnar« (*íslendskt, føroyskt, norskt*) á teirri vesturnorrønu greinini. Samstundis ber til at skilja báðar kvistarnar (*svenskt, danskt*) á teirri eysturnorrønu greinini bæði sínámillum og hjá einum av teimum vesturnorrønu kvistunum (*norskum*). Her ber sostatt ikki til at nýta ættarmyndilin sum leiðbeinara til at finna líkskap og mun millum nútíðar málsniðini, tí tað er neyvan nakar, sum í álvara heldur, at norskt líkist meira íslendskum og føroyskum enn svenskum og donskum.

Hví vit kortini tosa um »eysturnorrønt« mótvegis »vesturnorrønum« skulu vit siga meira um seinni. Tað eru nevniliga ávísar søguligar orsakir, sum gera, at tað leiðir í óføri at nýta ættartræmyndilin til at vísa líkskap og mun millum tey núverandi norðurlendsku málini. Men fyrst skulu vit hyggja eitt sindur nærri at tí stóra bólkinum, sum tey norðurlendsku málini eru partur av í teirri indoevropeisku ættini, nevniliga teimum germonsku málunum.

Tann germanska málgreinin

Germonsk mál eru nú á døgum spjadd út um meginpartin av heiminum; fyrst og fremst kemst tað av hjálandatøku í nýggjari tíð, t.e. tey seinastu um leið 300 árini. Hóast hesi mál upprunaliga hoyra heima í Evropa, eru tað nøkur teirra, sum stórt sæð verða talað uttan fyri Evropa – tað er ikki minst galdandi fyri tað sonevnda heimsmálið enskt.

Í grundini er eitt germanskt mál til, sum bara verður talað í suðurpartinum av Afrika, tað er *afrikaans*. Tað er fyrst og fremst móðurmál hjá teimum sonevndu boarunum, sum komu úr Niðurlondum til hetta økið frá miðjari 17. øld og úteftir.

Jiddisch, málið hjá teimum evropeisku jødunum, er í høvuðsdráttum grundað á týskt, men hevur eisini ein fittan part úr hebráiskum. Undan seinna heimsbardaga vóru tað nógv fleiri, ið talaðu tað. Seinast í 1920-árunum varð roknað við uml. 7 milliónum í Evropa, og í 1930-árunum millum 1 og 1,5 million í USA. Spurnarteknini í talvuni vísa, at tað vanta upplýsingar um talið.

mál	móðurmálsbrúkarar í Evropa	móðurmálsbrúkarar uttan fyri Evropa
enskt	60.000.000	400.000.000
týskt	98.000.000	?
niðurlendskt	21.000.000	?
svenskt	9.000.000	?
afrikaans	?	6.000.000
danskt	5.300.000	?
norskt	4.500.000	?
frísiskt	400.000	?
jiddisch	?	400.000
íslendskt	280.000	?
føroyskt	55.000	?

Kilde: www.ethnologue.com

6. mynd: Germonsk mál – tal á móðurmálsbrúkarum

Hvussu hesi ellivu mál hava ment seg frá tí upprunaliga indoevropeiska frummálinum, kann lýsast við teimum háttaløgum, sum verða nýtt í søguliga-samanberandi málvísindum. Og her verður sum nevnt arbeitt út frá grundregluni um, at ljóðbroytingar ikki eru tilvildarligar, men stýrdar eftir heilt ávísum ljóðlógum.

Tann germanska ljóðskúgvingin

Tað týdningarmesta eyðkennið, sum skilur germonsku málgreinina frá restini av indoevropeisku málættini, er ein ljóðlóg, sum nevnist *tann germanska ljóðskúgvingin*. Tað er henda ljóðskúgving, sum er orsøk til, at orðini *faðir* og *fæ* byrja við *f* í øllum norðurlendskum málum, meðan t.d. tey tilsvarandi orðini í latíni byrja við *p*: *pater* og *pecu* (framborið /peku/ við u, sum í t.d. orðinum *suð*).

Sum vit síggja, eru tey nútíðarligu norðurlendsku orðini *faðir* og *fæ* rættiliga ólík teimum latínsku orðunum *pater* og *pecu*. Men um vit fara aftureftir í málsøguni, síggja vit, at tey tilsvarandi germonsku orðini líkjast enn meira teimum latínsku. Fyri túsund árum síðan – altso í *norrønum* – æt tað t.d. *faðir* og *fé*, og fara vit fimmhundrað ella túsund ár longur aftur – til *frumnorrønt* ella frumgermanskt – æt tað *faðer* og *fehu*, og tá sæst beinanvegin, at frástøðan til *pater* og *pecu* er munandi minni.

Leggið kortini til merkis, at eisini hesi elstu germonsku orðsniðini byrja við *f*; gjørdu tey ikki tað, hevði tað víst, at tey vóru ikki germonsk, men at tey máttu vera lænt av eini aðrari grein í indoevropeisku málættini – ella frá eini heilt aðrari málætt.

Norrønt og frumnorrønt

Navnið **norrønt** verður vanliga brúkt um málið í Noregi, Føroyum og Íslandi frá 10. øld og fram at uml. 1350. Tá var málið í hesum londum næstan tað sama, tí føroyingar og íslendingar vóru upprunaliga norskir útfarar – flestir av Vesturlandinum. Nútíðar íslendskt og føroyskt hava tí eisini eyðsýndan líkskap við málførini í Vesturnoregi, sum kanska partvíst kemur av teirra felags upphavi, men onnur vilja vera við, at tað eisini kann stava frá sambandi við Noreg seinni í tíðini.

Á norrønum máli eru til stórar bókmentir, sum fyrst og fremst eru verk eftir íslendingar – tær íslendsku miðaldarbókmentirnar á móðurmálinum eru munandi størri og týdningarmeiri enn á øllum øðrum norðurlendskum málum til samans. Tey flestu bókmentaligu verkini eru varðveitt í handritum, sum fyri tað mesta røkka aftur til 13. øld.

Danskt og svenskt mál vóru longu hesa tíðina nakað ólík norrønum, t.e. at málføraskilnaðurin millum norður-

lendsku málini var longu á veg – serliga sást, at danskt tók at skilja seg burturúr.

Frumnorrønt er tað elsta sniðið av germanskum máli, sum vit hava ítøkilig prógv um á skrivligum minnismerkjum. Frumnorrønt er bara varðveitt í innskriftum við einum serligum germonskum stavraði, sum vit nevna *rúnir*. Tey flestu rúnateknini minna um teir latínsku bókstavirnar, sum vit nýta nú á døgum, og tað vísir, at tann ella tey, sum komu við rúnunum, kendu til eitt ella fleiri av teimum stavrøðum, sum vóru í nýtslu í Miðjarðarhavslondunum. Tær elstu innskriftirnar stava frá umleið ár 200 e.Kr., og fram til uml. ár 500 var málið í Norðurlondum frumnorrønt – og allarhelst rættiliga einvorðið. Kendasta av øllum rúnaristum stóð á einum drykkjuhorni úr gulli, sum í 1734 varð funnið í jørðini við bygdina Gallehus í Suðurjútlandi. Týddur ljóðar teksturin soleiðis: *Eg Lægestur holtingi (møguliga: sonur Holt) gjørdi hornið.*

Hvussu tætt hetta málið er frumgermonskum, síggja vit á hesi samanberandi uppseting, har ið gullhornsinnskriftin er »umsett« í fyrsta lagi til endurskapað frumgermanskt (merkið * framman fyri innskriftina merkir, at vit ikki hava beinleiðis keldur frá hesum málstigi), í øðrum lagi til samtíðar germanska málið gotiskt, sum vit kenna frá eini bíbliutýðing, og í triðja lagi til tað munandi yngra norrøna málið.

FRUMGERMANSKT (uml. 200 f. Kr.)
**Ek Hlewagastiz hultijaz hurnan tawidōn*

FRUMNORRØNT (400-árini)
Ek HlewagastiR holtijaR horna tawido

GOTISKT (300-árini)
Ik Hliugasts hulteis haúrn tawida

NORRØNT (frá uml. 1000)
Ek Hlégæstr hyltir horn táða

Arvorð, tøkuorð og innflutt orð

Orð sum »fylgja ljóðlógunum«, soleiðis sum vit sóu í dømunum *faðir* og *fæ*, hava ætlandi verið til í málinum frá fyrndartíð, og tí nevna vit tey *arvorð*.

Tann germanska ljóðskúgvingin hevur kortini ikki rakt øll orð, ið svara til latínsk orð, sum byrja við *p*. Í nútíðar germonskum málum hava vit t.d. ein hóp av orðum, sum byrja við *pater-* ella *patr-* sum t.d. *paternalisma* og *patriarkur*. Øll hesi orð hava okkurt »faðirligt« yvir sær, og tað er ikki tilvildarligt. Hetta eru *tøkuorð* ella *innflutt orð*, sum eru avleidd av latínska (ella grikska) sniðinum *pater*.

Á samsvarandi hátt er lýsingarorðið *pekunierur* avleitt av tí latínska orðinum *pecu*. Í gamla Róm var *pecu* (= *húsdjór, stórfenaður*)

nevniliga eitt vanligt virðismál, sbr. at leysafæ á norrønum varð nevnt *liggjanda fé*, og húsdjór *ganganda fé*.

Innflutt orð kunnu vit sostatt ikki nýta til at vísa á skyldskap millum mál. Um so var, kundu vit út frá »norðurlendskum« orðum sum *sauna* og *sisu* ella *anorakkur* og *kajakk* komið til ta niðurstøðu, at norðurlendsk mál vóru skyld við finskt ella grønlendskt, men so er ikki. Tað, sum innflutt orð harafturímóti vísa, er, at beinleiðis ella umvegis samband hevur verið ímillum fólk, ið tosa gávu- og tøkumálið.

Arvorð og innflutt orð

Arvorðini í málinum hoyra helst til tað, vit rokna sum tað *miðstadda* orðfeingið, eitt nú talorð (sí omanfyri) og heiti fyri næstu skyldfólk, sbr. *faðir*, *móðir*, *systir* og *bróðir*. Men longu tá ið vit koma til eitt sindur fjarari skyldfólk, hevur meginnorðurlendskt ofta innflutt orð; sbr. *onkel*, *tante*, *nevø* og *niese*, sum øll koma úr fronskum; sbr. norðurlendsk arvorð (samansetingar) sum *farbróðir*/*morbróðir*, *fastir*/*mostir* (<*faðirs*/ *móður systir*) og *systkinabarn*.

Innflutt orð verða ofta býtt sundur í *tøkuorð* og *fremmandaorð*. Treytin fyri hesum býti er, hvussu »fremmand« tey kennast: Um eitt orð er so inngrógvið í málið, at tað bara eru málsøgufólk, sum duga at síggja ella hoyra, at orðið upprunaliga er innflutt, verður tað vanliga nevnt *tøkuorð*. Hetta er t.d. galdandi fyri meginnorðurlendsk orð, sum upprunaliga stava frá tí germanska »systurmálinum« lágtýskum – tað eru bara tey, sum kenna málsøguna, ið vita, at orð sum *prate*, *snakke* og *språk* eru lágtýsk innflutningsorð, meðan samheitini *tale*, *tunge* og *mål* eru norðurlendsk arvorð – fyri teimum, ið ikki kenna málsøguna, kundi tað eins væl verið øvut. Í Føroyum eru tey lágtýsku orðini eisini vanlig í talumálinum, men tey eru ikki so væl sædd í skrift, og á tann hátt læra vit øll eitt sindur av málsøgu.

At tey lágtýsku orðini eru so lítið fremmand kemst helst av, at tey bæði hava verið í nýtslu í meginnorðurlendskum málum rættiliga leingi – nógv tey flestu komu inn í miðøld – og at lágtýskt er eitt nærskylt germanskt systurmál. Tí skuldu heldur ikki stórar broytingar til, áðrenn tey fullu ótarnað inn – tey trý orðini omanfyri eita t.d. *praten*, *snakken* og *sprake* á lágtýskum.

Hinvegin er ein vissur fremmandur dámur yvir orðum sum *konversera* og *lingvistikkur*, sum rúma pørtum, ið vit ikki beinleiðis skilja. Arvorð og tøkuorð við meira enn tveimum stavilsum eru harafturímóti helst samansett av eindum, sum vit skilja – sbr. *sam-tala* og *mál-vísindi*. Orð sum *konversera* og *lingvistikkur* nevna mong tí *fremmandaorð*. Tann fremmandi dámurin kemur oftast av, at tey eru tikin úr fjarari málum – tey bæði seinast nevndu stava t.d. úr latíni. Men tað fremmanda kann eisini koma av, at orðini eru nýinnflutt – fesk

ensk innflutt orð sum *knowhow* og *goodwill* avdúka lættliga seg sjálv bæði í stavseting og framburði. Harafturímóti eru tað valla onnur enn málfólk sum vita, at eitt gamalt tøkuorð sum *gegl* stavar frá enskum *gaol* ella *jail* – her er tillagingin til føroyskan málbygnað fullkomin, bæði tá ið tað ræður um stavseting og framburð. Gegl má harvið greitt roknast sum tøkuorð og ikki fremmandaorð.

Meginnorðurlond: Ymisk mál ella bara málføri?

Eitt landafrøðiligt øki, har talumálið skiftir á slíkan hátt, at grannar altíð kunnu tala saman á sínum móðurmáli og soleiðis, at ongum av pørtunum nýtist serliga venjing ella upplæring til at skilja hin partin, nevnist eitt *málførahøpi* (dialektkontinuum). Niðanfyri sært tú, hvat vit hugsa okkum, at fólk úr trimum stórum meginnorðurlendskum býum høvdu svarað, um tey vórðu spurd, hvar tey búðu – her høvdu trupulleikar við at skilja ikki tikið seg upp, hóast tað ikki snýr seg um grannabýir. Gevið gætur, at stavsetingin endurgevur *framburðin*; hon vísir sostatt ikki ta vanligu stavsetingina.



Tey staðbundnu málførini í Meginnorðurlondum eru eitt slíkt málførahøpi. Ferðast vit suðureftir úr Finnmørk í Noregi gjøgnum alt Noreg, Svøríki og Danmark til Suðurjútlands ella vestureftir úr Eysturbotni í Finnlandi gjøgnum Norrland í Svøríki til vesturstrond Noregs, so eru *grannamálførini* alla tíðina til at skilja sínámillum.

Frástøðumál

Um t.d. ein bóndi frá Älvdalen í Svøríki og ein fiskimaður úr Vesturjútlandi í Danmark skuldu tosað saman hvør á sínum staðbundna málføri, høvdu stórir trupulleikar harafturímóti tikið seg upp. Av tí at älvdalsmál og vesturjútskt avgjørt ikki eru til at skilja sínámillum, kunnu tey roknast sum tvey ymisk *frástøðumál*. Hóast hetta hoyra hesi bæði talumálini kortini til sama málførahøpi, tí at einki hvast mark er ímillum einstøku bygdarmálini úr Dalarna til Vesturjútlands; tað snýr seg alla tíðina um eitt líðandi skifti.

Frástøðumál

Vilt tú hoyra, hvussu älvdalsmál og jútskt ljóða, kanst tú finna málroyndir á hesum heimasíðum:

swedia.ling.umu.se
www.statsbiblioteket.dk/dlh

Í marknaøkinum millum Svøríkis og Noregs er tað meira at siga eitt politiskt mál at avgera, um eitt málføri skal roknast sum svenskt ella norskt – á ávísum støðum er markið í roynd og veru eisini flutt í eldri tíð – t.d. vóru Jämtland og Härjedalen norskt øki fyri 1645. Harafturímóti er tað ógvuliga lætt at avgera, um ein norðmaður tosar sámiskt ella norskt, ella um ein finnlendingur tosar finskt ella svenskt. Her eru nevniliga eingi stigvís skifti, tí verður tað antin-ella.



Heldur ikki í tí týsk-danska marknaøkinum er serligur ivi um, hvat mál ið ein persónur tosar, hóast valmøguleikarnir nú kunnu vera fleiri og tann reint málsliga frástøðan er nógv minni. Her standa nevniliga trý germonsk málføri hvørt ímóti øðrum: suðurjútskt, lágtýskt og norðurfrísiskt. Harafturat eru tað nú á døgum nógv, sum tosa bæði ríkisdanskt og hátýskt í marknaøkinum. Hóast tann málsliga frástøðan her er nógv minni enn millum finskt og svenskt, eru ríkisdanskt og hátýskt heldur ikki beinanvegin til at skilja sínámillum. Í øllum hesum førum er talað um ólík frástøðumál, tí heldur ikki grannarnir skilja málið hvør hjá øðrum, um teir ikki hava lært seg tað.



Um suðurjútskt, lágtýskt og norðurfrísiskt

Tað er eingin alment viðurkendur, reglufastur skriviháttur fyri tey trý málførini. Á netstøðunum niðanfyri kanst tú lesa meira um málførini og t.d. síggja, at tað eru nógv ymisk hugskot um, hvussu framburðurin skal endurgevast. Tann frísisktalandi persónurin niðanfyri kemur sostatt úr einum býi, sum á hátýskum eitur Niebüll (sniðið Naibel er sonevnt Algemeyn Nedersaksisch Schryvwyse, t.e. »almennur lágtýskur skriviháttur«).

lágtýskt:	www.lowlands-l.net
	www.rostra.dk/platt
frísiskt:	www.lowlands-l.net
suðurjútskt:	www.dialekt.dk
	www.jyskordbog.dk



Standardmál

Higartil hava vit umrøtt tað meginnorðurlendska málførahøpið, eins og var einki annað talumál í Meginnorðurlondum enn tey staðbundnu málførini. Øll eru sjálvsagt greið um, at soleiðis er tað als ikki – heldur tvørturímóti. Í dag eru tað í roynd tey sonevndu *standardtalumálini*, sum eru við yvirlutan, ið hvussu er í Danmark og Svøríki.

Eitt standardtalumál er eitt talumál, sum er *reglufest*, t.e. at tað er siðvenja fyri, hvussu talumálið skal vera. Eitt standardtalumál er haraftrat í okkara samfeløgum tætt knýtt at einum skriftmáli. Bæði standardtalumál og skriftmál eru lutfalsliga einvorðin í einum størri øki, t.d. í einum ríki. Í báðum hesum førum skilur standardmálið seg frá málførunum, sum skifta úr staði í stað og bara eru til sum talumál. Reglurnar fyri rættari málnýtslu eru bara til í heilanum á teimum, sum tala umrødda málføri.

Vanliga hevur eitt standardtalumál nógv størri virðing enn staðbundin málføri. Hetta hevur serliga *sosialar* orsakir, við tað at bæði standardtalumálið og skriftmálið eru grundað á talumálið hjá einum politiskt og búskaparliga úrvaldum skara, oftast knýttur at høvuðsstaðnum. Men orsakað av hesi sosialu virðing tekur tann hugsan seg upp, at standardmálið er tað einasta »rætta« málið, og at málførini onkursvegna eru skeiv. Tá ið vit tala um danskt og svenskt *mál*, er tað tíðskil helst standardmálið í talu og skrift, sum hugsað verður um; donsk og svensk *málføri* eru onkursvegna nakað annað.

Í Danmark og Svøríki eru tey siðbundnu málførini tí í stórari afturgongd á flestum økjum, soleiðis at tað helst bara eru gomul fólk á bygd, sum tala mál, sum málførisgranskarar høvdu nevnt »reint málføri«. Haraftrat leggja allarflestu danir og sviar nærum sjálvkravt eitt møguligt staðbundið málføri til viks, tá ið teir tosa við fólk aðrastaðni úr landinum.

Í Noregi er støðan nakað øðrvísi. Tað kemst m.a. av, at í Noregi eru tvey skriftmál, sonevnt bókmál og nýnorskt. Hetta koma vit nærri inn á seinni. Men tann serstaka norska málstøðan vísir seg eisini við, at tey staðbundnu málførini eru munandi meira nýtt í Noregi enn í grannalondunum. Formliga vísir tolsemið við málførum í Noregi seg t.d. við, at norskum lærarum er ikki loyvt at rætta talumálið hjá næmingunum – næmingarnir hava við øðrum orðum fullgóðan rætt til at nýta sítt natúrliga talumál – eisini í tímunum, sama hvat málføri tað snýr seg um. Og hetta síggja vit í roynd og veru aftur í tí, at staðbundin málføri í Noregi kunnu eisini nýtast undir umstøðum, har ið standardtalumálið hevði verið ein sjálvfylgja í grannalondunum – t.d. tá ið fólkavald hava orðið í landsins tjóðartingi, Stórtinginum. Í munnligum fjølmiðlum sum útvarpi og sjónvarpi verða málføri ofta eisini nýtt; tey einastu, sum hava skyldu til at halda seg til bókmál ella nýnorskt, eru starvsfólk í ríkisútvarpinum NRK, tá ið tey nýta handrit, men ikki í fríum samrøðusendingum.

Málførahøpi og standardmál í germanska máløkinum

Um vit halda okkum til Evropa, finna vit hesi málførahøpi í tí germanska máløkinum:

1. megingermanskt	Eysturríki, Sveis, Týskland, Norðurbelgia og meginparturin av Niðurlondum
2. frísiskt	niðurlendski landsparturin Frísaland
3. enskt	meginparturin av Stórabretlandi
4. meginnorðurlendskt	meginparturin av Danmark, Svøríki og Noregi
5. føroyskt	Føroyar
6. íslendskt	Ísland

7. mynd: Germonsk málførahøpi í Evropa



8. mynd: Germonsk málførahøpi í Evropa

Í hvørjum málførahøpi eru upp í fýra ymisk standardmál. Á 9. mynd niðanfyri skilst, at *megingermanskt* og *meginnorðurlendskt* bara eru til sum málførahøpi, ikki sum standardmál. Í hesum báðum málførahøpum eru fleiri standardmál, men vit hava bara eitt standardmál fyri hvørt av hinum fýra (frísiskt, enskt, føroyskt og íslendskt).

1. megingermanskt	a. týskt b. niðurlendskt
2. frísiskt	
3. enskt	
4. meginnorðurlendskt	a. svenskt b. danskt c. norskt (bókmál og nýnorskt)
5. føroyskt	
6. íslendskt	

9. mynd: Germonsk standardmál í Evropa

Trý ella fimm mál?

Tá ið talað er um meginnorðurlendskt, kann tað vera ymist, um roknast skal við trimum standardmálum (donskum, norskum og svenskum) ella fýra (norskum = bókmáli og nýnorskum) ella møguliga fimm (svenskum = finnlandssvenskum og svøríkissvenskum).

Málsliga er ikki grundarlag fyri at rokna svenskt í Svøríki at víkja frá svenskum í Finnlandi, tí skriftmálið er tað sama; bæði stavseting, orðsnið og bendingar eru felags. Framburðurin er gaman í rættiliga ymiskur, men hann skiftir eisini í Svøríki; flestu meginnorðurlendingar megna uttan trupulleikar at hoyra mun á t.d. einum skáningi og einum stokkhólmbúgva, hóast báðir tosa svenskt ríkismál. Svenskt eigur sostatt at roknast sum *eitt* mál, í øllum førum í skrift, hóast tað verður brúkt í meira enn einum landi.

Við bókmáli og nýnorskum er øvut: Tey verða bæði bara brúkt í Noregi, men her eru afturímóti týðiligir munir. Hyggið bara at hesum báðum setningunum, sum merkja nett tað sama, men øll orðini eru eitt sindur ymisk í teimum báðum avbrigdunum:

– *Jeg vet ikke hva de fortalte dere* (bókmál)
– *Eg veit ikkje kva dei fortalde dykk* (nýnorskt)

Hóast hesar greiðu munir verða bókmál og nýnorskt roknað sum *eitt* mál, norskt. Í Noregi verða bókmál og nýnorskt nevnd ymisk *málsnið* av norskum, tí í grundini eru nýnorskt og bókmál ólík á fleiri økjum. Reint málsliga eru nýnorskt og bókmál sostatt ymisk, hóast bæði verða nýtt í sama landi, meðan finnlandssvenskt og »svøríkissvenskt« í roynd og veru eru tað sama (í øllum førum í skrift), hóast tey verða nýtt hvørt í sínum landi.

Hví bókmál og nýnorskt?

Orsøkin til, at tað í Noregi eru tvey málsnið, meðan tað er nóg mikið við bara einum málsniði í donskum og svenskum, er søgulig og politisk. Bókmál er søguliga sæð ein norskað útgáva av tí danska skriftmáli, sum varð brúkt í Noregi í tí tíðini, tá ið landið var í politiskum samveldi við Danmark (frá uml. 1400 til 1814).

Nýnorskt er harafturímóti eitt nýtt skriftmál, sum varð grundað uml. 1850 við støði í norskum bygdarmálum, sum ein innlendskur valmøguleiki til danskt. Maðurin, sum skapaði hetta nýggja skriftmálið eftir at hava ferðast um meginpartin av Noregi og kannað »almúgumálið«, sum tað oftast varð nevnt tá, var sjálvlærdi úrmælingurin og málgranskarin *Ivar Aasen* (1813-1896). Bókmál er tí ógvuliga líkt donskum – í skrift, ikki í framburði! – meðan nýnorskt hevur ávís drøg í felag við føroyskt og íslendskt. Føroyar og Ísland vórðu nevniliga í sínari tíð – t.e. fyri umleið túsund árum síðan – bygd av fólki, sum fyri tað mesta kom av Vesturlandinum í Noregi, og nýnorskt líkist tí nógv mest málførunum á Vesturlandinum. Í hesum parti av landinum er nýnorskt eisini tað skrivliga høvuðsmálið í skúlunum á bygd, meðan bókmál er høvuðsmál í býunum á Vesturlandinum og í stórum um alt Noreg annars.

Nútíðar norðurlendsk mál

Um vit taka støði í teimum standardmálum, sum eru í norðurlendskum, fáa vit til samans fimm ella seks: fimm, um »norskt« verður roknað sum eitt mál, og seks, um tey bæði norsku málsniðini (bókmál og nýnorskt) hvørt sær skulu roknast sum eitt egið mál. Um vit harafturímóti rokna norskt sum eitt mál og nýta sínámillum fatan sum flokkingargrundarlag, hevði tað verið natúrligt at bólkað nútíðar norðurlendsk mál á henda hátt:



10. mynd: Flokking av norðurlendskum málum grundað á sínámillum fatan

Hetta »træið« avmyndar m.a., at skilnaðurin millum meginnorðurlendskt øðrumegin og útnorðurlendskt hinumegin er høvuðsmarkið nú á døgum. Útnorðurlendskt og meginnorðurlendskt eru nevniliga í stórum sínámillum fatandi, bæði munnliga og skrivliga. Útnorðurlendsku málini, íslendskt og føroyskt, kunnu sínumegin kanska roknast sum sínámillum fatandi í skrift, men neyvan í talu, hóast føroyingar skilja íslendskt betur, enn íslendingar skilja føroyskt. Mótsett hesum hava vit so tey meginnorðurlendsku málini, sum fyri ein góðan part eru til at fata sínámillum bæði í skrift og talu.

Haraftrat vísir strikumyndin, at munurin millum danskt øðrumegin og norskt/svenskt (=skandinaviskt) hinumegin er størri enn sínámillum munurin millum norskt og svenskt. Tað er týdningarmikið at vera greiður um, at strikumyndin í hesum føri fyrst av øllum vísir støðuna í *talumálinum*, tí tað er fyrst og fremst tann frábregðandi danski framburðurin, sum skapar henda munin. Um vit ganga eftir *skriftmyndini*, líkist norskt bókmál nevniliga munandi meira donskum enn svenskum. Norskur *framburður* hevur haraftrurímóti altíð líkst nógv meira svenskum enn donskum.

Nógv einfaldað kunnu vit harvið siga, at norðmenn orsakað av landafrøðini hava tað mesta av *framburðinum* í felag við sviar. Teir eru jú næstu grannar á skandinavisku hálvoynni. Orsakað av søguni (politiskum samveldi og felags skriftmáli í meira enn fýra hundrað ár) hava teir harafturímóti ein stóran part av *orðfeinginum* og *stavsetingini* í felag við danir.

Ættarmyndilin eina ferð enn

Sum vit hava sæð fyrr, sær ættarmyndilin – t.e. flokkingin av teimum norðurlendsku málunum eftir arvafrøðiligum skyldskapi (5. mynd) – heilt øðrvísi út enn tað býtið eftir sínámillum fatan millum nútíðar málini, sum varð lagt fram í undanfarna parti (10. mynd). Her er hann aftur:



5. mynd (endurtikin): Flokking av norðurlendskum málum eftir ættarmyndlinum

At ættarmyndilin ikki altíð gevur líka »rímilig« úrslit – á tann hátt, at tað kunnu vera mótsetningar millum, hvussu ymisk mál verða upplivað og skyldskapin millum tey í málsøguligari fatan – er nakað, sum leingi hevur verið vitað. Longu við lok 19. aldar setti týskarin *Johannes Schmidt* (1843-1901) fram sum valmøguleika til ættartræið tann sonevnda *aldumyndilin*. Hann nýtir sum grundarlag eina mynd av aldum, sum breiða seg sum ringar á vatni, tá ið ein steinur verður tveittur útí.

Aldurørslan umboðar tá eina málsliga broyting – eina nýgerð – sum breiðir seg gjøgnum eitt málsamfelag. Tá ið ymsir steinar enda ymsastaðni í vatninum, mynda aldurnar so hvørt eitt fløkt mynstur av ringum, sum umskarast ymsar vegir.

11. mynd: Yvirlitskend framseting av aldumyndlinum

Aldumyndilin sýnist hollari sum mynd av, hvussu málbroytingar breiða seg, við tað at málføramørk ikki eru støðug, men ofta kunnu vísa seg upp á ymsar mátar ymisk tíðarskeið. Tað er nú heldur ikki so løgið. Málførakortið endurspeglar nevniliga í stóran mun samskiftismynstrið í einum øki. Tað merkir, at fólk, sum eru nógv saman, tosa lutfalsliga eins, meðan fólk, sum sjáldan ella ongantíð hittast, fara at tosa ymist, tá ið nøkur ættarlið eru farin. Um samskiftismynstrini broytast við tíðini, t.d. av búskaparligum broytingum ella politiskum, so fer málførakortið eisini so við og við at fáa dám av hesum, við tað at gomul mørk flyta seg, ella at nýggj mørk taka seg upp.



12. mynd: Tríggir meginnorðurlendskir framburðarmunir avmyndaðir við aldumyndlinum

Tjúkk-l

Tjúkk-*l* merkir *l*-ið, sum t.d. fólk í Eysturnoregi og Norðursvøríki hava í orðum sum *dal* og *sol* og ofta eisini fyri *rd* í orðum sum *bord* og *jord*.

Hetta er eitt ljóð, sum fólk, ið ikki eru uppvaksin við tí, hava stórar trupulleikar at fáa fram, um tey royna, og soleiðis hevur vist altíð verið. Svenski málmaðurin Samuel Columbus helt upp á, at tað fanst »ett tiockt *ell* i Svenskan«, sum eingin fremmandur kundi bera fram.

Málvísindaliga verður hetta ljóð lýst sum ein sonevndur *klaffur*; tað merkir, at tungan verður bend afturyvir í munninum og síðan slongd framyvir, soleiðis at hon slær ímóti gómanum á vegnum. Hetta er lætt hjá teimum, ið eru von við hetta frá barnsbeini, men heldur enn ikki tvørligt hjá teimum, ið royna hetta fyri fyrstu ferð sum vaksin. Tjúkk-*l* er í grundini eitt rættiliga sjáldsamt fyribrigdi í Evropa, tí tað er bert til í pørtum av norskum og svenskum máløki (finnlandssvenskum íroknaðum). Í India eru harafturímóti fleiri mál, ið hava hetta ljóðið, so í heimshøpi er hetta valla nakað serstakt.

Hjáljóðaviknan

Hjáljóðaviknan merkir, at orð sum *bróta, krúpa* og *rúka* verða framborin sum *bróda, krúba, rúga* o.s.fr., nevniliga at *p, t* og *k* inni í orði og í útljóði verða til *b, d* og *g*. Hetta er ein framburðarbroyting, sum er byrjað í Danmark; í gomlum donskum vóru eisini *p, t* og *k*, sum framvegis eru vanlig í norðurlendskum. Men í Danmark er henda viknanin farin nógv longri enn í Suðurnoregi, Suðursvøríki og í pørtum av Føroyum og Íslandi, har hon tó merkist: Í fleiri donskum málførum eru hjáljóðini í grundini fallin fullkomiliga burtur, (*brye/bryð, kryw, ryy*), og eisini í ríkisdonskum er broytingin farin nógv longri enn í hinum Norðurlondunum. Hetta er uttan iva grundin til, at aðrir norðurlendingar halda, at danir tosa so ótýðiliga.

Skarr-r

Skarr-*r* er *r*'ið, sum verður nýtt eitt nú í donskum og suðursvenskum mótsett brodd-*r*'inum sum føroyingar, íslendingar og flestu norðmenn og sviar nýta. Munurin millum nevndu *r* liggur í, hvør

partur av tunguni rørir seg mest. Í brodd-*r*'i er tað, sum navnið sigur, tungubroddurin ella framparturin av tunguni, ið titrar móti gómanum, men skarr-*r*'ið verður borið fram við at hevja aftara partin av tunguni upp undir sonevnda bleyta góman, t.e. aftasta partin av himlinum, soleiðis at tungan titrar ella treingir at aftur-gómanum ella úlvinum.

Av nevndu trimum frávikum eru bæði tjúkk-*l* og mjúk hjáljóð gomul fyribrigdi, sum kunnu vera íkomin fyri fleiri enn túsund árum síðani. Tjúkk-*l*'ið er óivað vorðið til miðskeiðis á skandinavisku hálvoynni, men tey mjúku hjáljóðini eru sum sagt runnin úr donskum. Tjúkk-*l*'ið hevur sostatt bert breitt seg um land. Breiðslumynstrið hjá mjúku sjálvljóðunum ber tó týðiliga boð um sjóvegis samband. Mørkini fyri bæði tjúkk-*l* og mjúk sjálvljóð hava hugsandi fest seg fyri fleiri hundrað árum síðani.

Skarr-*r* er ivaleyst eitt nógv nýggjari fyribrigdi. Fyri seinnu helvt av 18. øld vóru neyvan onnur, ið skarraðu í Norðurlondum, enn einstaklingar við talubreki. Men tvær tær næstu øldirnar breiddi skarr-*r*'ið seg til alt økið, sum er víst á kortinum (12. mynd), og á vesturlandinum í Noregi breiðir tað seg framvegis. Keldan til skarr-*r*'ið í Evropa er óivað París, har tað er uppkomið síðst í 17. øld; til Norðurlanda kom tað ivaleyst fyrst til Danmarkar, og breiddi tað seg síðan til stórar býir sum Malmø, Bergen, Stavanger og Kristiansand.

Meir og minni hugfloygdar frágreiðingar frá upphavinum at skarr-r'inum.

Mangar stuttligar hugmyndir eru um skarr-r'ið, men tíverri eru tær neyvan rættar. Ein væl umtókt frágreiðing er, at upphavið er ein franskur kongur, ið hevði skarr-r sum talubrek, og hóvið tók eftir konginum fyri at tekkjast honum. Tað, ið virkar ósannlíkt við hesi hugsan, er, at eitt talubrek hjá einum einstaklingi kann ávirka so nógv, sama hvussu kongaligur upphavsmaðurin er. Var tað haraftrat øllum greitt – eisini høvuðspersóninum – at tað snúði seg um persónligt talubrek, hevði tað í grundini verið ógvuliga vágið at eftirapa tí; hetta kundi lættliga verið skilt sum herming heldur enn málsligur samhugi.

Danski málmaðurin Otto Jespersen hevur eina heilt aðra frágreiðing. Hann hugsar sær gongdina soleiðis, at meðan fólk yvirhøvur vóru uttandura úti á

bygdunum, kundu ljóðini lætt kódna í vindi og fossaduni, og tí noyddust tey at nýta ramlig brodd-*r* fyri at hoyra hvør annan. Men í býunum liva fólk fyri tað mesta innandura, og tá eru ikki áneyðir fyri einum so strævnum ljóði longur:

[L]ivet inden døre medfører i det hele sagte talen, man buldrer ikke så meget på, dels fordi det er overflødigt, dels fordi det kan være uforsigtigt ('væggene har øren'); jo mere raffineret stuelivet er, med tæpper på gulvet og portierer på dørene, des mere afdæmpet blir også sproget.

Tann rætta frágreiðingin frá upphavinum er óivað at finna í onkrum púra vanligum málsligum tillagingum í parísarfronskum í 17. øld og hevur sostatt einki at gera við talubrek ella hóvligan býarlívsstíl. Tann skjóta útbreiðslan til aðrar partar av Evropa, í fyrsta umfari serliga til býir, kann tó lutvíst koma av, at skarr-*r*'ið í grundini er lættari at bera fram enn brodd-*r*'ið. Tá ið skarr-*r*'ið fyrst hevði fingið støðu sum viðurkendur *r*-framburður, av tí at tað hevði fingið rúm í tí hávirda parísarmálinum, lá vegurin greiður fyri eini skjótari herferð gjøgnum stórar partar av Vestur- og Norðurevropa.

Aldumyndilin sýnir týðiliga, hvussu broytingar kunnu henda ymsastaðni í einum málførisøki og hvussu samskiftismynstrið kann ávirka framhaldandi útbreiðsluna av fyribrigdum.

Ættarmyndilin fær tó alt at tykjast at vera so, at ein greining eitt ávíst tíðarskeið hevur avleiðingar fyri allar greiningar seinni – greinarnar á trænum kunnu nevniliga ikki vaksa saman aftur seinni, nei ikki so frægt sum nærkast hvør aðrari. Tað er hesin grundleggjandi munurin, sum ger ættarmyndilin ónýtiligan, um vit vilja, at myndilin skal endurspegla veruliga munin og líkskapin millum nútíðar norðurlendsku málini. Hvussu hesir báðir myndlar kunnu fylla hvør annan út, koma vit aftur til seinni.

Søgulig flokking av norðurlandamálum eftir aldumyndlinum

Frá frumnorrønum til víkingatíð

Málið í Norðurlondum fyri uml. ár 700 verður nevnt *frumnorrønt*. Um málføramunur var tá í tíðini, hevur hann rímiligt verið lítil, og vit kenna í hvussu er eingi nútíðar málføramørk, sum vit við vissu kunnu føra aftur til ta tíðina.

Frumnorrønt er frálíkt øllum stigum seinni í norrønum, og verður t.d. hugt at gongdini í mansnøvnunum, er týðiligt, at næstu 300-400 árini hendu stórar broytingar. Long og prýðilig nøvn sum *AnulaibaR og HarjawaldaR* verða um ár 1000 framborin sum *Óláfr og Haraldr*, sum á nútíðar norskum eru *Olav og Harald* og á okkara máli *Ólavur og Haraldur*.

Um hesa tíðina mugu vit tí rokna við, at málsliga frástøðan til frumnorrønt er so stór, at málini vóru sínámillum óskiljandi. Hevði tað óhugsandi hent, at ein norðbúgvi úr 6. øld kom undan kavi millum víkingarnar fýra-fimm hundrað ár seinni, er rættiliga sannlíkt, at teir høvdu als ikki skilt hvør annan. Harafturímóti høvdu vit nú á døgum møguliga kunnað tosað rímiliga lættliga við fólk, sum livdu í 16. øld. Tað hevði tó verið treytað av, at vit hildu okkum til evni, sum báðir partar høvdu fortreytir fyri at hava eina hugsan um. Málbroytingarnar frá 500-1000 vóru tískil væl størri enn frá 1500-2000.

Rúnaristurnar

Keldurnar til kunnleika um frumnorrøna málið eru innskriftir í bein, málm og stein, ristar við serligum teknum, ið vit kalla *rúnir*. Gitnasta av øllum frumnorrønum rúnaristum varð funnin á einum gullhorni á Jútlandi í Danmark í 18. øld. Hon ljóðar soleiðis: *ek HlevagastiR holtijaR horna tawido*, sum er týdd: *eg Lægestur holtingi gjørdi hornið*.

Elstu rúnaristurnar eru frá uml. ár 200. Tær sonevndu eldru rúnirnar, eisini nevndar *futhark* eftir ljóðvirðunum í fyrstu seks teknunum, síggja soleiðis út:



f u þ a r k g w h n i j p ë R s t b e m l ŋ d o

13. mynd: Eldra rúnaraðið

Sum vit síggja, eru í alt 24 tekn; nøkur teirra eru at kalla fullkomin til frumnorrønu ljóðskipanina. Í nøkrum rúnum er ljóðvirðið óvist, men vit síggja, at flestu stavir líkjast rættiliga nógv latínsku bókstavunum, sum nú verða brúktir, og í teimum førunum kunnu vit í hvussu er vera vís í, at framburðurin svarar til tann, vit kenna frá øðrum málum, ið nýta hetta stavraðið. Hesin líkskapur vísir, at tann ella tey, ið skaptu rúnirnar, kendu til eitt ella fleiri av stavrøðunum í Miðjarðarhavslondunum. Sjálvt *skapið* á teknunum – beinar linjur, loddrætt ella á skák – bendir á, at tey hava verið ætlað til at skera í træ við knívi. Við slíkum tilfari og amboðum hevur tað ikki verið skilagott at nýta tekn við bugum og vatnrøttum strikum. Úr frumnorrønari tíð er tó ikki varðveitt ein einasta innskrift í træ, óivað tí træ er ikki varandi evni. Allar varðveittar frumnorrønar innskriftir eru tí ristar í stein, málm ella bein.

Um ár 700 verður gamla rúnaraðið einfaldað við at fækka teknini úr 24 niður í 16. Tað tvørsagda í tí er tó, at um somu tíð verða ljóðini fleiri, so í grundini varð brúk fyri fleiri ljóðum heldur enn færri, um hvørt ljóð skuldi hava sítt tekn. Hví hetta hendi, vita vit ikki, men tað man hava okkurt at gera við tær stóru málbroytingarnar um hesa tíðina. Kanska var tankin, at nú ið 24 tekn kortini ikki eru nóg mikið til at endurgeva ljóðini í málinum, hevur tað ikki so nógv at siga, um ikki hvørt ljóð hevur sítt tekn. Merkingin skilst í øllum førum á samanheinginum.

Rúnirnar fingu ikki mønustingin av, at tær gjørdust færri, hóast rúnaraðið eftir ár 1000 eisini mátti kappast við latínska stavraðið – tvørturímóti vóru tær í nýtslu fleiri hundrað ár eftir, at latínska stavraðið tók við í kjalarvørrinum á kristindóminum, sum kom higar um 1000-áraskiftið. Orsøkin var óivað tann, at rúnirnar á mangan hátt vóru lættari at brúka – ikki vóru bara teknini færri at halda skil á, men serliga var skrivikynstrið einfaldari – ein knívur og eitt træsprek vóru nóg mikið, um onkur skuldi krutla eini stutt boð niður, men til latínsku stavirnar skuldu bæði fjøðurpennur, blekk og kálvskinn.

Tá ið rúnirnar at enda fullu fyri teimum latínsku stavunum í 15. øld, høvdu tær verið í nýtslu í nærum 1500 ár, t.e. hálvaaðru ferð so leingi, sum stavraðið vit nú nýta.

ᚠᚢᚦᚭᚱᚲ ᚼᚾᛁᛅᛋ ᛏᛒᛘᛚᛦ

f u þ ã r k h n i a s t b m l R

14. mynd: Yngra rúnaraðið

Eysturnorrønt og vesturnorrønt

Elstu málføramunir, ið vit kenna í norrønum, eru ein skilnaður millum eystur- og vesturnorrønt í 8. og 9. øld. Men framvegis var talan um *eitt* norðurlendskt málførahøpi: Øll, sum talaðu norrønt mál, búðu nevniliga framvegis bara í Noregi, Svøríki og Danmark ella vóru nýliga farin haðani og høvdu nomið land í oyggjunum vesturi í Atlantshavi, Bretlandi, Normandínum, Russlandi o.s.fr.

Norðurlendsk mál verða ofta nevnd *skandinavisk* mál. Skandinavia er upprunaliga latínska heitið fyri Skána, ið er suðurendin á Svøríki. Seinni hevur navnið fingið víðari merking. Í okkara føri

fara vit at nýta heitið skandinaviskt um norskt og svenskt, sum umboða skandinavisku hálvoynna. Sum felagsheiti fyri danskt, norskt og svenskt fara vit at nýta »meginnorðurlendskt«.

Málføramunurin var um hesa tíðina so lítil, at hann hevði lítlan og ongan týdning. Bæði norðurlendingar sjálvir og onnur fataðu norrønt sum *eitt* mál, og vanliga varð tað nevnt *dǫnsk tunga*. Hví tað júst vóru danir, ið komu at bera kannuna av málinum í øllum Norðurlondum, er ikki heilt greitt, men ein møguleiki er, at máliskan er komin upp í Onglandi, har danir ráddu í víkingatíðini. Síðani er heitið *dǫnsk tunga* víðkað til at merkja øll tey norðurlendsku málini, sjálvt um tað ikki var danskt í trongari merking; men fyri tann, ið stóð uttanfyri, mundi alt ljóða sum eitt mál.

Eftir 700 koma so við og við ymisk frávik til sjóndar eftir einum slíkum mynstri, at tað av røttum ber til at tosa um eina eystur- og eina vesturgrein av norrønum.

vesturnorrønt	**eysturnorrønt**
íslendskt, føroyskt, norskt	svenskt, danskt

15. mynd a: Flokking av norrønum málum uml. 700 til 1200

Vesturnorrønt er í hesum tíðarskeiði í høvuðsheitum norskt – eftir landnámið í Føroyum og Íslandi (t.e. í endanum á 9. øld) telja føroyskt og íslendskt eisini við. Tað eru fyri tað mesta fólk úr Noregi, serliga av Vesturlandinum, ið seta seg niður í hesum londum. Hetta sermerkir málið enn dagin í dag.

Eysturnorrønt er hini norrønu málini, nevniliga danskt og svenskt.

Tað ber til at fylgja fleiri munum millum nútíðar norðurlendsk mál aftur til nevnda tíðarskeið, t.e. til tann elsta málføraskilnaðin í eystur- og vesturnorrønt. Sum dømini niðanfyri vísa, ganga íslendskt, føroyskt og nýnorskt í slíkum førum saman ímóti donskum og svenskum. Norskt bókmál fylgir rímiligt donskum fyri ein part, men ikki í øllum.

íslendskt	*– Ég veit að hann kemur heim*
føroyskt	*– Eg veit at hann kemur heim*
nýnorskt	*– Eg veit at han kjem heim*
danskt	*– Jeg ved at han kommer hjem*
svenskt	*– Jag vet att han kommer hem*
norskt bókmál	*– Jeg vet/veit at han kommer hjem/heim*

16. mynd: Dømi um mun á vestur- og eysturnorrønum í nútíðar norðurlendskum málum

Her eru nakrir av týðandi mununum, sum vit kunnu fylgja aftur til greiningina í vestur- og eysturnorrønt:

1. fyrstapersónsfornavnið við ella uttan *j* (*ég/eg* : *jeg/jag*)
2. sagnorðið *koma* í nútíð við ella uttan umljóð (*kemur, kjem*: *kommer*)
3. og síðst, men ikki minst, tvíljóð (diftongur, *ei*) ella einljóð (monoftongur, *e*) í orðunum *veit: vet* og *heim : hem/hjem.*

Samanumtikið var munurin kortini lítil millum tey norðurlendsku málini fram til víkingatíðina. Hetta verður víst við at seta eina einstaka striku sum mark á 15. mynd a.

Í hámiðøld: Norðurnorrønt og suðurnorrønt

Eftir uml. 1200 er greitt, at avgerandi markið – sett við tveimum strikum á 15. mynd b niðanfyri – nú gongur millum danskt, sum vit sostatt kunnu kalla suðurnorrønt, og restina av norðurlendska økinum, sum vit kalla norðurnorrønt. At avgerandi markið nú gongur øðrvísi, kemur ætlandi av eini samfelagsbroyting. Møguliga gjørdist sambandið millum Danmark og Týskland tættari, enn tað hevði verið, meðan hini Norðurlondini fyribils ikki vórðu so nógv ávirkað uttaneftir.

norðurnorrønt				**suðurnorrønt**
íslendskt	føroyskt	norskt	svenskt	danskt

15. mynd b: Flokking av norðurlendskum málum uml. 1200-1600

Donsku broytingarnar eru fyri ein part slíkar, sum seinni eisini vísa seg í norskum og svenskum – serliga at bendingarnar verða einfaldari; sí brotið niðanfyri. Men serdanskar broytingar eru eisini, fyri ein part sonevnda *sjálvljóðaviknanin*, sum rakar sjálvljóð í endingastavilsum:

- danskt hevur bert eitt sjálvljóð í skrivligum endingum, nevniliga *e*. Tað sama er í stórum galdandi fyri norskt bókmál.
- nýnorskt og svenskt hava haraftrat ofta *a* og í ávísum førum eisini *o*.
- íslendskt og føroyskt hava *a* í at kalla somu førum, sum svenskt og nýnorskt, men *i* og *u* fyri *e* og *o*.

Fyri at lýsa hetta nýta vit navnorðini *bakkar*, *synir* og *vísur* í fleirtali og sagnorðini *kastar* og *kennir* í nútíð:

íslendskt	bakkar	synir	vísur	kastar	kennir
føroyskt	bakkar	synir	vísur	kastar	kennir
nýnorskt	bakkar	søner	viser/visor	kastar	kjenner
svenskt	backar	söner	visor	kastar	känner
norskt bókmál	bakker	sønner	viser	kaster	kjenner
danskt	bakker	sønner	viser	kaster	kender

17. mynd: Dømi um viknað sjálvljóð: Munur millum norðurnorðurlensk og suðurnorðurlendsk endastavilsi

Í hesum tíðarskeiðinum henda nógvar aðrar broytingar í donskum, sum bert í heilt lítlan mun breiða seg til hini Norðurlondini. Hetta er m.a. galdandi fyri áðurnevndu mjúku hjáljóðini, t.e. skiftið frá *p, t* og *k* til *b, d* og *g* eftir sjálvljóð. Dømi um hetta eru danskt *gabe, bide* og *kage* móti norskum bókmáli *gape, bite* og *kake* og svenskum *gapa, bita* og *kaka*. Hetta skifti er eisini í málførunum í Suður- og Vestursvøríki og á útsynningsstrondini í Noregi, sí mynd 12 b. Tað løgna er, at sama gongd er eisini í syðra parti av bæði Íslandi og Føroyum og kundi vakt mistanka um, at mjúk hjáljóð eru eitt suðurlandsfyribrigdi, men av tí at Føroyar, Ísland og Meginnorðurlond eru so langt hvørt frá øðrum, mugu vit rokna við eini sjálvstøðugari gongd í hvørjum landi sær uttan sínámillum samband.

Men danskt fær eisini aðrar ljóðbroytingar, sum ikki koma fram í skrift, t.d. sokallaða *stoytin*, sum á svenskum og norskum verður til *tónaeind* ella *tonem* í staðin. Tað síggja vit, um vit bera framburðin av norskum og svenskum saman við danskt:

- *Tónaeind 1* á svenskum og norskum, *stoytur* á donskum: *bønder* (danskt og norskt: 'bøndur'); *anden* (svenskt: '*dunnan*')
- *Tónaeind 2* á norskum og svenskum, *ikki stoyt* á donskum *bønner* (danskt og norskt: 'bønir'); *anden* (svenskt: '*dunnurnar*')
- Íslendskt og føroyskt hava hvørki tónaeind ella stoyt.

Tónaeind

Tónaeind merkir merkingarskiljandi tónalag. Í *stoyti* verða málbondini hinvegin nærum afturlatin, t.e. at luftstreymurin verður nærum steðgaður í barkakílinum, og so verður knappliga latið uppaftur. Bæði tónaeind og stoytur eru tískil annað enn einstøk málljóð – eitt einstakt sjálvljóð ella hjáljóð – og tað er heldur ikki tað sama sum *herðing*, tí omanfyrinevndu dømi hava øll herðing á fyrsta stavilsi, mótvegis orðum sum *hotell* og *idé*, sum hava herðing á seinna stavilsi.

Tónaeind er heldur sjáldsamt fyribrigdi í Evropa. Í Vesturevropa er tað bert í norskum og svenskum. Hinvegin er tónaeind rættiliga vanlig aðrastaðni í heiminum, t.d. í Afrika og Eysturasia. Heimsins størsta mál – mandarinkinesiskt – hevur t.d. fýra ymiskar tónaeindir.

Tónaeindirnar í norskum eru ætlandi um túsund ára gamlar. Vanliga hugsanin er, at danski stoyturin er runnin av eini eldri skipan við tónaeindum sum í norskum og svenskum. Nær ið stoyturin hevur vunnið fram í Danmark, er ikki lætt at vita, tí hann sæst ikki í skrift, men alt bendir á, at hann kemur í miðøld. Tann einasta kenda skrivliga ábendingin um, at danskt hevði fingið stoyt, stavar frá 1510, tá ið svenski biskupurin Hemming Gadh í eini ódanskari talu heldur spotskur lýsir danskan framburð soleiðis:

Der til så wårdas de icke heller tala som annat folck, uthan tryckia ordhen fram, lika so the willia hosta (= harafturat tíma teir ikki at tala sum annað fólk, uttan kroysta orðini fram, sum vildu teir hosta).

Sum vit síggja á 15. mynd b, er einki markaskil ímillum norskt og tey bæði útfaramálini íslendskt og føroyskt. Hetta er í grundini ikki heilt rætt, tí vit vita, at smávegis munur var á norskum og íslendskum longu fyri ár 1200. Men í 13. og eisini 14. øld var munurin óivað minni enn gloppið millum ymisku málbrigdini í Meginnorðurlondum.

Nýggjari tíð: Útnorðurlendskt og meginnorðurlendskt

Tá ið vit nærkast 1500, verður myndin tó øðrvísi. Nú verður høvuðsmarkaskilið millum tey trý málini íslendskt, føroyskt og norskt. Sjálvsagt henda so stórar broytingar ikki eftir einari nátt, men tær koma so við og við í langa tíð.

15. mynd c: Flokking av norðurlendskum málum eftir uml. 1500

Orsøkin til, at vit nú fáa eitt heilt annað býti, er, at vit nú í samskiftinum av álvara merkja avleiðingarnar av, at so langt er ímillum oyggjasamfeløgini í Atlantshavinum og meginlandið. Rætt er tað, at nakað av samskifti framvegis er við ættarlandið Noreg tær fyrstu øldirnar eftir landnámið, men eftir uml. 1300 verður tað minni og minni og seinni fer alt samskifti við umheimin um Danmark, tí at Noreg og Danmark gingu saman um ein kong, sum kom at sita í Keypmannahavn. Samskiftið við umheimin gekk nú fyri tað mesta um danskar embætis- og handilsmenn, sum ikki vóru so nógvir í tali og komu ikki so nógv í samband við almenningin.

Talumálið í Meginnorðurlondum broytist nógv í seinmiðøld; tó veksur munurin millum málini sínámillum ikki nevnivert. Broytingarnar í útnorðurmálunum, serliga íslendskum, eru nógv minni. Íslendskt er tað fornasta av øllum germonskum málum.

Úrslitið av hesum er, at málskilnaðurin millum føroyskt, íslendskt og meginnorðurlendskt, sum landafrøðiliga eru fjart hvørt frá øðrum, verður munandi týðiligari enn nøkur undanfarin norðurlendsk málføraklovning. Avgerandi markið er nú ímillum *útnorðurlendskt* og *meginnorðurlendskt*, sett við fýra strikum, og tínæst millum íslendskt og føroyskt, sett við trimum strikum. Málsligi munurin millum tey trý økini, Ísland, Føroyar og Meginnorðurlond er nú so stórur, at málini ikki eru til at skilja sínámillum longur. Hetta er í hvussu er galdandi fyri báðar breddarnar, t.e. Ísland og Meginnorðurlond. Vit føroyingar, sum bæði málsliga og landafrøðiliga eru í miðjuni, skilja eitt sindur av íslendskum, og meginnorðurlendskt skilja vit í at kalla øllum brigdum, fyrst og fremst tí at vit læra danskt, men føroyski framburðurin liggur nærri norskum og svenskum. Vit hava tí tær bestu fortreytirnar fyri at skilja hini norðurlendsku málini.

Evnini hjá føroyingum og íslendingum at skilja hvør annan eru mest annan vegin. Íslendingar skilja lítið og einki av føroyskum. Sum vit áður hava verið inni á, kann hetta m.a. hava samband við, at føroyska máløkið er so mikið minni enn tað íslendska.

Í Meginnorðurlondum ber framvegis til at skilja málið hvør hjá øðrum, á sama hátt sum allir norðurlendingar áður vóru førir fyri. Hetta evni koma við aftur til seinni.

Hví eru meginnorðurlendskt og útnorðurlendskt fjarstøðumál?

Útmálini, serliga íslendskt, eru sum nevnt fornari enn meginmálini. Føroyskt er á mangan hátt eitt millummál. Tað kemur týðiliga til sjóndar, um vit bera tey trý máløkini saman.

Ymisk bending

Í miðøld – og fyrr enn tað – fingu navnorð, lýsingarorð og fornøvn ymiskt snið, alt eftir hvussu tey vórðu nýtt í setninginum – sum grundliður, ávirki ella eftir ymsar fyrisetingar o.s.fr. Í norðurlendskum og øðrum germonskum málum vóru fýra slík føll – *hvørfall* (hvrf.), *hvønnfall* (hvnf.), *hvørjumfall* (hvmf.) og *hvørsfall* (hvrsf.). Øll hesi føll eru framvegis í íslendskum – og týskum, sum eisini hevur varðveitt nógvar fornar bendingar. Føroyskt hevur at kalla mist hvørsfallið, og í meginnorðurlendskum er øll fallbending burtur í navnorðum. Her síggja vit, hvussu tað tekur seg út í teimum

Viðmerkingar um hvørsfall

Mong meina, at hvørsfallið framvegis er til sum fall í nútíðar meginnorðurlendskum sum kenda s-endingin í eitt nú »Gunnars hest« – á norrønum hevði tað itið »Gunnars hestr« ella »hestr Gunnars.« Men tað s-ið háttar sær heldur sum eitt sjálvstøðugt orð, enn sum ein ending á sjálvum grundliðinum, tí um tað er hesturin hjá Gunnari á Líðarenda, verður á meginnorðurlendskum sagt »Gunnar på Lidarendes hest.« Her síggja vit, at s-ið knýtir seg til allan orðabólkin *Gunnar á Líðarenda*.

Haraftrat er tað bara sum ognarhvørsfall, at Meginnorðurlond kunnu brúka s-ending. Í flestum øðrum orðingum (t.d. eftir ávísar fyrisetingar) er hvørsfallið ikki í nýtslu longur, t.d. *til byen* ikki *til bys*. Tó er sumt varðveitt í føstum orðingum sum *til lands, til fots* o.s.fr. Á føroyskum er hvørsfallið bert varðveitt í føstum orðingum og í samansetingum. Í dæminum um Gunnar á Líðarenda noyðast vit at nýta hvørjumfall við fyriseting (hjá Gunnari á Líðarenda).

ymisku málunum; fyri at lýsa ymsu fallbendingarnar í føroyskum og íslendskum hava vit tikið fram eina fyriseting, ið tekur viðkomandi føll at sær:

	meginnorður-lendskt – norskt	**føroyskt**	**íslendskt**
eintal			
	hest	hestur (hvrf.)	hestur (hvrf.)
	om hest	um hest (hvnf.)	um hest (hvnf.)
	fra hest	frá hesti (hvmf.)	frá hesti (hvmf.)
	til hest	til hest (hvnf.)	til hests (hvrsf.)
fleirtal			
	hester	hestar (hvrf.)	hestar (hvrf.)
	om hester	um hestar (hvnf.)	um hesta (hvnf.)
	fra hester	frá hestum (hvmf.)	frá hestum (hvmf.)
	til hester	til hestar (hvnf.)	til hesta (hvrsf.)

18. mynd: Fallbendingar í meginnorðurlendskum, føroyskum og íslendskum

Í meginnorðurlendskum er tó framvegis farvegur eftir fallbending í fornøvnum, t.d. *jeg ser deg* : *du ser meg*, har ið *jeg/meg* og *du/deg*

eru ávikavist grundliður og ávirki. Hetta er ein leivd av hvør- og hvørjumfalli.

Í norrønum – og enn í útnorðurlendskum – verður ikki bara skilt ímillum málsligu kynini í eintali, men eisini í fleirtali. Fornøvnini hava trý ymisk snið í triðja persóni, alt eftir um tey vísa til kallkyn, kvennkyn ella hvørkikyn. Hetta er lýst í talvuni niðanfyri.

	meginnorður-lendskt – norskt	**føroyskt**	**íslendskt**
kallkyn	guttene: *de*	dreingirnir: *teir*	strákarnir: *þeir*
kvennkyn	jentene: *de*	genturnar: *tær*	stelpurnar: *þær*
hvørkikyn	guttene og jentene: *de*	dreingirnir og genturnar: *tey*	strákarnir og stelpurnar: *þau*

19. mynd: fornøvn í 3. persóni í fleirtali

Í norrønum hevði sagnorðið ymiskt snið, alt eftir um grundliðurin stóð í eintali ella fleirtali, ella um hann var eitt fornavn í 1. ella 2. persóni; sí enskt *the boy comes : the boys come* og *I am : you are*. Íslendskt hevur varðveitt bæði tal- og persónbending, føroyskt hevur mist persónbending í fleirtali, og meginnorðurlendskt hevur mist bæði tal- og persónbending.

	meginnorður-lendskt – norskt	**føroyskt**	**íslendskt**
eintal			
1. persónur	jeg står	eg standi	eg stend
2. persónur	du står	tú stendur	þú stendur
3. persónur	han/hun står	hann/hon stendur	hann/hún stendur
fleirtal			
1. persónur	vi står	vit standa	við stöndum
2. persónur	dere står	tit standa	þið standið
3. persónur	de står	teir/tær/tey standa	þeir/þær/þau standa

20. mynd: Tal- og persónbending av sagnorðum

Svenskt hevði talbending heilt fram til miðskeiðis í 20. øld (*poiken kommer: poikarna komma*), men hon hvarv í norskum og donskum í 19. øld. Niðanfyri er ein yvirlitstalva, ið dregur saman um bendingarmun.

	íslendskt	føroyskt	meginnorðurlendskt
tal á føllum			
a) á navno. og lýsingaro.	4	3	0
b) í fornøvnum	4	3	2
kynbending í fleirtali	+	+	–
talbending í sagnorðum	+	+	–
a) í eintali	+	+	–
b) í fleirtali	+	–	–

21. mynd: Yvirlit yvir meginnorðurlendskar og útnorðurlendskar bendingar

Í setningunum niðanfyri síggja vit, hvat hetta merkir í roynd og veru.

ÍSLENDSKT

Sum skilst á 21. mynd er íslendskt tað einasta málið, ið enn hevur persónbending í sagnorðum í bæði eintali og fleirtali og harafturat 4 føll í navnorðum. Í dømunum niðanfyri síggja vit sagnorðini *koma, síggja, standa og sakna* sett saman við navnorðinum *hesti* í øllum føllum, í bundnum sniði eintali og fleirtali og við ymiskum persónsfornøvnum sum grundliði.

EINTAL			
hvørfall	hesturinn kemur		
	hvønnfall	**hvørjumfall**	**hvørsfall**
1. persónur	ég sé hestinn	ég stend hjá hestinum	ég sakna hestsins
2. persónur	þú sérð hestinn	þú stendur hjá hestinum	þú saknar hestsins
3. persónur	hann/hún sér hestinn	hann/hún stendur hjá hestinum	hann/hún saknar hestsins

FLEIRTAL			
hvørfall	hestarnir koma		
	hvønnfall	**hvørjumfall**	**hvørsfall**
1. persónur	við sjáum hestana	við stöndum hjá hestunum	við söknum hestanna
2. persónur	tið sjáið hestana	tið standið hjá hestunum	tið saknið hestanna
3. persónur	teir/tær/tey sjá hestana	teir/tær/tey standa hjá hestunum	teir/tær/tey sakna hestanna

FØROYSKT

Taka vit somu setningarnar á føroyskum, síggja vit tvey avgerandi frávik:

a) hvørsfallið er burtur í navnorðum (*eg síggi/sakni hestin* (hvønnfall) móti íslendskum: *ég sé hestin* (hvønnfall), men *ég sakna hestsins* (hvørsfall) – á íslendskum tekur *sakna* nevniliga hvørsfalsávirki aftur at sær.

b) persónbendingin í sagnorðum í fleirtali er burtur (øll fleirtalssniðini enda við – *a*: *síggja, standa, sakna*; móti íslendskum *sjáum – sjáið – sjá; stöndum – standið – standa; söknum – saknið – sakna*).

EINTAL			
hvørfall	hesturin kemur		
	hvønnfall	**hvørjumfall**	**hvønnfall**
1. persónur	eg síggi hestin	eg standi hjá hestinum	eg sakni hestin
2. persónur	tú sært hestin	tú stendur hjá hestinum	tú saknar hestin
3. persónur	hann/hon sær hestin	hann/hon stendur hjá hestinum	hann/hon saknar hestin

FLEIRTAL			
hvørfall	hestarnir koma		
	hvønnfall	**hvørjumfall**	**hvønnfall**
1. persónur	vit síggja hestarnar	vit standa hjá hestunum	vit sakna hestarnar
2. persónur	tit síggja hestarnar	tit standa hjá hestunum	tit sakna hestarnar
3. persónur	teir/tær/tey síggja hestarnar	teir/tær/tey standa hjá hestunum	teir/tær/tey sakna hestarnar

NORSKT BÓKMÁL

Her síggja vit nútíðar meginnorðurlendskt við ongari fallbending í navnorðum og heldur ongari tal- og persónbending í sagnorðum.

EINTAL			
	hesten kommer		
1. persónur	jeg ser hesten	jeg står hos hesten	jeg sakner hesten
2. persónur	du ser hesten	du står hos hesten	du sakner hesten
3. persónur	han/hun ser hesten	han/hun står hos hesten	han/hun sakner hesten

FLEIRTAL			
	hestene kommer		
1. persónur	vi ser hestene	vi står hos hestene	vi sakner hestene
2. persónur	dere ser hestene	dere står hos hestene	dere sakner hestene
3. persónur	de ser hestene	de står hos hestene	de sakner hestene

Bera vit saman við norrønt, ber til at staðfesta, at íslendskt hevur at kalla varðveitt bendingarskipanina, sum hon var fyri túsund árum síðani, og at føroyskt hevur mist nakað av fornu bendingini, men ikki nær til so nógv sum meginnorðurlendsku málini.

Ymiskur framburður

Tað er tó neyvan bert bendingarmunurin – morfologiski munurin – ið ger íslendskt, føroyskt og meginnorðurlendskt til sínámillum fjarstøðumál. Tveir aðrir málsligir grundstuðlar, nevniliga ljóðkervið (tað *fonologiska*) og orðfeingið (tað *leksikalska*) hava ivaleyst nógv størri týdning. Tað síggja vit, tá ið vit sammeta teir tríggjar setningarnar niðanfyri: a-brigdið er vanligt íslendskt skriftmál, b-brigdið er sami setningur í ljóðskrift og d-brigdið er sami setningur á norskum skriftmáli.

1. a. *Konan talaði við manninn sinn um bílinn.*
   b. /ko:nan ta:laði vi:ð man:in sin ʏm bi:lɪn/
   c. Kona talte med mannen sin om bilen.

2. a. *Kerlingin mætti tröllinu á fjallinu.*
   b. /kjɛrdliŋgjin mai^{h}t:ɪ trødlɪnʏ au fjadlɪnʏ/
   c. Kjerringa møtte trollet på fjellet.

3. a. *Sjónvarpið bilaði þegar ég var að horfa á fréttirnar.*
   b. /sjou:nvarpið bɪ:laðɪ þɛ:ɣar jɛ:ɣ va:r að horva au frjɛ^{h}t:ɪrdnar/
   c. Fjernsynet gikk i stykker mens jeg så på nyhetene.

23. mynd: Íslendskt (skrift og tala) mótvegis meginnorðurlendskum.

Av hesum setningum høvdu meginnorðurlendingar mestur skilt tann fyrsta bæði í skrift og talu. Annan setning høvdu teir væntandi skilt í skrift, men neyvan í talu. Triði setningur hevði verið fullkomiliga høpisleysur fyri ein meginnorðurlending bæði so og so. Frágreiðingin er sjálvsøgd:

- Í fyrsta setningi: *Konan talaði við manninn sinn um bílinn* eru sjálv orðini (merkingin) tey somu, og ljóðliga er eisini rímiligt samsvar.
- Í øðrum setningi: *Kerlingin mætti tröllinu á fjallinu* eru orðamerkingarnar eisini tær somu, men ljóðgongdin í íslendskum og meginnorðurlendskum ger, at tað er ikki møguligt hjá einum meginnorðurlendingi at skilja setningin, um hann bert sleppur at hoyra hann. Skrivliga er setningurin ikki so fremmandur.
- Í triðja setningi: *Sjónvarpið bilaði, þegar ég var að horfa á fréttirnar* eru hinvegin næstan øll orðini ólík, og tí hevði verið lítil hjálp í, at ljóðgongdin var meinlík.

Orðini hava mest at týða fyri fatanina

Ein umráðandi fyritreyt – kanska tann avgerandi – fyri at skilja málið hvør hjá øðrum er, at orðini líkjast annaðhvørt í talu ella skrift – ella helst í báðum. Í meginnorðurlendskum varð ein týðandi partur av arvaða orðfeinginum trokaður burtur av lágtýskum í seinmiðøld. Tað komst av tøttum samskifti við hansakeypmenninar

– norðurtýskar keypmenn – sum í langa tíð sótu á øllum handli í Meginnorðurlondum. Hetta samskifti hevur sett síni týðiligu spor: Ein varislig meting sigur, at millum 30 og 40 prosent av gerandisorðfeinginum eru úr lágtýskum.

Nútíðar meginnorðurlendsk mál hava nógv tøkuorð úr týskum

Tað ber væl til at gera heilar tekstir, har at kalla alt uttan bendingin og smáorðini er týskt. Í setninginum niðanfyri eru øll orð, ið eru skrivað við skákskrift, týsk:

Skredderen mente, at Jakka passet fortreffelig, men kunden klaget over, at plagget var kort og tøjet simpelt og grovt.

Ein orsøk til, at tað kann vera trupult at skilja meginnorðurlendsku málini, er, at Noreg, Svøríki og Danmark hava tikið upp ymisk orð úr lágtýskum. Týsku liðirnir í nútíðar meginnorðurlendskum eru rímiliga javnt býttir millum einstøku málini, men har ið munur er á málunum, ganga norskt og danskt saman ímóti svenskum. Tað er rætt og slætt, tí at Danmark og Noreg í fleiri hundrað ár høvdu danskt í felag sum skriftmál, og mong av teimum týsku orðunum í norskum hava funnið veg gjøgnum danska skriftmálið. Norðmenn hava tó sjálvir havt samskifti við hansakeypmenninar, serliga í Bergen, sum heilt inn í 19. øld var størsti býur í Noregi. Sviar hava fingið síni týsku orð um sínar egnu hansabýir, sum vóru Stokkhólmur og Kalmar, og tað eru fyri ein part onnur týsk orð enn tey, sum eru komin inn í danskt og norskt.

Í talvuni niðanfyri síggja vit týðiliga, hvussu lík tey norsku og tey donsku orðini eru – sama um tey eru á nýnorskum ella bókmáli – men tey svensku sigla sín egna sjógv. Hesin líkskapur og munur koma fyri ein part av, at danskt og svenskt hava valt ymiskt ímillum norrøn og týsk orð. Í talvuni verða lýst trý arvorð og trý týsk orð í ávikavist nýnorskum, bókmáli, donskum og svenskum:

norskt	danskt	svenskt
spørje/spørre	spørge	fråga
av *spyrja* (norrønt)		av *frâgen* (lágtýskt)
vindauge/vindu	vindue	fönster
av *vindauga* (norrønt)		av *fenster* (lágtýskt)
mangel	mangel	brist
av *mangel* (lágtýskt)		av *brist* (gamalsvenskt)
stilling	stilling	läge
av *stelling* (lágtýskt)		av *læghe* (gamalsvenskt)
nå	nå	hinna
av *ná* (norrønt)		av *hinna* (gamalsvenskt)
samfunn	samfund	samhälle
av *samfundr* (norrønt)		av *samhælde* (gamalsvenskt)
omtrent	omtrent	ungefär
av *umtrent* (lágtýskt)		av *ungefêr* (lágtýskt)
oppdage	opdage	upptäcka
av *updagen* (lágtýskt)		av *updecken* (lágtýskt)

24. mynd: Dømi um orðfeingismun (leksikalan mun) á norskum og donskum mótvegis svenskum. Undir hvørjum einstøkum orði stendur tað norrøna/gamalsvenska ella lágtýska orðið, sum nútíðarorðið kemur av. Í fýra teimum fyrstu dømunum stavar munurin frá, at norskt/danskt øðrumegin og svenskt hinumegin hava valt ávikavist eitt norrønt og eitt týskt orð – ella øvut. Í tveimum teimum næstu dømunum eru øll orðini norðurlendsk – men tvey ymisk norðurlendsk orð. Í teimum báðum seinastu dømunum stava øll orðini frá lágtýskum, men eisini her frá tveimum ymsum lágtýskum orðum.

Er ættarmyndilin burturkast?

Sum vit hava sæð í viðmerkingum til 5. mynd, gevur ættarmyndilin eina skeiva flokking av nútíðar norðurlendskum, fyrst og fremst, tí hann flokkar norskt saman við føroyskum og íslendskum sum vesturnorrønt. Tað svarar ikki til tað, sum vit halda vera eina rímiliga flokking fyri nútíðar norðurlendskt. Spurningurin er so, um allur ættarmyndilin skuldi verið burturbeindur til frama fyri tann neyvara og meira fjøltáttaða aldumyndilin.

Tað hevði verið í so bráðræsið at gjørt ta niðurstøðuna. Ættarmyndilin er framvegis besta amboðið, vit hava til á greiðan hátt at lýsa, hvat *søguliga høpið* merkir fyri eitt málsamfelag. Serliga stóran týdning hevur tað, at vit við hesum myndli kunnu fáa fram, hvør málsligur líkskapur stavar frá *arvi* (genetiskum skyldskapi) og hvør stavar bara frá *samskifti*, t.e. *tøkuorðum*. Hetta er ein grundleggjandi flokking í samanberandi málvísindum, og tískil er ættarmyndilin eisini alneyðugur grundstuðul undir nevndu vísindum. Um málsligar »aldur« sleppa at bróta, sum best ber til, verða arvur og tøka tóm hugtøk, og tað verður neyvan nakað vísindaligt framstig.

Orsøkin, at ættarmyndilin virkar so væl til tað stóra indoevropeiska »ættartræið,« er óivað, at teir ymsu ættbólkarnir (*slávar, germanar, keltar o.s.fr.*) fóru so langt í ymsar ættir, at teir ongantíð komu aftur í samband hvør við annan. Harvið kundu heldur ongar »aldur« bróta úr einum hyli í annan. Hvør greining millum ymsu ættbólkarnar svaraði tí landafrøðiliga til eina fólkaferðing til fjarlagin øki.

At ættarmyndilin tó gevur eina merkiliga mynd av teimum norðurlendsku málunum kemur av, at flokkingin av norðurlendsku greinini í *eystur-* og *vesturnorðurlendskt* er galdandi fyri eina tíð, tá ið norðurlendsku málini framvegis vóru *eitt málførahøpi í* Meginnorðurlondum – áðrenn nakar var fluttur fjarvegis.

Tað, sum síðan hendi, var, at ein partur av meginnorðurlendingum, nevniliga ein partur av norðmonnum, flutti burtur til oyggjalondini fyri vestan. Men ikki *allir* vesturnorðurlendingar komu til Føroya og Íslands – meginparturin varð eftir í Noregi. Men burturflytingin hevði við sær, at vesturnorðurlendska greinin skrædnaði í fleiri partar, tí samskiftið millum hesi londini datt burtur so við og við, men samskiftið millum Meginnorðurlond helt ótarnað fram. Hetta er orsøkin til, at eystur- og vesturnorðurlendskt eru lítið sigandi hugtøk, tá ið ræður um at lýsa nútíðar norðurlendskt.

Gongdin í norðurlendsku málunum vísir sostatt, at tað er eitt sindur ósmæðið at halda, at eitt ættartræ, sum er gjørt fyri eitt málførahøpi, um allar ævir skal vísa tann veruliga líkskapin millum tær ymsu »greinarnar.« Tað kann lættliga henda, at fløkja kemur í greinaverkið, um eitt málførahøpi verður kloyvt, tí ein partur av tí flytur langt burtur ella tí samskiftið verður neyvari við eina aðra grein.

Meginnorðurlendska grannamálsfatanin – ein høvuðstáttur í norðurlendska samlagnum

Tá ið danir, norðmenn og sviar (finnlandssviar) tosa saman, er vanligt at tosa á móðurmálinum, kanska við onkrum smávegis tillagingum í orðavali og framburði. Tey, ið tala meginnorðurlendskt, bera seg sostatt at, sum um málini bert vóru málføri. Roknað verður tískil við, at tann, ið tosað verður við, skilur grannamálið. Hetta er tann vanliga myndin av sonevnda *grannamálssamskiftinum*.

Sum vit fyrr hava nevnt, eru norðmenn í hesum høpi í eini hepnari støðu, tí at teir ígjøgnum danskt skriftmál hava ognað sær at kalla sama *orðfeingið* sum danir. Hinvegin ger landafrøðiliga grannalagið við Svøríki, at sviar og norðmenn hava *framburðin* í felag. Hetta kemur eisini týðiliga til sjóndar í evnunum at skilja grannamálini. Her er ein strikumynd, sum vísir, hvussu nógv íbúgvarnir í teimum trimum londunum skilja av grannamálunum í talu.



25. mynd: Meginnorðurlendsk grannamálsfatan

Strikumyndin omanfyri byggir á eina kanning av donskum, norskum og svenskum nýinnkallaðum hermonnum, t.e. 19 ára gomlum dreingjum, sum varð gjørd í fyrru helvt av 1970-árunum. Sum vit síggja, lógu norsku dreingirnir væl betur fyri enn bæði danir og sviar, men vit síggja eisini, at sviar týðiliga lógu ringast fyri. Teir skiltu væl minni av norskum og serliga donskum. Sum áður sagt kann tað koma av *stórabeiggjalyndinum*. Við tað at sviar eru so nógvir í tali, rokna teir kanska við, at minnu grannarnir vilja átaka sær stríðið at skilja svenskt, men sjálvir *tíma* teir ikki at ómaka sær at skilja norskt og danskt – ein heldur kaldlig útlegging av ójøvnu málfatanini millum sviar og grannarnar fyri sunnan og vestan.

Hetta er tó ikki allur sannleikin. Umrødda kanning bygdi nevniliga bert á heimildarfólk úr høvuðsstaðarøkinum í teimum trimum londunum, og hetta gevur í sær sjálvum dønum og norðmonnum fyrimun, tí at bæði Oslo og serliga Keypmannahavn liggja rættiliga nær Svøríki, men Stokkhólmur liggur langt burtur frá bæði Noregi og Danmark. Tað er tí ikki órímiligt, at Stokkhólmsbúgvar skilja minni av norskum og donskum, enn fólk í Oslo og Keypmannahavn skilja av svenskum, rætt og slætt tí at keypmannahavningar og oslobúgvar oftari hitta sviar, tí teir eru so nær við.

Eitt afturat, sum hevði stóran leiklut í 1970-árunum, var sjónvarpið, tí bæði danir og norðmenn høvdu tøkniliga atgongd at svenskum sjónvarpi, men sviar sluppu hvørki fram at donskum ella norskum sjónvarpi. Harvið fingu bæði danir og norðmenn ovmikið av »ókeypis læru í svenskum,« men einki fór hin vegin.

Í eini nýggjari kanning av grannamálsfatanini, sum ikki er liðug enn, hevur verið roynt at rætta henda mismun við at tryggja eitt javnari landafrøðiligt býti millum heimildarfólkini, soleiðis at eisini Bergen í Noregi, Århus í Danmark og Malmø í Svøríki verða tiknir við í samanberingina. Hetta hevur, sum væntað, havt við sær, at betri javnvág er í lutfallinum millum danir og sviar enn í tí eldru kanningini. Men ikki óvæntað eru norðmenn framvegis betur fyri, soleiðis sum málsliga støðan er, tí í stórum hava norðmenn sum sagt orðfeingið í felag við danir og framburðin í felag við sviar.

Tá ið ein norðmaður talar við sviar, eru tað í høvuðsheitum bara nøkur sersvensk orð, ið volda norðmonnum trupulleikar; framburðurin hevur einki at týða. Í samrøðu við danir er tað øvugt. Tá eru orðini at kalla tey somu, men framburðurin er so ymiskur, at samrøðan fyri tey flestu gongur trekari. Í donskum oyrum eru norskt og svenskt so lík, at flestu danir hoyra ikki mun á. Vanliga hoyra danir svenskt og norskt bara sum svensk. Av tí at teir hoyra ikki mun, er møguleikin tvífalt so stórur fyri at raka rætt við svenskum, tí sviar eru tvífalt so nógvir í tali sum norðmenn.

Kortini síggja vit á strikumyndini, at danir í grundini *skilja* væl betur norskt enn svenskt, hóast teir ikki hoyra mun. Hetta kemur sjálvandi av, at danir og norðmenn hava eitt stórt orðfeingi í felag. Á leikmáli kunnu vit siga, at úr donskum sjónarhorni er ein norðmaður ein svii, ið er lættur at skilja. Tí er eisini sjálvsagt, at danir og sviar skilja hvør annan ringast, við tað at teir bæði hava trupulleikar av orðfeingi og framburði, meðan norðmenn, sum nevnt, eru í eini hepnari støðu millum »danskt« orðfeingi og »svenskan« framburð.

Enn er eitt eftir, sum – umframt tað reint málsliga tilknýtið til grannamálini – kann greiða frá, hví norðmenn eru so væl staddir. Sum vit fleiri ferðir áður hava nortið við, verða staðbundnu málførini nýtt nógv meir í norskum enn í grannamálunum. Hetta ger, at norðmenn eru vanir við at hoyra skiftandi frábrigdi av norskum dag og dagliga. Hinvegin nýta danir og sviar bert ríkismálførið og kanska sítt egna málføri í gerandisviðurskiftum. Hetta er kanska orsøkin til, at danir og sviar skjótt geva skarvin yvir í sínámillum samskifti.

Tað, at norðmenn eru vanir við málsligt margfeldi bæði í skrift (bókmál, nýnorskt) og serliga í talu, ger, at teir hava meir av duldum orðfeingi enn flestu danir og sviar. Vit kunnu siga tað soleiðis, at fyri ein norðmann er tað at hoyra danskt ella svenskt lítið øðrvísi enn at hoyra eitt fjarlagið norskt málføri – tað snýr seg í øllum førum bara um frábrigdi í meginnorðurlendska málførahøpinum.

Grannamálsfatanin í vanda?

Ivaleyst er tað framvegis so, at grannamálssamskifti er tað vanliga, tá ið meginnorðurlendingar hittast. Men nú er líkt til, at slíkt samskifti kann koma at gerast ein sernorskur ágóði. Á einum norðurlendskum málfundi ár 2000 bar danski professarin Jørn Lund fram hesa órógvandi útsøgn um, hvussu støðan er í dag:

> Sonur mín hevur lisið eina lestrarhálvu á »University of British Columbia« í Vancouver. Av og á tekur hann sær av løttum saman við tveimum lestrarfeløgum; tað er gott at kunna hvíla í móðurmálinum, at kunna málbera seg ótarnaður og skilja tað undirskilda. Í einum teldubrævi lýsti hann málsligu støðuna soleiðis: Norskir og danskir studentar tosa sínámillum á móðurmálinum, tað gera svenskir og norskir eisini, men danskir og svenskir studentar tosa enskt sínámillum.

Tað, ið Jørn Lund professari sigur frá her, er sjálvandi tað, sum kann henda, tá ið meginnorðurlendingar hittast *burturi* í enskmæltum londum. Men tað eru eisini dømi, sum benda á, at tað sama hendir, tá ið meginnorðurlendingar úr ymsum londum hittast í *Meginnorðurlondum*.

Um enskt hevði tikið við sum »lingua franca« í munnligum samskifti millum meginnorðurlendingar, hevði ein týðandi táttur í norðurlendska samleikanum farið til grundar. Sostatt hevði norðurlendska máløkið á meginlandinum fyri fyrstu ferð í 2000 ár ikki longur verið fatað sum eitt málførahøpi, men sum fleiri fjarstøðumál.

Úr norskum sjónarhorni eru slík framtíðarútlit ein mentanarlig vanlukka, men enn er hetta ikki veruleiki. Tó eru sum nevnt onkur órógvandi tekin, ið bera á tað borðið, at slíkt kann henda, um meginnorðurlendingar ikki síggja virði í at hava ein felagsskap við 20 mill. fólkum, sum kunnu samskifta á móðurmálinum – møguliga við onkrum tillagingum í orðfeingi og framburði, um á stendur. Við sínámillum virðing og áhuga fyri málsligum líkskapi og muni eigur frameftir at bera til at varðveita Meginnorðurlond sum eina málsliga og mentanarliga eind, har øll kunnu gleða seg um spennandi margfeldi. Hetta fær kanska eisini fólk at verða opnari og ikki dømandi, tá ið ræður um margmentanarligu støðuna í nútíðar samfeløgunum.

Týtt úr norskum hava Zakaris Svabo Hansen og Óli Jákup Niclasen

Bókmentir

Bandle, Oskar (høvuðsritstjóri) (2002): *The Nordic Languages. Volume 1.* Berlin – New York. (stór vísindalig handbók í tveimum bindum; seinna bindið kemur væntandi í 2005)

Braunmüller, Kurt (1998): *De nordiske språk.* Oslo. (lærubók; upprunaliga skrivað á týskum fyri týskar studentar, ið lesa norðurlendsk mál)

Haugen, Einar (1976): *The Scandinavian Languages. An introduction to their history*. London (vísindaligt yvirlitsverk)

Karker, Allan, Birgitta Lingren & Ståle Løland (ritstj.)(1987): *Nordens språk.* Oslo. (lutfalsliga alment skrivað og lættlisið yvirlitsverk)

Torp, Arne (1998): *Nordiske språk i nordisk og germansk perspektiv.* Oslo. (lærubók skrivað fyri norskar móðurmálsstudentar á universitetsstigi. Ein kapittul úr hesi bók er at finna her: http://vestnorden.no/vestnord.doc)

Wessén, Elias (1965): *De nordiska språken.* Stockholm. (lærubók skrivað fyri studentar, ið lesa norðurlendsk mál)

Internet

Um norðurlendskt málsamstarv:	www.norden.org/sprak
Um norðurlendska grannamálsfatan:	www.nordkontakt.nu
Um »Útnorður«:	vestnorden.no
Um lingua franca:	www.uwm.edu/~corre/franca/edition2/lingua.2.html.
Um pomorhandilin:	www.pomor.no
Um russaranorskt:	www.kortlandt.nl/publications/art197e.pdf.
Um älvdalskt:	swedia.ling.umu.se/Svealand/Dalarna/Alvdalen
Um vesturjútskt:	www.statsbiblioteket.dk/dlh
Um lágtýskt:	www.lowlands-l.net www.rostra.dk/platt
Um frísiskt:	www.lowlands-l.net
Um suðurjútskt:	www.dialekt.dk www.jyskordbog.dk

KAISA HÄKKINEN

Finskt

Finskt og ættarmál tess

Finskt er av uralsku málættini, ein kløn og støkkin keta av málum, sum røkkur frá eystursjóvarstrondini heilt til Jenisej ánna og Taimyrhálvoynna í Sibiria. Heitið *uralsk mál* hevur verið nýtt síðan fyrst í 19. øld og stavar frá, at meirilutin av nevndu málum verður talaður nærindis Uralfjøllunum – á marknaleiðini millum Ásia og Evropa. Keldan til málættina verður hildin at vera antin nærindis Volgabuginum ella í núverandi Hvítarusslandi.

Tann uralska málættin verður vanliga býtt í tvær høvuðsgreinar. Eystara greinin er samojedisk mál, sum verða talað í Sibiria, og vestara greinin er tann finsk-ugriska. Henda seinna greinin er á annan bógvin tey eystursjóvarfinsku málini og á hin tann ugriska greinin við teimum báðum ob-ugrisku málunum *mansi* og *chanti* og tí nærskylda *ungarska* málinum. Ungarar búgva nú langt frá sínum málfrændum, tí at forfedrar teirra eru komnir til Miðevropa saman við turkiskum ættbólkum um fyrsta túsundáraskiftið e.Kr. Aðrar finsk-ugriskar greinar eru *sámiskt*, *volgafinskt*, *mordvinskt* og *mari* og tey permisku málini *komi* og *udmurtiskt*. Eystursjóvarfinsku málini eru, umframt tað finska: kareliskt, vepsiskt, votiskt, estiskt og liviskt. Hesi málini minna nógv um hvørt annað bæði í bygnaði og orðfeingi, sjálvt um málini ikki eru sínámillum fatilig sum tey meginnorðurlendsku málini. Líkskapurin stavar í høvuðsheitum frá langari samsøgu. Tey uralsku málini fram við Eystursjónum hava verið eitt mál, tað sonevnda *frumfinska*, sum í smáum hevur greinað seg sundur. Ein gomul grein av frumfinskum er *frumsámiskt*, men eystursjóvarmálini eru ein yngri grein av frumfinskum, nevnd *fornfinskt*. Tey serkendu drøgini í finska málbygnaðinum hava ment seg í eystursjóvarfinsku eindartíðini.

Forsøga finna

Finnland er bygt úr ymsum ættum, og har hava í tíðarhavi verið talað mong mál. Tað ber ikki til við vissu at siga, nær fyrstu menniskju, ið talaðu uralskt, eru komin til Finnlands, og um tey hava verið millum fyrstu búreisingarnar. Í seinasta lagi 3. túsundáraskeið f.Kr. verður mett, at ráðandi málið í núverandi Finnlandi hevur verið eitt slag av frumfinskum, tí at finnlandsøkið var um ta tíðina partur av kambkeramiska mentanarøkinum, sum verður roknað fyri at vera eitt við uralska máløkið.

Í økinum fram við Eystarasalti hava finsku forfedrarnir havt tey indoevropeisku fólkini til grannar, sum seinni hava skilt seg sundur í baltar og germanar. Aldagamalt samskifti kemur týðiligast til sjóndar í skiftandi løgum av tøkuorðum. Gamlar baltiskar orðatøkur eru t.d. *halla* 'frost', *heinä* 'hoyggj' og *ohra* 'korn' og germanskar tøkur lán, t.d. *kaura* 'havri', *peltu* 'akur' (sbr. felt) og *ruis* 'rugur'. Tøkuorðini bera boð um, at frumfinska fólkið, sum áður hevði livað av veiði, hevur lært seg húsdjórahald og landbúnað av baltisku og germonsku grannunum. At tøkuorðini eru tey somu í øllum eysturssjóvarfinsku málunum merkir, at tey eru tikin, áðrenn *finskt* hevur ment seg til eitt egið mál.

Finsk málføri

Finsku málførini eru býtt í tveir høvuðsbólkar, eystur- og vesturfinsk málføri. Markið millum tey eysturfinsku og tey vesturfinsku málførini samsvarar í høvuðsheitum við markið, ið sett varð millum Svøríkis og Russlands við friðinum í Nöteborg í 1323. Í tí semjuni gjørdist Finnland alment ein partur av svenska ríkinum. Skilnaðurin millum tey eysturfinsku og tey vesturfinsku málførini hevur tó røtur langt afturi í forsøguligari tíð.

Í steinøldini búðu neyvan meir enn nøkur túsund menniskju í núverandi Finnlandi, og so fá fólk kundu rímiliga ikki búseta seg javnt um alt landið. Fólkini livdu av at veiða fisk og djór og at henta, og tey fluttu bústað, alt eftir hvar ið nakað var til matna. Tey eru farin at seta seg í fast búgv móti endanum á steinøldini, tá ið tey hava lært at halda fenað og dyrka jørðina. Tey bestu økini vóru í

Vesturfinnlandi: Satakunta, Häme (Tavastlandi) og Útsynningsfinnlandi (Veruliga Finnland, fi. Varsinais-Suomi) og í Eysturkarelia.

Bæði finska navnið Suomi og norðurlendska navnið Finnland hava frá fyrstantíð bert umfatað Útsynningslandið, sum síðan 19. øld hevur verið kallað »Veruliga Finnland« fyri at skilja ímillum. Málførini í Útsynningsfinnlandi og Häme hava í hvussu er fyri ein part sama uppruna og umboða elstu greinina av vesturfinskum málførum. Úr teimum eru seinni runnin eysturbotnsmálførini, av tí at fasta búsetingin hevur breitt seg til Eysturbotnin. Málførini fyri norðan eru meira blandað, tí partur av fólkinum har er ættaður úr Eysturfinnlandi. Av tí, at tað áður ikki hevur verið nakað veruligt mark millum Svøríki og Finnland, hevur finska búsetingin breitt seg til Torndalin og Vesturbotnin í núverandi Svøríki. Torndalsfinska málførið hevur síðan samskiftið við svenskt ment seg til tað, vit nú á døgum nevna meänkieli (’okkara mál’) og sum hevur støðu sum minnilutamál í Svøríki. Tey eysturfinsku málførini hava í høvuðsheitum sín uppruna í fornkareliskum, sjálvt um savolaksmálførini eisini tykjast at hava vesturhøll drøg í sær.

Greiningin í málføri er hend í eini tíð, tá ið tey flestu í Finnlandi livdu av landbúnaði og meginpartin av lívi sínum búðu og virkaðu í at kalla sama øki. Umstøðurnar tóku at broytast munandi í seinnu helvt av 19. øld. Tá varð farið undir at gera jarnbreytir og stór ídnaðarvirki, og fólk fóru í vinnu sum verkafólk og fluttu úr stað í annað at arbeiða. Í 20. øld eru málføramørkini kámað meir og meir í samsvari við vaksandi fólkaflutningin. Í seinna heimsstríði fluttu yvir 400.000 fólk burtur úr Karelia til aðrar partar av Finnlandi. Í 1960- og 70-árunum tók ein nýggjur fólkastreymur seg upp úr bygdunum inn í býirnar. Serliga úr Savolaks og Eysturbotni er ein mongd av fólki flutt til Helsingforsleiðina. Helsingfors var um seinnu helvt av 19. øld framvegis í høvuðsheitum ein svenskmæltur býur, men í 20. øld mentist hann til fólkaríkasta finska málføraøkið, um enn málsliga tað óregluligasta. Eisini var fólkastreymurin nógvur úr Finnlandi til Svøríkis um ta tíðina. Tey fluttu hava yvirhøvur slept teimum eyðsýndastu drøgunum í sínum heimstaðarmálføri, og tey gomlu sockenmálførini eru trokað meir og meir burtur av almannafinskum talumáli.


vesturfinsk málføri
1 útsynningsfinsk málføri
2 útsynningsmiðmálføri
3 tavastlandsmálføri
4 landsynningsbotnsmálføri
5 mið- og landnyrðingsbotnsmálføri
6 norðurbotnsmálføri
eysturfinsk málføri
7 savolaksisk málføri
8 landsynningsfinsk málføri
finnlandssvensk øki
6
5
7
4
8
3
2
1

Skeið í søguni hjá finskum

Fornfinskt og miðaldarfinskt

Søgugongdin í finskum eftir frumfinska tíð verður býtt sundur í fimm. Fyrsta skeiðið er *fornfinskt* frá fyrstu túsund árunum eftir okkara tíðarrokning. Longu tá verður støði lagt undir fyrsta málføraskilnaðin. Næsta mentanarsøguliga týðandi skeiðið var tað *miðaldarfinska*. Miðøldin í Finnlandi verður roknað frá uml. 1150, haðani elstu skjølini eru um finsk viðurskifti. Finnland gjørdist í miðøldini ein partur av svenska ríkinum og varð lagt undir svenska lóg og svenskan stjórnarsið. Finskt hevði ikki støðu sum alment lógar- og umsitingarmál, men hentari var í vissum førum at nýta finskt. Á henda hátt komu mong orð og orðingar úr svenskum lógar- og umsitingarmáli inn í finskt. T.d. eru *laamanni* 'lagman', *laki* 'lag' og *tuomari* 'domare' tøkuorð úr svenskum.

Teir heidnu finnarnir vórðu umvendir í miðøld bæði eystan- og vestaneftir. Tann parturin av Finnlandi, sum kom undir svenskt vald, helt seg til rómversk-katólsku kirkjuna, og ortodoksa læran breiddi seg um Karelia. Kristningin broytti bæði heimsmyndina og orðfeingið hjá finnum nógv. Kirkjan hevði síni egnu embæti og egna útbúgvingarskipan, og eisini finnar høvdu nú møguleika fyri at fara tann lærda vegin. Høvuðslæruevnið var latín, felagsmálið hjá kirkjuni og allari tí lærdu verðini í miðøld. Flestu orð, sum tørvur var á í trúarlívinum, komu umvegis svenskt, t.d. *enkeli* 'ängel', *kirkko* 'kyrka' og *messu* 'mässa', men ein partur kann vera komin beinleiðis úr latíni, t.d. *epistola* 'epistel', *mammona* 'mammon' og *saatana* 'satan'.

Gamalt skriftfinskt

Tað triðja menningarskeiðið, *gamalt skriftfinskt*, tók við í 1540-árunum, tá ið trúbótin kom til Finnlands. Við trúbótini fylgdi tann meginregla, at fólk skuldu kunna taka Guðs orð til sín á móðurmálinum, og var einki skriftmál frammanundan, mátti tað skapast nú. Mikael Agricola, sum seinni gjørdist biskupur í Åbo, týddi og læt prenta tær fyrstu finsku bøkurnar. Teirra millum var Nýggja testamenti, sum kom út í 1548, tann týdningarmesta. Í høvuðsheitum var støðið undir skriftmálinum málførini um Åboleiðina, tí at Åbo var høvuðsstaður og miðdepil fyri trúarlívinum. Men Agricola nýtti eisini drøg úr øðrum málførum í tann mun, tað var neyðugt fyri at fullbúgva Åbomálførini til alt samskifti.

Øll bíblian varð týdd til finskt í 1642, og hon varð havd sum fyrimynd fyri skriftmálinum líka til fyrst í 19. øld. Alla ta tíðina vóru bókmentirnar yvirhøvur átrúnaðarligar. Skriftmálið fekk nú innskot eisini frá eysturbotns- og tavastlandsmálførunum, men tey útsynningsfinsku málførini vóru framvegis grundarlagið.

Eldri nútíðarfinskt

Eitt nýtt skeið í søguni hjá finskum, tað *eldra nútíðarfinska*, tók við í 19. øld.

Svøríki misti Finnland til Russlands í 1809 og Finnland gjørdist eitt sjálvstýrandi stórfúrstadømi undir Russlandi. Umsitingarmálið var framvegis svenskt. Men reist vórðu alt meira tilvitandi krøv um, at finskt skuldi hava størri rætt. Eisini sjálvum málinum varð litið at við øðrum eygum enn áður. Tey vesturfinsku málførini vórðu roknað sum oyðiløgd av sterku ávirkanini frá svenskum og leitað varð eftir nýggjum fyrimyndum fyri skriftmálinum í teimum »reinaru« eysturmálførunum. Umdømið hjá eysturfinsku málførunum styrktist eisini av tjóðkvæðinum Kalevala (1835), sum Elias Lönnrot hevði sett saman burtur úr fólkayrkingum, sum hann í høvuðsheitum hevði savnað í Karelia. Farið varð miðvíst í holt við at menna finskt til eitt mentanarmál við at geva út týðingar, lærubøkur, yrkisbókmentir á ymsum økjum og fagurbókmentir og við at skapa nýggj orð (sí brotið um orðfeingið).

Sjálvt um finskt sum mál mentist nógv í 19. øld, var tað ikki fyrr enn í seinnu helvt av øldini, at tað kom í eina sterkari almenna støðu. Alexandur II gjørdi í 1863 eina reglugerð um, at finskt skuldi javnsetast við svenskt »í øllum sum beinleiðis kom tí veruliga finska fólkinum við«. Tann fyrsti finskmælti lærustovnurin varð grundaður í Jyväskylä í 1858, og finskmælta fólkaskúlaverkið fór til verka í 1866. Tí finsku skúlaskipanini fyri at takka komu fleiri finskir studentar á universitetið, og soleiðis vórðu alsamt fleiri tænastumenn við finskum sum móðurmáli útbúnir. Longu í 1880-árunum hevði finskt ment seg og styrkt sína støðu í samfelagnum so mikið, at tað bar til at nýta finskt undir næstan øllum umstøðum og allastaðni. Ávís undantøk vóru vissuliga. T. d. var rættarskipanin framvegis svensk heilt út í 20. øld, og á Helsingfors universiteti, landsins einasta universiteti fyrst í 20. øld, varðveitti svenskt sína støðu sum høvuðsmál fyri gransking fram til 1930-árini.

Nútíðarfinskt

Fimta menningarskeiðið hjá finskum, *nútíðarfinskt*, verður roknað frá 1880-árunum og frameftir. Eftir tað eru ongar víðgongdar broytingar við atliti at bygnaðinum í finskum, men menningin hevur verið spøk og í samsvari við broytingar í umheiminum; tó er málnýtslan og áskoðanin á hana broytt munandi. Seinast í 19. øld og í fyrru helvt av 20. øld var hugmyndin tann, at tann mentaða menniskjan talaði í samljóði við skriftmálsreglurnar í øllum viðurskiftum. Nú á døgum er hugsanin ein heilt onnur. Í formligum viðurskiftum verður framvegis talað standardmál, men í gerandislívinum verður nýtt tað talumálið, sum er fyri hond ella reint málføri. Líknandi gongd er í skrivaða málinum. Í fagurbókmentum eru eitt nú innskot við gerandisligum talumáli ella slangi.

Nútíðarfinska ljóðkervið

Finska ljóðkervið er sermerkt við nógvum sjálvljóðum og lutfalsliga fáum hjáljóðum. Sjálvljóðini eru átta, og tey verða skift í tríggjar bólkar eftir, hvussu tey kunnu setast saman hvørt við øðrum:

framsjálvljóð	y, ä, ö
millumsjálvljóð	e, i
aftursjálvljóð	a, o, u

Við undantaki av nýggjum tøkuorðum og samansettum orðum kunnu ikki vera bæði fram- og aftursjálvljóð í sama orði. Ávikavist fram- og aftursjálvljóð kunnu ikki setast saman sínámillum men bert við millumsjálvljóð (sum reint ljóðliga eru framtunguljóð): *talo* 'hús', *pyhä* 'halgur', *leima* 'stempul', *seinä* 'veggur'. Henda sambindingarregla verður nevnd ljóðsamsvar (vokalharmoni). Hjá finnum verða orð úr fremmandum upphavi, sum ikki eru í ljóðsamsvari, ofta skeivt framborin, nevniliga eftir sjálvljóðareglunum.

Í upprunaligum finskum orðum eru bert 13 hjáljóð, men eftir ávirkan frá nýggjum tøkuorðum eru hjáljóðini vorðin fleiri. Í talvuni niðanfyri eru nýggju hjáljóðini (b, f, š, g) skrivað við skákskrift:

lokaljóð (klusilar)	p, *b*	t, d	k, *g*
trongaljóð (frikativar)	*f*	s, š	h
hálvsjálvljóð	v		j
reklјóð (likvitar)	l, r		
nasaljóð	m	n	ŋ

Hóast finskt í høvuðsheitum verður skrivað eftir framburði, samsvara málljóð og bókstavir ikki rættiliga. Finska stavraðið tekur eisini nakrar fremmandar bókstavir aftur at sær (*c, q, w, x, z, å*), sum bert verða nýttir til at skriva nøvn og orð úr fremmandum málum. Hinvegin er ŋ-ljóðið ikki ein bókstavur fyri seg, men verður sum í øðrum málum skrivaður sum *n* (t.d. *lanka* [laŋka]) ella *ng* (*kangas*) [kaŋŋas]).

Næstan øll finsk málljóð eru bæði long og stutt. Einastu undantøk eru hjáljóðini *d, v, j* og *h*. Í summum málførum verða eisini *v, j* og *h* framborin sum long og *d* er als ikki til í teimum fornu málførunum. Hvussu *d* er komið inn í skriftmálið verður í stuttum greitt frá seinni.

Ljóðlongdin ella kvantiteturin er í finskum merkingarskiljandi. Ljóðlongdin er ikki treytað av radding ella stavilsisskipan, men er ein sjálvstøðugur eginleiki, sum gjølla eigur at havast í huga bæði í skrift og talu. Høvuðsherðing í finskum orðum er á fyrsta stavilsi. Ein svii, sum fer í holt við at lesa finskt, ger allarhelst mistøk, júst tá ið ræður um ljóðlongd. Her eru dømi um, hvussu ljóðlongdin ávirkar merkingina:

tule	kom
tulee	kemur
(ei) tuule	blæsur (ikki)
tuulee	blæsur
tullee	kemur helst
tuullee	blæsur helst
kansa	fólk
kanssa	saman við

Finsk orð hava í miðal umleið líka nógv sjálvljóð sum hjáljóð. Kjarnin í hvørjum stavilsi er eitt sjálvljóð ella eitt tvíljóð, sum er ein samanseting av tveimum sjálvljóðum. Øll sjálvljóð kunnu setast saman við i (*ai, ei, oi, ui, yi, äi, öi*) og sambært reglunum um ljóðsamsvar eisini við *u* ella *y* (*au, eu, iu, ou; ey, iy, äy, öy*). Harafturat eru trý sokallað hækkandi sjálvljóð: ie, uo, yö. Tey eru runnin úr longum sjálvljóðum (**ee, *oo, *öö*), og søguliga bakstøði teirra kemur til sjóndar í ljóðskifti í bendingum: *tie* 'vegur': *teissä*, *suo* 'mýri': *soissa*, *työ* 'arbeiði': *töissä*.

Í finskum eru 10 ymisk sløg av stavilsum: HS, HSS, HSH, HSSH, HSHH, S, SH, SS, SSH, SHH (H = hjáljóð, S = sjálvljóð). Tey vanligastu stavilsini eru HS og HSH. Gamlir finskir orðstovnar hava ofta tvey stavilsi og enda við sjálvljóði. T.d. eru ka-la 'fiskur' og jal-ka 'fótur' finsk-ugriskir orðstovnar. Sum listin yvir sløg av stavilsum vísir, kann eitt reint finskt stavilsi ongantíð byrja við meir enn einum hjáljóði, og eitt orð kann í grundini heldur ikki enda við meir enn einum hjáljóði (sbr. *ranta* av sv. s*trand)*. Ein einføld grundregla er, at stavilsismark gongur framman fyri hvørja samanseting av hjáljóði og sjálvljóði (-HS), t.d. *pos-ki,* 'kinn' og *pis-tää* 'stinga við onkrum hvøssum'. Stavilsismark kann eisini vera millum sjálvljóð, t.d. *sa-no-a* 'søga' og *mä-en* (hvørsfall av *mäki* 'bakki').

Grundleggjandi bendingardrøg

Bendingarlæran (morfologiin) í finskum er í tveimum: bending og avleiðsla. Við avleiðslu verða gjørd nýggj orð, og við bending verða verandi orð lagað eftir sínum luti í setninginum. Bæði bending og avleiðsla virka soleiðis, at endingar verða skoyttar upp í stovnin. Vit koma aftur til avleiðslu í brotinum um orðfeingið.

Eyðkenni fyri øll uralsk mál eru tey nógvu bendingarsniðini. Í navnorða- og lýsingarorðabendingum (nominabendingum) verða eftirskoyti (suffiks) nýtt bæði til at lýsa tal og ymiskt høpi. Finskt hevur 15 ymisk føll:

	eintal	fleirtal
nominativ (hvørfall)	jalka 'fótur, bein'	jalat 'føtur, bein'
genitiv (hvørsfall)	jalan 'fóts, beins'	jalkojen 'fóta, beina'
akkusativ (hvønnfall)	jalan 'fót'	jalat 'føtur'
partitiv (partfall)	jalkaa	jalkoja
essiv (verufall)	jalkana 'sum fótur'	jalkoina
translativ (fluttfall)	jalaksi 'til fóts'	jaloiksi
inessiv (ífall)	jalassa 'í fótin(um)'	jaloissa
elativ (úrstaðarfall)	jalasta 'úr fótinum'	jaloista
illativ (innfall)	jalkaan 'inn í fótin'	jalkoihin
adessiv (hjástaðarfall)	jalalla 'á fótin(um)'	jaloilla
ablativ (hvaðanfall)	jalalta 'av fótinum'	jaloilta
allativ (hvagarfall)	jalalle 'á fótin'	jaloille
abessiv (fráverufall)	jalatta 'fótleysur'	jaloitta
komitativ (fylgisfall)	jalkoineen 'víð fóti sínum'	jalkoineen
instruktiv (kunningarfall)	jalan 'til fóts'	jaloin

Týðingarnar eru bara á leið

Av tí at bendingareftirskoytið má vera í ljóðsamsvari, hava mong eftirskoyti eitt snið við fram- og eitt snið við aftursjálvljóðum, t.d. *talo-ssa* 'í húsinum' – *kylä-ssä* 'í býnum', *kissa-lta* 'av kettuni' – *hiire-ltä* 'av músini'.

Við endingum ber eisini til at vísa á ogn. Í finskum sum í norðurlendskum eru seks grammatiskir persónar, og allir hava sítt egið ognareftirskoyti (possessivsuffiks):

eintal		fleirtal	
kissa-ni	ketta mín	kissa-mme	ketta okkara
kissa-si	ketta tín	kissa-nne	ketta tykkara
(hänen) kissa-nsa	ketta hansara/hennara	(heidän) kissa-nsa	ketta teirra

Fleirtalsendingar, fallendingar og ognareftirskoyti kunnu verða brúkt samstundis, men tey mugu leggjast aftur at stovninum í ávísari raðfylgju: fyrst fleirtalsendingin, síðan fallendingin og at enda ognareftirskoytið:

kissa-lle-mme	'ketta-til-okkara' = til kettu okkara
kisso-i-lle-nne	'kett-ur-til-tykkara' = til kettur tykkara

Finskt hevur eingi kenniorð og heldur ikki málkyn. Eisini her er talan um fyrndargomul sereyðkenni fyri tey ugrisku málini. Tað eru heldur eingi atskild fornøvn fyri kallkyn og kvennkyn. Finska fornavnið *hän* svarar bæði til orðini hann og hon á føroyskum.

Í sagnorðabending ber til við endingum at skilja ímillum gerðsøgn og tolsøgn (aktiv og passiv), ymiskar hættir (modus), tíð og persón. Tolsøgn í finskum er eitt slag av óbundnum persónsniði, sum í stórum svarar til tolsøgn á okkara máli. Tolsøgnin hevur sína egnu ending og harafturat sína egnu persónending, t.d.:

gerðsøgn	(hän) sanoo, (hän) sanoi	hann/hon sigur, hann/hon segði
tolsøgn	sano-ta-an, sano-tt-i-in	ein sigur, ein segði/sagt verður, sagt varð

Gerðsøgnin hevur onga serstaka ending, og tann vanliga bendingin í nútíð í gerðsøgn hevur bert persónendingar:

minä sano-n	eg sigi	me sano-mme	vit siga
sinä sano-t	tú sigur	te sano-tte	tit siga
hän sano-o	hann/hon sigur	he sano-vat	teir/tær/tey siga

Finskt hevur fýra hættir:

søguháttur (indikativ)	sinä sanot	tú sigur
møguleikaháttur (potentialis)	sinä sanonet	tú sigur kanska
treytarháttur (konditionalis)	sinä sanoisit	tú skuldi sagt
boðsháttur (imperativ)	sano!	sig!

Eisini tíðirnar eru fýra:

nútíð (presens)	sinä sanot	tú sigur
tátíð (imperfektum)	sinä sanoit	tú segði
núliðin tíð (perfektum)	sinä olet sanonut	tú hevur sagt
táliðin tíð (pluskvamperfektum)	sinä olit sanonut	tú hevði sagt

Eins og føroyskt hevur finskt ikki serlig bendingasnið fyri framtíð (futurum), men nútíð verður brúkt bæði um tað, sum fer fram, og tað, sum fer at fara fram. Aftur at høvuðspersónendingunum (finit) hava sagnorð eisini hjálparsnið (infinit). Tey verða flokkað í tveir høvuðsbólkar, navnhátt (infinitiv) og lýsingarhátt (particip). Finskt hevur fýra navnhættir. Týdningarmest er styttra sniðið av fyrsta navnháttinum, sum er grundsniðið av navnháttinum og verður nýtt sum leitorð í orðabókum. Hjálparsagnorðasniðini kunnu í grundini verða bend í føllum. Men tað eru bara ávís føll, ið verða nýtt:

1. navnháttur	sanoa, sanoakse(ni)	siga, fyri at siga
2. navnháttur	sanoessa, sanottaessa, sanoen	sigandi
3. navnháttur	sanomalla, sanomassa, sanomasta sanomalla, sanomatta, sanoman, sanottaman	
4. navnháttur	sanominen, sanomista	sigandi, at siga

Fyrsta fluttfalssnið (translativsnið) í navnhátti (sanoakse[ni]) má altíð stuðlast við ognareftirskoyti, sum vísir á persón. Summir navnhættir kunnu verða nýttir eisini í tolsøgn (*sanottaessa, sanottaman*), men teir flestu bara í gerðsøgn. Navnhættirnir verða nýttir á ymsan hátt í setninginum, m.a. sum partar av ymsum sagnorðaketum: *minum täytyy sanoa* 'eg noyddist at siga', *olin juuri sanomassa* 'eg skuldi júst siga', (»eg var júst sigandi«).

Lýsingarhættirnir eru tríggir, og tveir teir fyrstu eru bæði í gerðsøgn og tolsøgn:

1. lýsingarháttur	sanova, sanottava	sigandi
2. lýsingarháttur	sanonut, sanottu	sagdur/søgd/sagt
umboðslýsingarháttur (agentparticip)	sanoma	sagdur (av onkrum)

Lýsingarhátturin verður m.a. brúktur sum lýsingarorð, t.d. *'naurava tyttö* 'ein læandi genta', *oppinut mies* 'ein lærdur maður' og í samansettum sagnorðasniðum, t.d. *hän oli sanonut* 'hann hevði sagt', *seolkoon sanottu* 'tað má verða/vera sagt'. Umboðslýsingarháttur verður nýttur til at vísa á, hvør hevur framt gerðina, t.d. *isän rakentama talo* 'tað av pápanum gjørda húsið'; *tämä talo on isäm rakentama* 'hetta húsið er gjørt av pápa.'

Eitt frumeyðkenni fyri uralsku málini er, at noktingarorðið í grundini er eitt sagnorð, ikki eitt óbent orð sum t.d. føroyska *ikki*. Noktingarsagnorðið verður bent í øllum seks persónum:

minä en sano	me emme sano
sinä et sano	te ette sano
hän ei sano	he eivät sano

Bendingin av noktingarsagnorðinum er ikki so fjølbroytt sum av vanligum sagnorðum. Farin tíð verður lýst við høvuðssagnorðinum í ymsum sniðum og um neyðugt við hjálparsagnorðinum *olla* 'vera, hava'.

sinä et sano	tú sigur einki
sinä et sanonut	tú segði einki
sinä et ole sanonut	tú hevur einki sagt
sinä et ollut sanonut	tú hevði einki sagt
sinä et sanoisi	tú skuldi einki siga
sinä et sanone	tú tordi einki at siga
älä sano!	sig einki!

Í einfaldastu førunum eru bendingarendingar í finskum sum kubbar, ið eftir tørvi verða settir á rað, hvør eftir annan í ávísari skipan aftan fyri stovnin. Tað er ein rættilig rúgva av ymiskum endingum, men tær eru lættar at skilja at og kenna aftur. Tað, sum ger tað truplut at læra seg bendingarskipanina, er, at í vissum førum henda ljóðskifti, tá ið endingar verða skoyttar upp í orðastovnar. Ljóðskiftini koma av áður hendum ljóðbroytingum, sum bert gera vart við seg í ávísum ljóðumstøðum.

Serliga mong ljóðskifti eru treytað av tí sonevnda stigskiftinum. Hetta ávirkar lokaljóðini *p*, *t* og *k*, sum í ávísum umstøðum eru viknað til blásturljóð (aspirantar) og seinni broytt í ljóði ella fullkomiliga burturdottin.

Stigskiftið kann t.d. koma til sjóndar soleiðis:

tupa : tuvan	smátta	kampa : kamman	kambur
pata : padan	grýta	ranta : rannan	strond
sika : sian	svín	kenkä : kengän	skógvur

Eisini tey longstu lokaljóðini *pp*, *tt*, *kk* eru fyri stigskifti, sum virkar sum stytting:

nappi : napin	knappur
tyttö : tytön	genta
tukki : tukin	stokkur

Dømini lýsa eisini upprunaligu orsøkina til stigskiftið: lokaljóðið millum fyrra og seinna stavilsi er viknað, har ið seinna stavilsi er afturlatið, t.e. endar við hjáljóði. Í nútíðar finskum fylgir stigskiftið ikki altíð hesum reglum, tí at orðabygnaðurin er broyttur á mangan annan hátt.

Stigskiftið er eisini orsøkin til hjáljóðið *d*. Upprunaliga hevur »veika« mótsøgnin til *t* verið veika trongaljóðið (spiranturin) *đ* (samanber við *ð* í íslendskum framburði og *d* í donskum framburði, t.d. í orðinum *vid*). Av tí at trongaljóðið ikki hevur havt egnan bókstav, hevur tað verið skrivað sum d, sum við tíðini hevur fingið framburðin sum raddaða lokaljóðið *d* eftir fyrimynd úr øðrum

málum. Í málførunum er đ broytt aðrar vegir. Tað verður í vesturfinsku málførunum avloyst av *r* ella *l* (*pata* : *paran* ella *palan* 'grýta'), og í teimum eysturfinsku er tað fullkomiliga burturdottið (*pata* : *paan*).

Høvuðsdrøg í orðalagslæruni

Eins og í norðurlendsku málunum er vanliga orðaraðið: grundliður – umsøgn – ávirki, t.d. *poika heittää pallon* 'drongurin kastar bóltin'. Mótsett norðurlendsku málunum varðveitir finskt hesa orðastøðu, eisini tá ið setningurin byrjar við hjáorði: *nyt poika heittää pallon* »nú drongurin kastar bóltin«, t.e. 'nú kastar drongurin bóltin'. Orðaraðið kann skifta fyri at fáa lagt okkurt aftrat, t.d. áherðing ella mótsøgn: *pallon heittää poika* merkir, at tað er drongurin og ikki t.d. gentan, ið kastar bóltin. Orðaraðið kann eisini verða nýtt til binding t.e. vísa á okkurt, ið er kent frammanundan (finskt skilur annars ikki ímillum bundið og óbundið, og *poika* kann bæði vera *ein drongur* og *drongurin*): *poika istuu pöydällä* 'drongurin situr á borðinum', *pöydällä istuu poika* 'á borðinum situr ein drongur'.

Summir setningar hava serligan bygnað, t.d. tá ið ræður um ogn: *pojalla on pallo* 'drongurin hevur ein bólt' (orðarætt 'hjá dreinginum er ein bóltur'). Her er tað ognin, t.e. bólturin, sum er grundliður, men eigarin stendur sum hjáliður við navnorðinum í hjástaðarfalli (adessiv).

Noyðsla ella skylda verða framborin eftir serligum noyðslufalsbygnaði (nesessivum konstruktiónum), t.d. setningurin *drongurin noyðist at fara* kann á finskum vera *pojan täytyy mennä* (orðarætt nakað soleiðis: »fyri dreingin er neyðugt at fara«), *poiken on mentävä* ella heldur gamalsligt *poijan on mememinen* (tveir teir síðstu setningarnir merkja á leið 'drongurin má fara'). Grundliðurin í føroyskum svarar í hesum bygnaðinum til eitt orð í hvørsfalli.

Uttan um navnháttin og lýsingarháttin ber til at byggja sonevndar setningsmótsagnir, sum merkingarliga svara til eykasetningar. Við fallendingum og ognareftirskoytum ber til at lýsa tíð og persón: t.d. *tul-tu-a-ni* (»kom-andi-eftir-meg«) merkir 'eftir at eg var komin'.

Finska orðalagið verður stýrt eftir strongum samsvarsreglum (kongruensreglum) og setningsliðirnir ávirka hvør annan í sniði. Samsvar er eitt fyrndargamalt drag í teimum uralsku málunum. Samsvar millum grundlið og umsagnarheild hevur t.d. við sær, at tal og persónur í umsøgnini eru treytað av persóninum í grundliðinum.

Í nútíðar finskum rætt sum í teimum nær skyldu eystursjóvarfinsku málunum standa fornavnamerki og lýsingarorðsmerki í sama tali og falli sum høvuðsorðið:

tämä pieni talo	hetta lítla hús
tässä pienessä talossa	í hesum lítla húsi
tähän pieneen taloon	inn í hetta lítla hús – o.s.fr.

Tilsvarandi samsvar er eisini galdandi ímillum talorð og høvuðsorð: *kolme pientä poikaa* 'tríggir smáir dreingir': *kolmelle pienelle pojalle* 'til teir tríggjar smáu dreingirnar'. Sermerkt fyri henda bygnaðin er, at høvuðsorðið stendur í eintali eftir eitt talorð, hóast tað snýr seg um fleiri dreingir (sbr. *näille pienille pojille* 'til hesar smáu dreingir'.)

Í indoevropeiskum málum verður samanheingið millum orðini ofta lýst við fyriseting. Í finskum og skyldmálum tess hava frá gamlari tíð ongar fyrisetingar verið, men í staðin hava eftirskoyti og føll verið nýtt. Eisini nú á døgum verða eftirskoyti fyri ein stóran part nýtt í finskum, t.d. *talon edessä* 'framman fyri húsið', *talon takana* 'aftan fyri húsið'. Summi eftirskoyti kunnu eisini – eftir fyrimynd úr svenskum og øðrum fremmandum málum – verða nýtt sum fyrisetingar: *aidan yli* ella *yli eidan* 'um gyrðingina', *läpi seinän* ella *seinän läpi* 'gjøgnum veggin'.

Orðfeingið

Finsku orðini verða eftir bygnaðinum býtt í tríggjar høvuðsbólkar: einføld støðisorð sum *kala* 'fiskur' og *pesä* 'búgv', avleidd orð sum *kalastaa* 'fiska' og *pesiä* 'reiðrast' og samansett orð sum *kalakauppa* 'fiskahandil' og *linnunpesä* 'fuglabúr'. Tey einføldu støðisorðini

mynda stovnin í orðfeinginum, og ein partur av teimum eru fyrndargomul uralsk arvorð. T.d. hava *kala* og *pesä* verið til longu í uralska frummálinum og eru varðveitt óbroytt í fleiri túsund ár.

Nýggj orð verða í høvuðsheitum gjørd við avleiðslu, samanseting ella láni úr øðrum málum. Allir tríggir møguleikarnir hava verið nýttir so langt aftur, sum til ber at fylgja menningini av finska orðfeinginum. Við samanseting eru fyrst og fremst gjørd nýggj navnorð, men avleiðsla er nýtt til at gera orð í øllum orðaflokkum. Við avleiðslu ber til at skifta orðaflokk og eitt nú gera sagnorð burtur úr navnorðum (*käsi* 'hond' → *käsitellä* 'handla' (=handfara) ella navnorð burtur úr sagnorðum (*maksaa* 'gjalda' → *maksu* 'gjald(ing)'. Úr sama stovni ber til at raða fleiri avleiðsluskoyti *käsiteltävyys* 'handlingarbæri'.

Sum dømi um møguleikarnar at gera orð við avleiðslu kunnu vit taka orðið *kirja* 'bók'. Orðið merkti upprunaliga tekin ella prýði (sbr. *kirjava* 'sprøklutur/marglittur' í nútíðar finskum):

kirja	bók	kirjelmöinti	skriving
kirjanen	bóklingur, smárit	kirjoite	skrift, útskrift
kirjailla	skriva bøkur, yrkja (eisini: baldýra)	kirje	bræv
		kirjuri	skrivari
kirjailija	rithøvundur	kirjoitin	prentari (teld.)
kirjailu	skriving (eisini: baldýring)	kirjoittautua	skriva seg inn
		kirjoittautuminen	innskriving
kirjasto	bókasavn	kirjain	bókstavur
kirjoittaa	skriva	kirjaimellinen	bókstaviliga
kirjoitus	skriving	kirjaimisto	stavrað
kirjoituttaa	lata skriva	kirjake	stavsnið
kirjoittaja	høvundur	kirjasin	stavsnið, stílur
kirjoitella	(fáast við at) skriva	kirjata	bókføra, skráseta
kirjoitelma	skrift, grein	kirjaaja	skrásetari
kirjoittelu	skrivandi, skriving	kirjaamo	skrásetingarstova
kirjallinen	skrivligur, bókmentaligur	kirjaus	bókføring, skráseting
kirjallisuus	bókmentir	kirjauttaa	lata bókføra/ skráseta
kirjelmä	skriv		
kirjelmöidä	seta eitt skriv saman		

Samansetingar kunnu í finskum vera nógv longri enn í nógvum øðrum málum, og tað er einki endaligt mark fyri, hvussu nógvir liðir kunnu vera í eini samanseting. Dømið *kaksisataaviisikymmenvuotisjuhlakilpapurjehdus* (orðarætt *'tveyhundraðfimmtiárahaldskappsigling'*) rúmar átta orðum, har tvey teirra eru avleiðslur (*voutis-'ára-'*, *purjehdus 'sigling'*), men hini eru einføld støðisorð.

Av teimum einføldu støðisorðunum í finskum er umleið helvtin upprunaliga uralsk og hin helvtin tøkuorð. Tað elsta tøkuorðalagið stavar frá fyrndargomlum indoevropeiskum orðatøkum, okkurt teirra frá indevropeiska frummálinum *(mehiläinen 'býfluga'*, *mesi 'hunangur'*, *nimi 'navn'*, *vesi 'vatn'*), onnur frá indoiransku málættini (*jumala 'guður'*, *orja 'trælur'*, *sata 'hundrað'*, *vasara 'hamari'*). Tøkurnar vísa, at uralsku fólkini altíð hava búð í nánd av teim indoevropeisku, sum sambært granskarum verða hildin at hava havt sítt frumbúgv við Svartahavið.

Um eystursjóvarleiðina eru í frumfinskari tíð orð tikin úr teimum baltisku málunum (*heinä 'hoyggj'*, *ratas 'hjól'*) og úr teimum germonsku málunum (*kuningas 'konungur, kongur'*, *ruhtinas 'fúrsti'*, germ. *druhtinaz*, sbr. før. *drottin*, *sairas 'sjúka'*, germ. *sairaz*, sbr. før. *sár*, *siima 'reip, lína'*, sbr. ísl. *sími 'telefon'*).

Seinni hevur finskt sum egið mál tikið úr russiskum (*pakana 'heidningur'*, *saapas 'stivli'*) og fyrst og fremst úr svenskum. Finskt hevur jú í næstan túsund ár ligið upp at svenskum, og svenskt er framvegis annað tjóðarmál Finnlands. Ikki minst slíkt, ið hevur við vinnu, mat, klæði, bygging, útbúgving, samfelagslív og mentan at gera, er komið ígjøgnum svenskt, og tí eru orðini eisini ofta tikin úr svenskum. Útrokningar siga, at tað eru um 4000 svensk orð í finskum, men svensku orðatøkurnar eru ikki kannaðar út í æsir, og veruliga talið er óivað munandi størri. Harafturat er ein rúgva av tøkutýðingum, eitt nú *puutarha 'trægarður'* (puu = træ, tarha = garður; sbr. da. have, fø. [hagi]) og *peruskoulu 'grundskúli'*. Tó at finskt og svenskt als ikki eru av einari málætt, hevur samskiftið millum málini verið so tætt alla søguliga tíð, at hugtakskervini í teimum báðum málunum hava meir í felag enn hugtakskervi í mongum nær skyldum málum. – Eisini svenskt hevur tikið nøkur orð úr finskum, t.d. *poike* (fi. poika) og *känga* (fi. kenkä *'skógvur'*).

Orðatøkur úr svenskum hava lagað seg eftir finskari ljóðskipan á ymsan hátt. Hjáljóðabólkar fyrst í orði eru einfaldaðir, raddað

lokaljóð eru vorðin óraddað, langt *f* er vorðið til *hv* og eitt sjálvljóð er komið afturat í endanum. Sostatt eru *dans*, *dragon*, *giraff*, *stolpe* og *strand* vorðin til *tanssi*, *rakuuna*, *kirahvi*, *tolppa* og *ranta*.

Í finskum eru eisini rættiliga nógv altjóða tøkuorð, sum vit kenna aftur í flestum evropeiskum málum, t.d. *filosofia*, *professori*, *skandaali*. Tað er ofta ilt at siga, hvaðani tey eru komin inn í finskt, men tey eldru tøkuorðini eru yvirhøvur komin um svenskt. Serliga í 19. øld – men eisini seinni – hevur tilvitað verið roynt at sleppa undan fremmandum orðum og skapa egin orð í staðin. Mangar vísindagreinar hava t.d. bæði altjóða og finsk heiti: *juridiikka – oikeustiede* (sbr. sv. rättsvetenskap, fø. løgfrøði), *psykologia – sielutiede* (orðarætt 'sálarvísindi'). Finska orðið fyri telefon er *puhelin* (av *puhua* 'tala'). Ta seinnu tíðina hevur andstøðan ímóti tøkuorðum ikki verið so stór, men eru góð finsk nýggjyrði til taks, vinna tey ofta frama (t.d. *palvelin* 'server' av *palvella* 'tæna', sbr. fø. ambætari).

Finskt nú og í næstum

Um 5 milliónir fólk tala finskt, sum nú er, og støðan hjá finskum er betri enn nakrantíð áður. Nú á døgum verður finskt nýtt í øllum hugsandi viðurskiftum, bæði skipaðum og óskipaðum. Tá ið Finnland fór inn í ES, gjørdist finskt eitt av almennu málunum í samveldinum. Í Svøríki hevur finskt støðu sum alment viðurkent minnilutamál.

Almennu ábyrgdina av finskari málvernd og at menna finska standardmálið hevur Granskingardepilin hjá ríkinum fyri innlendis tungumál. Granskingardepilin svarar málspurningum, ger tilmæli um málnýtsluna og gevur út ymiskar málsligar handbøkur, eina stóra lýsandi (deskriptiva) mállæru og ymsar orðabøkur, bæði fyri nútíðar finskt, gamalt finskt og finsk málføri. Eisini eru víðtøkin orðasøvn til taks. Í Svøríki hevur svøríkisfinska málnevndin ábyrgdina av finsku málverndini.

Nú á døgum verður ikki minst í Norðurlondum tosað um, at enskt er ein hóttan fyri okkara mál. Í tí kappingarstøðuni eru viðurskiftini ymisk frá máli til annað, men sterkast standa tey málini, sum eru almenn mál í sínum landi, hava eitt grundfest og støðugt standardmál, sum verður nýtt sum undirvísingarmál í skúlum og

fróðskaparsetrum. Finskt lýkur allar hesar treytir. Framtíð tess liggur í øllum førum í hondunum á málnýtarunum sjálvum. Málið verður bert varðveitt, um málnýtararnir virknir nýta tað og royna at røkja tað.

Týtt úr finskum til svenskt: Mikael Reuter
Týtt úr svenskum til føroyskt: Óli Jákup Niclasen

Bókmentir

Ennen, Muinoin (2002): *Miten menneisyyttämme tutkitaan*. Toimittanut Riho Grünthal. Tietolipas 180. Helsinki: Suomalaisen Kirjallisuuden Seura.

Häkkinen, Kaisa (1994): *Agricolasta nykykieleen. Suomen kirjakielen historia*. Helsinki: WSOY.

Häkkinen, Kaisa: *Svenska och finska – sida vid sida i tusen år*: norden.org/sprak

Höglander, Sari & Vehkanen, Marjut (2001): *Finskan lättare än du tror*. Helsinki: Edita.

Ikola, Osmo (2001): *Nykysuomen opas*. *Turun yliopiston suomalaisen ja yleisen kielitieteen laitoksen julkaisuja 65*. Turku.

Karlsson, Fred (1978): *Finsk grammatik*. Helsinki: Suomalaisen Kirjallisuuden Seura.

Internet

www.spraknamnden.se/sverigefinska.htm
virtual.finland.fi (Education & Research – Language)
www.kotus.fi

MIKAEL SVONNI

Sámisk mál

Sámiskt búøki og sámisk mál

Sámiska búøkið, Sápmi, røkkur frá eysturstrondini á Kolahálvoynni, um alt Norðurnoreg, inn í Norðurfinnland og Norðursvøríki suður til Jämtlands og Idre. (Sí kortið niðanfyri). Sápmi er eitt samanhangandi landaøki við ymiskum siðbundnum vinnuvegum, eitt nú djóra- og fiskiveiði, reindjórahaldi og landbúnaði. Í hesum øki verða talað fleiri mál og málføri.



1. mynd: Sámiska búøkið, Sápmi

Sámiska málið verður vanliga býtt í trý máløki: eystursámiskt, miðsámiskt og suðursámiskt. Vert er at hava í huga, at sámisku málmørkini ganga ikki eftir nøkrum ríkismarki.

Til tey *eystursámisku* málini hoyra *enaresámiskt*, sum verður talað í Finnlandi, um Enare leiðina, og *skoltsámiskt*, sum verður talað í Finnlandi og Russlandi. Onnur mál, sum verða talað á Kolahálvoynni, eru *kildinsámiskt*, *akkalasámiskt* og *tersámiskt*.

Miðsámiskt kunnu vit býta sundur í eitt *norðursámiskt* og eitt *lulesámiskt* øki. Upp í norðursámiskt kemur *sjósámiskt*, sum verður talað á norsku strondini, *finnmarkarsámiskt*, sum verður talað í Finnmørkini í Noregi (m.a. Guovdageadnu / Kautokaino og Kárášjohka / Karasjok og á marknaleiðum finskumegin (m.a.Ohcejohka / Utsjoki)) og eisini tornesámiskt, sum verður talað norðan fyri Jiellevárri / Gällivare í Svøríki og á marknaleiðunum finsku- og norskumegin. Onnur miðsámisk mál eru *lulesámiskt*, sum verður talað í Jåhkåmåhkke / Jokkmokk í Svøríki og Divtasvuodna / Tysfjord í Noregi umframt *arjeplogssámiskt*, sum talað verður á arjeplogsleiðini.

Av suðursámiskum er at nevna *umesámiskt*, sum verður talað í Vesturbotni (Västerbotten) og Jämtlandi.

Søgulig sambond

Sámarnir hava búð í Sápmi í túsundtals ár, og teir hava leingi einki stórvegis samband havt við umheimin. Fyrsta samskifti við norðbúgvar høvdu teir fyri reiðiliga túsund árum síðan, men teir hava tó fleiri túsund ár frammanundan havt samband við onnur finskugriskt fólk, t.e. fólk sum talaðu mál av somu ætt. Hetta er hent, áður enn tað bar til at tala um sámar sum ein tjóðarbólk.

Eitt mál gevur kunnleika um tað, sum farið er, um menniskjuni, sum talaðu júst hetta málið, hvussu tey kunnu hava livað og hvussu teirra samfelag kann hava sæð út. Við at bera saman ta finsk-ugrisku málættina við onnur mál av uralskum uppruna, m.a. tey samojedisku málini, ber til at gera sær niðurstøður um samband sámanna við onnur fólk í søgunnar gongd, men eisini um lívsmynstrið hjá forfedrum teirra. Málgranskarar royna at endurskapa forn orðasnið við støði í samtíðini, av tí at so fáar keldur eru frá gamlari tíð. (Sí brot 2.a um endurskapan og framseting av ljóðlógum).

Tíðarskeiðið frá ár 4000 til 2000 f.Kr.

Tað eru orð í sámiskum, sum tað ber til at fylgja fleiri enn 6000 ár aftur í tíðina, t.d. njuolla (pílur), juoksa (bogi), suotna (sina), guolli (fiskur), njoammil (hara). Dømini eru á norðursámiskum. Hesi orð hava sama stovn sum onnur mál av uralsku málættini – og sámiskt hevur fleiri hundrað slíkar orðastovnar. Tað gevur ábendingar um samband fyri søguliga tíð eystureftir til Uralfjøllini (finsk-ugrisk mál) og til Vestursibiria (samojedisk mál).

Tað er eisini møguligt út frá orðfeinginum at ætla um, nær ávíst samskifti er hildið uppat. Orð sum t.d. *goahti* (smátta), *liepma* (bótarsoð) *og lohkat* (rokna ella lesa) og sløk 150 onnur orð eru frá einum tíðarskeiði, sum er byrjað fyri 6000 árum síðan, tí orðini eru tey somu í finsk-ugrisku málunum, men eru ikki til í øðrum uralskum málum. Tað ber boð um, at neyva samskiftið við samojediskt mæltar bólkar er hildið uppat um ta tíðina.

Á sama hátt ber til av orðum sum *beana* (hundur), *gáma* (skógvur), reahpen (ljóari) og *mádjit* (bævur) at koma til tað úrslit, at neyva samskiftið við ugrisk mál er slitnað fyri uml. 5000 árum síðan.

Umframt samskifti við finsk-ugrisk fólk høvdu sámiskir forfedrar eisini rættiliga tíðliga í tíðini samband við fólk, ið tosaðu indoevropeiskt. Flestu mál í Evropa eru indoevropeisk, t.d. germansk og romansk mál, umframt baltisk og slávisk mál og fleiri mál í Suðurásia. Tað eru m.a. indoevropeisk tøkuorð bæði í uralskum og finsk-ugriskum málum t.d. *suotna* (sina), sum benda á samband millum fólkabólkarnar fyri meir enn 6000 árum síðan.

Tíðarskeiðið frá ár 2000 f.Kr. til 1000 e.Kr.

Eitt ástøði, sum er viðurkent víða um, sigur, at sámisku og eystursjóvarfinsku málini, t.e. finskt og estiskt, kunnu rekjast aftur til eitt og sama mál, sum varð talað fyri 4000 árum síðan (ella uppaftur fyrr). Úr hesum málinum mentust frumsámiskt og frumfinskt fyri uml. 3000 árum síðan. Sámiskt tykist at hava verið rímiliga einvorðið um ta tíðina, men hevur so við og við greinað seg sundur í fleiri mál ella málføri, sum vit kenna tað, um ár 800 eftir okkara tíðarrokning, t.e. fyri um leið 1200 árum síðan.

Seinnu árini eru tó gjørdar metingar, sum siga, at í hvussu er suðursámiskt hevur skilt seg frá nakað væl fyrr. Sum støði undir hesum kunnu vit nevna, at suðursámiskt hevur fleiri gomul drøg í eitt nú fallbendingum og hevur eina fløktari sjálvljóðaskipan enn onnur sámisk mál. Í orðfeinginum eru eisini nøkur elligomul (baltisk) tøkuorð, sum ikki eru til í øðrum sámiskum málum.

Í søgunnar gongd hava forfedrar sámanna eisini havt tilknýti til germanskar fólkabólkar í túsundtals ár, og fleiri orð eru tikin haðani t.d. *bassi* (halgur), *dohppa* (slíðri). Tað finnast eisini frumnorrøn tøkuorð í sámiskum, ið boða frá mentanarsamskifti fyrstu øldirnar eftir okkara tíðarrokning, t.d. *áiru* (ár), *gáica* (geit), *gussa* (kúgv), *vuostá* (ostur). Tað eru fleiri hundrað slík orð í sámiskum. Sámar hava eisini tikið fleiri hundrað orð úr frumfinskum, t.d. *bálka* (løn), *boallu* (knappur), dávda (sjúka) og *oastit* (keypa).

Tøkuorðini bera ikki bara boð um, hvat samskifti sámar hava havt við onnur í ymsum tíðum, men peikar eisini á, hvørjir partar av samfelagslívinum eru komnir undir hetta samskifti.

At enda kunnu vit nevna, at sámisk tøkuorð eru í nútíðar svenskum, t.d. *sarv* (<sarvis = reintarvur), *rajd* (<ráidu = 'reindjórariðil') og *nåid* (< noaidi = 'sámiskur gandakallur'). Mong heiti frá reindjórahaldi eru tikin inn í finskt, serliga norðurfinsk málføri, t.d. urakka (< *varik* = tvævetur reintarvur) og suopunki (< *suophan* = 'snara' / 'lasso').

Sámatal

Tað eru um leið 60.000 sámar í Sápmi. Av teimum búgva uml. 35–40.000 í Noregi, 6000 í Finnlandi, 15–20.000 í Svøríki og 2000 í Russlandi. Tølini eru tó óneyv og byggja á metingar. Til eru kanningar, sum benda á, at talið er lágt sett og at nógv fleiri hava røtur í sámiska fólkinum, men mong vita tað kanska ikki ella vilja ikki kennast við tað.

Mett verður, at harumframt eru um leið 20.000 sámar, sum duga nakað av sámiskum. Sámisku málini á Kolahálvoynni eru tó álvarsliga hótt. Bara nøkur fá eldri fólk tala tersámiskt og akkala-sámiskt, eftir øllum at døma færri enn 30, og vandi er fyri máldeyða. Kildinsámiskt er tað málið, ið flest tala í økinum, eini 600–700 fólk. Skoltsámiskt verður bara talað av reiðiliga 20 fólkum í Russlandi, men tey flestu, ið tala skoltsámiskt, búgva í Finnlandi. Av teimum 2000 sámunum í Russlandi duga eini 35–40% sámiskt, mest kildin-sámiskt. Eystursámisk mál í Finnlandi eru enaresámiskt og skolt-sámiskt. Um 500 fólk tala hvørt teirra.

Norðursámiskt verður talað bæði í Finnlandi, Svøríki og Noregi. Ætlandi tala eini 16–18.000 fólk norðursámiskt, 9–10.000 teirra í Noregi, 5–6000 í Svøríki og um leið 2000 í Finnlandi. Kanska eini 85–90 % av øllum, ið tala sámiskt, tala norðursámiskt.

Lulesámiskt verður talað í Svøríki og Noregi av uml. 800 fólk-um, íroknað tey, ið tosa arjeplogssámiskt.

Umesámiskt tala eisini bara nøkur fá eldri fólk, so tað stendur til at doyggja út, men tað veruliga suðursámiska tala eini 600–800 fólk í Noregi og Svøríki.

Bygnaðurin í sámiskum

Sagnorðabending

Sámiskt er eitt bendingaríkt mál. Sagnorð verða bend eftir grund-liðinum og hava tískil 9 ymisk snið í nútíð, av tí at sámiskt umframt eintal og fleirtal hevur *tvital*. Niðanfyri verður víst, hvussu *borrat* (eta) verður bent. Øll dømini eru úr norðursámiskum.

(mon) boran	(eg) eti
(don) borat	(tú) etur
(son) borrá	(hann/hon) etur
(moai) borrre	(vit báðir/báðar/bæði) eta
(doai) borrabeahtti	(tit báðir/báðar/bæði) eta
(soai) borraba	(teir báðir/tær báðar/tey bæði) eta
(mii) borrrat	(vit) eta
(dii) borrabehtet	(tit) eta
(sii) borret	(teir/tær/tey) eta

Stovnskifti

Eitt fyribrigdi í sámiskum málum er sokallaða stovnskiftið, sum ger, at hjájóð í stovninum í bending skifta í longd, t.d. *bo<u>r</u>at-bo<u>rr</u>á* (sí dømið omanfyri) ella í eginleika, t.d. *loddi* 'fuglur'- *lotti* 'fugls'. Tað eru nógv sovorðin merkingarberandi *hjáljóðaskifti* í sagnorða-, navnorða- og lýsingaorðabending. Ein sannroynd, ið stuðlar hugsanini um, at suðursámiskt hevur skilt seg frá hinum sámisku málunum rættiliga tíðliga í tíðini, er, at suðursámiskt er einasta sámiska avbrigdi, ið ikki hevur stovnskifti.

Fallbending

Sámiskt hevur nógva fallbending í navn-, lýsingar- og talorðum í staðin fyri fyrisetingar, t.d. (saN) *váris* ('í fjøllunum'), sum er eitt fallsnið (staðarfall) av *várri* ('fjall'). Til eru *sjey føll* í sámiskum. Í norðursámiskum eru hvørfall og hvørsfall samanrunnin og eisini eru elativ og inessiv runnin saman í eitt og verða nevnd staðarfall.

hvørfall	sápmi	sámi
hvørsfall	sámi	sámans
hvønnfall	sámi	ein sáma
illativ (innfall)	sápmái	til ein sáma
elativ (úrstaðarfall)	sámis	frá einum sáma
inessiv (ifall)	sámis	hjá einum sáma
komitativ (fylgisfall)	sámiin	við einum sáma
essiv (verufall)	sápmin	so sum/líka sum ein sámi

Í sámiskum er hvørki bundið ella óbundið *kenniorð* og t.d. kann *sápmi* merkja 'sámi' 'sámin' ella 'ein sámi' – alt eftir samtekstinum.

Í roynd og veru eru einstakar *fyrisetingar* í sámiskum, t.d. *<u>birra dálu</u>* (uttan um húsið), men vanligari eru »*eftirsetingar*,« ið standa aftan fyri høvuðsorðið, t.d. dálu duohken (aftur um húsið ['húsins afturum']) .

Fallskipanin hevur eisini við sær, at *orðaraðið* ikki er so avgerandi fyri merkingina, sum eitt nú í svenskum. Í setninginum *Niila oaidná*

Máhte (Nils sær Mattias) er tað Nils, ið sær Mattias, sama um orðaraðið var eitt annað, t.d. *Máthe oaidná Niila*. Orðið *Máhte* stendur í hvønnfalli og er tí ávirki í setninginum, men *Niila* stendur í hvørfalli. Tað vanligara er tó, at grundliðurin stendur framman fyri ávirkið. Hetta er eisini fyri ein part galdandi fyri føroyskt, t. d. *Teir fóru avstað, men Heina læt Jógvan verða eftir,* (tú kanst býta Heina og Jógvan um, uttan at setningurin skiftir merking). Broytingin í orðaraðnum broytir ikki merkingina, men kann tó ávirka stílin og deplingina. Tað ber tó ikki til at siga, at mark er ikki fyri frælsinum í sámiska orðaraðnum.

Orðaavleiðsla

Margfeldið í orðasniðum kemur eisini av møguleikanum fyri at evna nýggj orð við endingum, sonevndum *avleiðslum*. Úr sagnorðinum *borrat* ber til at evna seinni nevndu orð við avleiðslum:

borralit	eta skjótt
borastit	eta lítið
boradit	eta (eina máltíð)
borahit	mata (onkran)
borahallat	verða bitin
borrojuvvot	varð etin

Umframt at gera sagnorð burtur úr sagnorðum ber eisini til at gera navnorð burtur úr sagnorðum, t.d. ber til úr *borrat* at gera *borramuš* (’tað at eta’, t.e. matur/át). Nógvir møguleikar eru at gera nýggj orð við avleiðslu, men ikki eru allar avleiðslur líka virknar; tað merkir, at mark er fyri, hvørji avleiðslur kunnu nýtast. Nýggj orð verða gjørd alla tíðina, m. a. við avleiðslu, t.d. *dieđáhus* (kunning) av *dieđihit* (kunna), *bagadeaddji* (vegleiðari/ráðgevi) av *bagadit* (vegleiða/ráðgeva), *čoavddus* (loysn (á trupulleika)) av *čoavdit* (loysa), *čálán* (skrivari, enskt: prentari) av *čállit* (skriva). (Sí seinni um serlig tekn í sámiskum).

Eitt serligt sagnorð er *noktingarsagnorð*, ið verður nýtt í noktandi setningum, t.d. *mon in dieđe* (eg veit ikki). Noktingarsagnorðið bendist í persónum, men høvuðssagnorðið *dieđe* av *diehtit* (vita) stendur í navnhátti og er óbent. Í tátíð verður ein annar navnháttur nýttur.

mon in dieđe	eg veit ikki
mii eat dieđe	vit vita ikki
mon in diehtán	eg visti ikki
mii eat diehtán	vit vistu ikki

Tíð og háttur

Umframt nútíð og tátíð verður – eins og í norðurlendskum – eisini bent í núlidnari og tálidnari tíð (í lýsingarhátti), sum verður gjørt við hjálparsagnorðinum *leat*. Í sámiskum verður hjálparsagnorðið bent í bæði persóni, tali og tíð. Soleiðis er eisini í føroyskum, men bendingarsniðini eru tó færri. Í núlidnari tíð verður hjálparsagnorðið bent í persóni, men ikki í tálidnari tíð.

son lea oastán ođđa biila	hann/hon hevur keypt nýggjan bil
mon lean oastán ođđa biila	eg havi keypt nýggjan bil
son leai oastán ođđa biilla	hann/hon hevði keypt nýggjan bil
mon ledjen oastán ođđa biilla	eg hevði keypt nýggjan bil

Søguháttur skilar til, at tað, sum sagt verður, er satt. Ein annar háttur er *boðsháttur*, ið gevur boð um ella manar. T.d. *Boađe sisa!* (kom inn! – sagt um eittans fólk). Sagt um tvey hevði tað itið: *Boahtti sisa!* Vóru upp aftur fleiri, æt tað: *Bohtet sisa!*

Harafturat eru sagnorðasnið í *treytarhátti*, sum m.a. seta treytir á, t.d. *mon vuolggášin dohko, jus…* (eg skuldi farið hagar, um…) og potentialis = *møguleikaháttur*, sum vísir á iva/møguleika, t.d. *in dieđe boađeš gu son ihttin* ((eg) veit ikki, um hann kemur í morgin). Hetta merkir, at úr einum sámiskum orði, t.d. borrat (eta), ber til at fáa 45 ymiskar bendingar.

Stavskipan og málljóð:

Tað norðursámiska stavraðið hevur hesi tekn:

a á b c č d đ e f g h i j k l m n ŋ o p r s š t ŧ u v z ž

Sjálvljóðið *á* er eitt langt sjálvljóð og kann skilja ímillum t.d. *manná* 'hann fer'og *mánná* 'barn'. Sjálvljóðið *o* verður framborið sum eitt svenskt å-ljóð og *u* sum eitt svenskt o-ljóð, t.d.

loddi	[låd.di]	fuglur
unni	[on.ni]	lítil

Punktumið er mark millum stavilsi

Stavurin *c* merkir eitt tse-ljóð og *č* umboðar eitt tje-ljóð og *z* og *ž* eru tilsvarandi raddað ljóð, dømi:

čáhci	[tjah.tsi]	vatn
vázzit	[vad.dsit]	ganga/fara
oažžut	[oad.dtjot]	fáa

Stavurin *š* svarar til eitt sje-ljóð, dømi:

šaddu	[sjad.do]	vøkstur

Stavirnir *đ* og *ŧ* eru ávikavist raddað og óraddað lespuljóð, dømi: (sum í enska *bathe* mótvegis *bath*)

lieđđi	[liedh.dhi]	blóma
muoŧŧá	[muoth.tha]	mostir

Skriftmál

Tann fyrsta sámiska bókin varð prentað í 1619. Tað var ein prestur í Piteå, Nils Andersson, sum hevði týtt eina ABC-bók og eina lítla altarbók til vánaligt suðursámiskt. Flestu bøkur, sum vórðu útgivnar á sámiskum fyri 20. øld, vóru týðingar av bíbliuni ella aðrar kirkjubøkur.

Í 18. øld mentist eitt bókmál, tað sonevnda *suðurlapplendska bókmálið*, sum bygdi á tað norður-suðursámiska og var hugsanin, at tað skuldi vera skriftmálið fyri allar sámar. Í kirkju og skúlaverki hevði tað suðurlapplendska eina sterka støðu eisini í 19. øld, og lærubøkur vórðu framvegis givnar út í seinnu helvt av 19. øld. Men um aldaskiftið steðgaði útgávan á suðurlapplendskum bókmáli.

Tann fyrsta norðursámiska bókin, ein katekismus, varð prentað í 1728 í Noregi. Stavsetingina gjørdi presturin Knuud Leem, sum eisini gav út bæði mállæru og orðabøkur. Seinni, í 19. øld, menti presturin Nils V. Stockfleth eina nýggja norðursámiska stavseting við serligum sámiskum stavum. J. A. Fris (sum varð professari í sámiskum og finskum á Universitetinum í Oslo í 1826) gjørdi eina stóra norðursámiska orðabók, sum kom út í 1887.

Konrad Nielsen evnaði eitt *norðursámiskt standardmál* við støði í finnmarkarsámisku málbrigdunum, og stóra orðabók hansara kom út í 1926-29. Við skriftmálinum hjá Nielsen sum grundarlag varð ein norðursámisk stavseting gjørd í 1948 (sum byggir á málførið, ið verður talað í Guovdageaidnu). Tað vóru Knut Bergsland og Israel Ruong, sum sjóðaðu stavsetingina saman eftir svenskum og norskum fyrimyndum. Í Finnland varð um somu tíð nýtt ein onnur stavseting fyri norðursámiskt, sum Paavo Ravila grundaði í 1930- árunum og Erkki Itkonen bøtti um í 1950-árunum.

Í 1970-árunum gjørdi Sámiska málnevndin eina felags stavseting fyri norðursámar í bæði Noregi, Svøríki og Finlandi, sum er góðtikin av Sámatinginum og hevur síðan 1979 verið nýtt í øllum trimum londunum. Í norðursámisku stavsetingini verða nýttir serligir stavir (č, đ, ŋ, š, ŧ, ž), sum ikki eru í suðursámiskum og lulesámiskum.

Nú eru seks ymiskar stavsetingar fyri sámisk mál. Umframt norðursámiskt skriftmál eru suðursámiskt (góðkent í 1978), lulesámiskt (1983), enaresámiskt, skoltsámiskt og kildinsámiskt. Kildinsámiskt byggir á kyrilliskt stavrað.

Støðan hjá málinum í samfelagnum

Sámiskt verður mest nýtt millum skyldfólk og vinir og í siðbundnari vinnu, t.d. reindjórahaldi. Tey seinnu árini er nýtslan tó vaksin á øðrum økjum, eitt nú í fjølmiðlum, umsiting og undirvísing. Hetta kemst av, at sámar vita betur og betur til sín mentanarliga og málsliga – tí hevur sámiska mentanarkollveltingin í 1970-árunum slóðað fyri. Í 1970-árunum hoyrdust jojk og sámiskur tónleikur alment á fyrsta sinni, og sámisk skøld lósu yrkingar sínar upp fyri áhoyrarum, og sámiskt kom at vera nýtt í bókum og var at hoyra í ymsum nýggjum høpi.

Málnýtslan millum húsfólkið er avgerandi treytin fyri at varðveita málið. Um foreldrini tala sámiskt við børnini, læra tey málið. Men tað er eisini neyðugt, at málið verður nýtt í øðrum høpi, fram um alt í skúla og undirvísing. Tað er neyðugt, at undirvíst verður so mikið í sámiskum, at málið kann mennast natúrliga. Eitt annað øki eru fjølmiðlar og serliga útboðið í sjónvarpi og bløðum. Ein góð málmenning er eisini treytin fyri einum nøktandi útboði av bókmentum. Viðurskiftini hesum viðvíkjandi eru ólík í teimum ymsu sámisku málunum í teimum ymsu londunum.

Lóggáva

Ikki øll sámisku málini fáa somu sømdir. Norðursámiskt verður vart við lóg bæði í Noregi, Svøríki og Finnlandi innan fyri ávíst lendi. Løgfestingin gevur sámum rætt til at nýta sámiskt í samskifti við myndugleikar, sum hava ábyrgd av spurningum, ið viðvíkja teimum.

Í Noregi hevur sámiskt løgfest rættindi í ávísum kommunum, har norðursámiskt verður talað, og í Finnlandi fatar lógin um eitt lendi, har enare- og skoltsámiskt verður talað umframt norðursámiskt. Í Svøríki er lóggávan galdandi fyri lule- og norðursámiska økið.

Lóggávan verjir sostatt ikki lulesámiska økið í Noregi og als ikki suðursámiskt, hvørki í Noregi ella Svøríki. Í Russlandi hevur sámiska málið ongar løgfestar sømdir.

Mállóggávan hevur serliga í Noregi eggjað til umfatandi málsligt virksemi, eitt nú at týða skriv og skjøl. Í Svøríki hevur lógin ikki havt stórvegis týdning fyri samskiftið við myndugleikarnar, sum eru undir hesi lóggávu. Tað kemur fyri ein stóran part av, at sámar eru óvanir við at nýta tolk. Í staðin fyri at nýta sítt besta mál, tala teir svenskt, sum teir duga nógv verri ... Á Umeå universiteti verða tolkar nú útbúnir, og tað skuldi ført til, at tað verður vanligari at hava tolk, tá ið sámar koma í samband við myndugleikarnar.

Sámiskt í skúlanum

Tað er eisini stórur munur á sámisku málunum, tá ið ræður um útboð av frálæru og útbúgving. Sámiskt hevur verið lært á grundskúlastigi í Svøríki, Noregi og Finnlandi í fleiri 10 ára skeið og eisini á studentaskúlastigi, tó mest í Noregi. Í Svøríki eru serligir sámaskúlar við ársskeiðunum 1-6. Sámaskúlarnir hava í sínari undirvísing innihald og tilfar, sum er lagað eftir sámiskum viðurskiftum. Í nøkrum teirra er sámiskt undirvísingarmál. Í skúlunum í Guovdageaidnu og Kárášjohka (í Noregi) er sámiskt eisini undirvísingarmál; sama er galdandi fyri Ohcejohka í Finnlandi. Møguleikarnir at fáa frálæru í lulesámiskum og serliga suðursámiskum hava verið avmarkaðir, og útboðið hevur verið nakrir fáir tímar um vikuna.

Tað hevur leingi verið undirvíst í norðursámiskum á fróðskaparsetrum bæði í Noregi, Svøríki og Finnlandi, men onnur sámisk mál hava verið verri umboðað, lule- og suðursámiskt í Umeå og Uppsala (í Svøríki) og í Tromsø (í Noregi), enaresámiskt í Oulu (í Finnlandi). Norðursámiskt ber til at lesa á sámiska háskúlanum, Sámi Allaskuvla, í Guovdadageaidnu, á fróðskaparsetrunum í Tromsø, Umeå, Uppsala, Oulu og Helsingfors.

Sámiskt í fjølmiðlunum

Fjølmiðlaútboðið er ymist. Tvey norðursámisk bløð verða útgivin í Noregi, *Min Áigi* (Okkara tíð) og *Áššu* (Glóð). Fyrr nevnda blaðið varð, sum ein roynd, útgivið í einum lulesámiskum upplagi eina ferð um vikuna, men tað datt niðurfyri eftir nøkrum mánaðum.

Útvarpssendingar, fyri tað mesta á norðursámiskum, eru dagliga bæði i Noregi, Svøríki og Finnlandi. Bæði í norska og svenska partinum verður sent regluliga á lule- og suðursámiskum og í finska partinum á enare- og skoltsámiskum. Í russiska partinum eru tey nú farin at senda á kildensámiskum, eftir at samstarv er tikið upp við norðurlendsku sámaútvarpsdeildirnar. Russiskir sámar hava fingið útbúgving til at senda.

Í felag gera Noreg, Svøríki og Finnland 15 minuttir langar tíðindasendingar til sjónvarp, sum verða sendar frá mánadegi til fríggjadag. Eisini verða barnasendingar gjørdar í sámisku sjónvarpsdeildunum, og tær verða sendar regluliga.

Bókmentir og tónleikur

Sjálvt um tann fyrsta bókin varð prentað á sámiskum í 1919, so leið heilt út í byrjanina á 20. øld, áðrenn sámiskir rithøvundar fóru at skriva á sámiskum. Í Noregi skrivaði Anders Larsen skaldsøguna *Beaivvi álgu* (Sólarrenningin), sum varð givin út í 1912. Í Finnlandi kom yrkinga- og stuttsøgusavn Peter Jalvits *Muohtačalmmit* (Kavaflykrur) út í 1915. Upp aftur størri týdning hevði bók Jóhan Turkis *Muitalus sámiid birra* (Søgan um sámarnar), sum varð givin út á fyrsta sinni í 1910. Nevndu bøkur eru allar givnar út av nýggjum og verða nýttar eitt nú í undirvísing á fróðskaparsetrum.

Frá 1970 og frameftir hava fleiri sámiskir rithøvundar givið út bøkur bæði í Noregi, Svøríki og Finnlandi, m.a. Paulus Utsi, Nils Aslak Valkeapää, Kirsti Paltto og Elle Marja Vars. Av teimum hevur Nils Aslak Valkeapää (sum á sámiskum æt Áillohaš) verið tann mest virdi, bæði sum høvundur, listamaður og jojkari. Hann fekk í 1991 bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins fyri yrkingasavnið *Beaivi áhčážan* (Sólin, faðir mín) frá 1988.

Í eini yrking lýsir Paulus Utsi lív sítt við náttúrumyndum.

Reagganan ráhkisvuohta	**Svíðandi kærleiki**
Nu go roaŋkesoahki	Sum ein krókut bjørk
orru duottarravddas	við fjalsins trom
nu lea biegga botnjan	so er mítt lív
mu nai eallima	av vindi bart
Nu go soagi mátta	Sum bjarkarbulur
bievlla vuostá čuovgá	lýsir mót berum lendi
nu ohcalan váriide	so leingist mær at fjøllunum
láguide ja oruhagaide	fløtunum og býlunum
Dat lea mu eallin	Har er mítt lív
man mon ráhkistan	sum eg elski.

Jojk og annar sámiskur tónleikur hevði eitt rættiligt frambrot í 1970-árunum, og á odda fyri menningini stóð áðurnevndi Nils Aslak Valkeapää. Hann gav út eina plátu við jojkum, har siðbundin joik vórðu stuðlað av ljóðførum. Pláta hansara hevði slíka frambrotsstyrki millum sámar, at hon eggjaði ungum sámum at framføra joik og sámiskar sangir á palli. Síðan helt hann fram at menna sámiska tónleikin og gav út fleiri fløgur við sámiskum joiki við fylgispæli. Nú er eitt ótal av sámiskum tónleikarum, og teir kendastu eru Maria Boine (sum fekk tónleikavirðisløn Norðurlandaráðsins í 2003) og Wimme Saari, sum bæði hava givið fleiri fløgur út.

Á hvørjum ári í nógv ár hevur ein tónleikakapping verið í Guovdageaidnu um páskirnar, har tónlistafólk kappast í tveimum flokkum, joiki og sámiskum tónleiki. Áhugin fyri kappingini er vaksin so líðandi, og nú eru tónleikarar úr næstan øllum Sápmi við. Tónleikurin hevur sostatt fingið týdning fyri útbreiðsluna og nýtsluna av sámiskum í samfelagnum.

Samfelagið annars

Yvirhøvur hevur norðursámiskt eina sterka støðu í samfelagnum samanborið við onnur sámisk mál og málføri. Í Guovdageaidnu og Kárášjohka í norska partinum og Ohcejohka í finska partinum (alt í norðursámiska økinum) eru sámar í kommunustýrinum. Nýtslan

av sámiskum er vaksin eitt nú í fyrisitingini seinastu 10 árini, m.a. málnevndini fyri at takka. Á kortunum í fjallalendinum standa nú sámisk staðarnøvn á tí málførinum, sum verður tosað í økinum, og vegskeltini hava eisini sámisk nøvn, t.d. *Giron* (Kiruna).

At serskild sámating eru sett á stovn í Noregi, Svøríki og Finnlandi, hevur eisini verið ein týðandi táttur. Sámatingsins stjórnarlimir verða valdir av teimum fólkum, ið hava talurætt í sámatinginum í hvørjum landi sær og eru á tann hátt fólkavalda stjórn sáma í avvarðandi landi.

Sámatingini hava m.a. í felag stovnað eina málnevnd, sum tekur sær av málspurningunum í samfelagnum. Í hesi málnevndini eru eisini umboð fyri teir russisku sámarnar.

Týtt úr svenskum hevur Óli Jákup Niclasen

Bókmentir

Hyltenstam, Kenneth, Christopher Stroud & Mikael Svonni (1999): »Språkbyte, språkbevarande, revitalisering. Samiskans ställning i svenska Sápmi«. I: Kenneth Hyltenstam (red.): *Sveriges sju inhemska språk – ett minoritetsspråksperspektiv*. 41-97. Lund: Studentlitteratur.

Korhunen, Olavi (1997): »Hur samiskan blev samiska«. I: Eva Westergren & Hans Åhl (red.): *Mer än ett språk. En antologi om två- och trespråkigheten i norra Sverige*. 79-115. Norstedts ordbok.

Magga, Ola Henrik (1997): »Samisk språk«. I: *Språkene i Norden*. Utgitt af Nordisk språksekretariat. 137-160. Oslo: Novus.

Sammallahti, Pekka (1998): *An Introduction to Saami Languages*. Kárášjohka: Davvi Girji.

Internet

Samiske studier, Umeå universitet:	www.umu.se/samiska
Sámi Allaskuvla, Guovdageaidnu:	www.samiskhs.no
Giellagas, Oulu universitet:	www.giellagas.oulu.fi
Samiske studier, universitetet i Tromsø:	www.sami.uit.no
Nordisk samisk institut, Guovdageaidnu:	www.nsi.no
Sámatingið í Svøríki:	www.sametinget.se
Sámatingið í Noregi:	www.samediggi.no
Sámatingið í Finnlandi:	www.samediggi.fi

CARL CHRISTIAN OLSEN

Kalaallisut – grønlendskt

Grønlendska málið verður nevnt *kalaallit oqaasii* ella *kalaallisut*. Umleið 50.000 fólk tala málið; teirra millum eru eisini tvímælingar, ið hava danskt sum hitt málið. Kalaallisut er í ætt við fleiri onnur eskimoisk mál og er partur av *eskaleutisku málættini*, har eskimoiskt og aleutisk eru høvuðsgreinarnar (sí 1. mynd).

Viðurskiftini millum talu- og skriftmál

Sum í øllum øðrum málum verður skilt ímillum *talumálið kalaallisut* við fleiri høvuðsmálførum, sum tó eru sínámillum fatilig, og *skriftmálið kalaallisut*. Grønlendska skriftmálið, ið allir grønlendingar nýta, virkar sum øll onnur standardmál og verður brúkt í útbúgvingarverkinum, í yrkis- og fagurbókmentum, í prentaðum miðlum og til teksting í sjónvarpi.

Upprunaliga varð skriftmálið ment við støði í málførunum í Miðvesturgrønlandi, har ið Nuuk liggur, og har var og er eisini týdningarmesti lærustovnurin í Grønlandi, læraraskúlin Ilinniarfissuaq. Haðani kom eisini fyrsta íkastið í grønlendska bókmentaheimin í 1860.

Allir grønlendingar skilja tað núverandi skriftmálið, tí at orðfeingið er ment við íkasti úr málførunum fyri sunnan og fyri norðan og frá Avenersuaq (Thule) og Tunu (Eysturgrønlandi). Í Eysturgrønlandi eru tey bæði ráðandi málføraøkini Ammasalikleiðin og Illoqqortoormiutleiðin (Scoresbysund). (Vit venda aftur til skriftmálsmenningina í síðsta parti).

Tó at fjarlagnastu málførini ikki eru sínámillum fatilig í fyrstu syftu, er málbygnaðurin hin sami allastaðni. Tey flestu skilja tí hvør annan eftir stuttari tíð.

1. mynd: Til samans tala 150.000 fólk Inuitmálini; teirra millum eru eisini fólk, ið eru flutt til USA, Suðurkanada, Danmarkar og stórbýarøkini í Russlandi

Illoqqortoormiut
(Scoresbysund)
I
III
Avanersuaq
I
Ammassalik
II
X
IV
V
IX
VIII
VII
VI

Grønlendsk málføri

Í Grønlandi eru trý høvuðsmálføri: Í Aversuaq (Norðurgrønlandi), Tunu (Eysturgrønlandi) og Kitaa (Vesturgrønlandi).

Innan fyri nevndu máløki eru fleiri undirmálføri, serliga í Vesturgrønlandi. Frá Upernavik fyri norðan til Umánarssuaq (Hvarvið) fyri sunnan er málsligur ymiskleiki bæði í framburði, orðavali og tónalag, og á ávísum leiðum eru eisini bendingar- og orðalagsfrávik, t.e. at aðrar reglur eru fyri orða- og setningagerð.

Hvussu eitur tað á grønlendskum?

Tá ið tosað verður um Grønland, er at hava í huga, at Grønland er eitt navn, ið fólk, ið eru komin uttaneftir, hava givið landinum, nevniliga fyrstu norðbúgvar, ið komu hagar úr Noregi umvegis Føroyar og Ísland í árinum 982. Á kalaallisut eitur landið *Kalaallit Nunaat*. Grønlendingar hava sjálvir onnur heiti fyri landsins íbúgvar, sum eisini verða nýtt her:

Inuk/inuit

inuk, í fleirtali *inuit,* er tað heiti, ið grønlendingar og aðrar *inuit*-tjóðir nýta um seg sjálvar. Orðið merkir 'menniskja'. Av fólki uttaneftir hava grønlendingar yvirhøvur verið nevndir eskimoar, men her í Føroyum man heitið 'skrælingar' vera væl kent.

Eskimo

Orðið verður hildið at stava frá indianska málinum, sum nú verður talað í landslutinum Québec í Kanada. Teir fyrstu, ið nýttu heitið, vóru jesuitta-trúboðarar í 17. øld. Ein tulkingin av orðinum er 'tey, ið eta rátt kjøt', og hon er tann trúligasta. Ein onnur heldur marghátlig tulking setur orðið í samband við orðið 'ekskommunikeraður' (t.e. burturvístur frá katólsku kirkjuni).

Kalaaleq

Kalaaleq, í fleirtali: *kalaallit*. Eingin veit, hvaðan orðið stavar, men tað verður nýtt um grønlendingar. Kanska stavar heitið frá, at tey fyrstu, ið komu til Grønlands, hildu, at landfast var ímillum Grønland og Karelia í Finnlandi, haðani nógvir hvalaveiðimenn komu. Poul Egede, sonur norska prestin Hans Egede, nevnir í orðabók síni, at grønlendingar kalla seg sjálvar inuit, men fyri fremmandum nevna teir seg karalit (karelar/kalaallit).

Leingi hevur verið granskað í søgu Grønlands, og forn- og málfrøðingar halda nú, at grønlendska búsetingin er farin fram í fýra umførum. Í øllum førunum eru tað eskimoar, eisini nevndir skrælingar, ið hava nomið land. At tað hava verið fýra búsetingar, sigur eitt sindur um, hvussu baldrut viðurskiftini hava verið tá á døgum. Nevndu búsetingar verða fyri ein part endurspeglaðar í málførunum.

Eyðkenni fyri grønlendska málið

Eitt samsetingarmál (agglutinerandi mál)

Grønlendska málið er ógvuliga ólíkt vesturevropeisku málunum, eisini teimum, ið vit kalla fremmandamál, eitt nú týskum, enskum, sponskum og fronskum. Í hesum londum eru orðini stutt og hava bert hendingaferð meir enn ein stovn. Dømi um samanseting er orðið vínglas, ið er sett saman av stovnunum 'vín'og 'glas'. Men á grønlendskum eru ofta fleiri stovnar í einum orði, og tí verða orðini long og torgreidd.

Eitt slíkt mál, har stovnarnir verða límaðir saman, eitur á fremmandamáli *agglutinerandi mál* (sbr. *glue* á enskum). Á føroyskum siga vit, at málið er eitt samsetingarmál. Hetta er vanligt úti í heimi, men ikki í Evropa.

Samansett og torgreidd orð

Sum dømi um samansett orð, ið svarar til ein heilan setning á norðurlendskum, kunnu vit taka: Silagissiartuaarusaarnialerunarpoq. Tað slíta vit sundur í:
Sila-gi-ssi-artu-aa-rusaar-nia-ler-unar-poq:
veður-gott-verður-fer hagar-seint líðandi-ætlar-byrjar-óivað-1.pers. eintal (líkt er til, at veðrið fer at batna so líðandi). Sí brotið um bendingarviðurskifti.

Eitt ergativt mál

Eitt annað eyðkenni fyri kalaallisut er, at tað er eitt ergativt mál. Eitt fyribrigdi, ið viðvíkur fallbending í ávikavist ávirkandi setningum (setningum við bæði grundliði og ávirki) og óávirkandi setningum (setningum við ongum ávirki). Í Vesturevropa er ergativitetur bert í grønlendskum og baskiskum.

Í hvør-hvønnfalsmálum sum latíni, týskum og føroyskum stendur grundliðurin bæði í ávirkandi og óávirkandi setningum í hvørfalli og ávirkið – tá ið tað er – stendur í hvønnfalli (á føroyskum tó onkuntíð í hvørjumfalli). Í einum ergativum máli standa grundliðurin í einum ávirkandi setningi og grundliðurin í einum óávirkandi setningi hvør í sínum falli. Setningsbygnaðarliga seta ergativ mál grundliðin í einum óávirkandi setningi javnt við ávirkið í einum ávirkandi setningi. Tað merkir, at grundliður í óávirkandi setningi hevur sama fall sum ávirkið í ávirkandi setningi – men grundliðurin í einum ávirkandi setningi hevur sum áður sagt eitt annað fall, sum vit áður nevndu ergativ, men sum nú verður nevnt relativ.

Ávirkandi og óávirkandi setningar

Í setninginum: 'Pætur etur kjøtið' hevur orðið 'Pætur' (*Piitaq* er tøkuorð) sniðið *Piitap* við endingini *-p*, tí tað er grundliður í einum ávirkandi setningi: *Piitap neqi nerivaa*. Sagnorðsendingin *-vaa* vísir, at orðið er eitt ávirki (*neqi* er sami stovnur sum *neri* og merkti upprunaliga 'at eta kjøt').

Í setninginum 'Pætur etur' (óávirkandi setningur) er Pætur absolutiv og setningurin ljóðar: *Piitaq nerivoq*. Endingin *-voq* í sagnorðinum sigur frá, at setningurin er óávirkandi.

Bendingarviðurskifti

Vit kunnu taka saman um orðbygnaðin í kalaallisut við hugtøkunum: stovnur, eftirskoyti og ending.

Sum í øðrum málum vísir ein *stovnur* til 'okkurt í tilveruni', lut ella virki, men á kalaallisut eru stovnarnir ikki frammanundan skildir sundur í navnorð og sagnorð. Orðið neri (eta), sum vit hava brúkt í døminum omanfyri, er ein sovorðin stovnur.

Endingarnar svara til endingar í vesturevropeiskum málum, serliga teimum, ið hava persónendingar. Í týskum hevur 2. persónur í eintali endingina -st (í føroyskum eru bæði umljóð og skiftandi endingar). Í kalaallisut er *-punga* eyðkenni fyri 1. persón í eintali. Gevið tó gætur, at í kalaallisut verður skilt ímillum sagnorð, ið eru ávirkandi og sagnorð, ið ikki eru. Tey hava ymsar persónendingar, sí brotið um ergativitet.

At enda koma vit til tað, sum vit, fyri at gera tað lættari, fara at nevna eftirskoyti og sum í kalaallisut verður nýtt til at greiða nógv ymisk viðurskifti, sum vit í norðurlendskum nýta hjálparsagnorð (kundi, átti, skuldi, hevði, mátti) ella lýsingarorð til.

Grønlendskur orðbygnaður

Vit kunnu nú lýsa bygnaðin í grønlendskum orðum soleiðis:

{stovnur-	x ferðir ískoyti-	endingar}

Eftir hesum tríbýti kann eitt grønlendskt orð síggja soleiðis út:

Neri-	artor-nia-ler-	punga

Týtt lið fyri lið:

(eta)	(flyta seg yvir-ætlar byrjar)	(1. pers. eint. við ongum ávirki)

Orðarøtt týðing:

'eg ætli at byrja at fara yvir fyri at eta'

Merking:

'eg fari yvir at eta'

Tað ber til innan fyri orðsins rammur at broyta útsøgnina næstan óavmarkað eftir tørvi. Ískoyti kunnu stigbenda, bregða frá, tíðarfesta, sanna/avsanna o.s.fr.

Omanfyri sóu vit dømi um eitt orð, sum í føroyskum svarar til ein heilan setning. Orðið hevði ein stovn til støði, fleiri eftirskoyti og eina persónending. Men endingar kunnu eisini knýta seg at stovnum og t.d. tilskila fall. Tá verður stovnurin at skilja sum eitt navnorð.

Fallbending:

Kalaallisut hevur, sum nevnt í brotinum um ergativ mál, tvey høvuðsføll, nevniliga absolutiv og relativ

Absolutiv

Piitaq nerivoq: 'Pætur etur'

(*Piitaq* stendur her í absolutiv, tí eingin ávirkisliður er í sagnorðinum)

Relativ

Piitaþ neqi nerivaa: 'hann etur tað', 'Pætur etur kjøtið'

(*Piitaq* er nú relativ, og orðið er broytt til Piitaþ, tí ávirki er í setninginum, sum sæst á sagnorðsendingini *nerivaa*)

– men tað eru eisini 6 minni føll, sum greiða viðurskifti, sum á norðurlendskum verða greidd við fyrisetingum:

- **Hvarfall**

  -mi (svarar til hvørjumfall á føroyskum, lokativ á russiskum)

  Piitaq Nuummi (Nuuk + mi) *inuuvoq*:

  'Pætur er føddur í Nuuk'

- **Hvagarfall**

  -mut (svarar til hvønnfall á týskum og latíni, hvønn/hvørsfall á føroyskum)

  Umiarsuaq Qaanaamut (Qaanaaq + -mut) *tikippoq:*

  'Skipið/eitt skip er komið til Quaanaaq'

- **Hvaðanfall**

  -mit

  Timmisartoq Københavnimit (København + -mit) *aallarpoq:*

  'flogfarið fór úr Keypmannahavn'

- **Miðilsfall**

  -mik (svarar til instrumentalis á russiskum)

  Allunaasaq savimmik (savik 'knivur' + -mik) *kipivaa:*

  'Hann/hon kvettir endan við knívi'

• **Samanburðarfall**

-tut

Qulleq seqinertut (seqineq 'sól' + -tut) *qaamatiginngilaq:*

'Lampan er ikki so bjørt sum sólin'

• **Farleiðarfall**

-kkut

Aqqusinikkut (aqqusineq 'vegur' + -kkut) *þisuppunga:*

'eg gangi eftir vegnum'

Nú er at viðmerkja, at hvørki kyn ella binding eru á kalaallisut (tí standa 'hann/hon' og 'skipið/eitt skip' í týðingini frammanfyri.

Persónendingar

Grønlendskt hevur tríggjar persónendingar umframt afturbending (refleksiv) í triðja persóni.

Anaanani napparsimammat atuanngilaq:

'Hann fer ikki í skúla, tí mamma hansara er sjúk'

(*anaana* 'mamma' + *ni* 'sín' *napparsima* 'sjúkur' –*mmat* 'kausativ + 3. pers. eint.' *atua* 'ganga í skúla' + -*nngi* 'ikki' -*laq* 3. pers. í eintali. (kausativ lýsir orsøk)

Napparsimagami atuanngilaq:

'Hann fer ikki í skúla, tí hann er sjúkur'

(*naapparsima* 'sjúkur' + -*ga* 'kausativ' + -*mi* '3. pers. refleksiv (hann)' *atua* 'ganga í skúla' + *nngi* 'ikki'-*laq* '3. pers. eint.')

Piitaq napparsimagami ilaangilaq:

'Pætur er ikki við, tí hann er sjúkur'

(*Pitaq* 'Pætur' *napparsima* 'sjúkur' + -*ga* 'kausativ' + -mi '3. pers. refleksiv (hann)' *ilaa* 'er við' +- *nng* 'ikki'+- *laq* '3. pers. eintal.')

Piitaq napparsimammat þulaarparput:

'Vit vitja Pætur, tí hann er sjúkur'

(Piitaq 'Pætur' *napparsima* 'sjúkur' + -*mmat* 'kausativ 3. pers, eint. (tí hann)' *þulaar* 'vitja' + -parput , ávirkandi 1. pers. fleirtalsgrundliður, 3. pers. eintalsávirki.

Enklitisk ískoyti

Eyðkent fyri øll inuitmál er, at tey hava ein hóp av merkiligum endingum, sum verða skoyttar uppí, eftir at setningurin hevur fingið teir neyðugu liðirnar. Hesi sonevndu *enklitisku* ískoyti eru: -mi (sannandi/áherðandi) *-gooq* (so verður sagt), *-li* (kortini), *-lu* (og), *-luuniit* (ella), *-lusaaq* (sum um), *-taaq* (eisini), -toq (ynski).

Orðsnið við atliti at enklitiskum ískoytum

{Stovnur + x ferðir eftirskoyti + persónendingar}+ enklitisk ískoyti.

ajunngilaq	'tað er gott'
ajunngilarmi	ajunngilaq + -mi (áherðandi): 'tað er gott' (lat fara!)
ajunngilarooq	ajunngilaq + -rooq: 'tað sigst at vera gott'
ajunngilarli	ajunngilaq + -li: 'men væl gekst'
ajunngilarlu	ajunngilaq + -lu: 'og væl gekst'
uanga illilluunniit	uanga ('eg') illit ('tú') + -luuniit: 'eg ella tú?'

Høvuðssagnorð og hjálparsagnorð

Sagnorð á kalaallisut eru til í tveimum sniðum, sum *høvuðssagnorð* og *hjálparsagnorð*. Tey svara tó ikki til sagnorðasnið í norðurlendskum málum, tí at partur av teimum grønlendsku hjálparsagnorðunum lýsir tað, sum nevndu mál lýsa við undirskipaðum setningum.

Dømi um høvuðssagnorð		
søguháttur	pisuppunga	eg fari
spurnarháttur	pisuppa?	fer hann?
boðsháttur	pisugit!	far!
ynskisháttur	pisullanga	lati meg fara
Dømi um hjálparsagnorð		
orsøk	pisummat	tí hann fór
fylgja	pisullunga	meðan eg fari
framtíð	pisukkuma	tá ið eg fari
ávirkandi	takugiga	at eg síggi hann/hana/tað

Menningin av kalaallisut sum skriftmáli

Sum sagt í innganginum er Inuit eingin gomul skriftmentan; skriftmálið er komið uttaneftir.

Eftir tey fyrstu evropeisku sambondini hevur verið roynt at leggja grønlendskt skriftmál í fasta legu. *Hans Egede* (1680-1758) og prestahjálp hansara *Albert Topp* stóðu í 1728 fyri teimum fyrstu skipaðu tiltøkunum at fáa hetta í lag, tá ið teir royndu at týða skapanarsøguna. Sonur Hans Egede, *Poul Egede* (1708-1789), gav út eina orðabók á grønlendskum, donskum og latíni. Poul Egede vaks upp í Grønlandi og dugdi málið frá barni av. Herrnhuttarin *Samuel Kleinschmidt* (1814-1886) gjørdi tó ta fyrstu veruligu rættskrivingina í 1851.

Samuel Kleinschmidt var mætur ljóðfrøðingur, og hann evnaði til eina rættskriving, ið varðveitti nærum sama sniðið á stovnum og eftirskoytum í øllum samansetingum. Tað hevði við sær, at tann grønlendska rættskrivingin gjørdist næstan eins merkingarberandi (morfematisk) og tann núverandi danska, t.e. løtt at lesa, men trupul at stavseta, tí at einki beinleiðis samband var millum ljóð og skrift. Eftirskoytini verða nevniliga framborin ymist, alt eftir umstøðunum.

Rættskrivingin hjá Kleinschmidt varð nýtt til umfevnandi málsligt og upplýsandi virksemi, bæði inneftir mótvegis inuittum og úteftir mótvegis umheiminum. Tann reglufasta rættskrivingin hevði við sær, at grund varð løgd undir eitt veruligt skriftmál. Eitt nú í arbeiðinum at týða alla Bíbliuna var tørvur á at menna grønlendskt orðfeingi á fleiri økjum, t.d. heiti á samfelagsviðurskiftum, náttúruumstøðum og moralhugtøkum, sum ikki vóru til í grønlendskum máli frammanundan.

Í fleiri inuit-málføraøkjum uttan fyri Grønland er Bíblian tað einasta, ið er til í skrift. Men tað, at Kleinschmidt fekk evnað til eina reglufasta rættskriving, gjørdi tað møguligt at skriva allan tekst á grønlendskum, og harvið varð grundin løgd undir tað bókmentaríkidømi, sum skilur grønlendskt frá nógvum øðrum málum í veiðimannamentanum. Nú bar til at skjalprógva egna mentan í skrift, týða partar av heimsbókmentunum og tulka nútíðar Grønland á egnum máli – og fyri ein part eisini at nýta málið í fyrisitingarligum høpi.

Rættskrivingin hjá Kleinschmidt var í nýtslu til 1973, tá ið tann nýggja *ljóðrætta rættskrivingin* varð sett í gildi. Hon gjørdi tað lættari at skriva, tí at skriftin nú meira avspeglar málljóðið. Meginreglurnar í hesari nýggju rættskrivingini gera tað møguligt at skriva øll grønlendsk málførasnið, hóast serligar framburðarreglur mugu gerast í nøkrum heilt serligum førum. Eftir góðkenningina av teirri nýggju rættskrivingini er tann gamla kortini ikki heilt avtikin. Myndugleikarnir hava tó skyldu at nýta ta nýggju rættskrivingina.

Standardgrønlendskt

Við stovnsetingini av Ilinniarfissuaq/Læraraskúla Grønlands í Nuuk og Ilulissat í 1845 varð grundin so smátt løgd undir eitt grønlendskt standardmál; fyrst við eini felags rættskriving, men so við og við gjørdist talumálið eisini eitt sindur standardiserað, so at vit nú rímiliga kunnu tala um standardgrønlendskt. Standardgrønlendskt byggir á tey vesturgrønlendsku málførini, sum nýtt vórðu í undirvísingini á læraraskúlanum. Seinni hevur hetta talumál styrkt sína støðu við orðabókum og mállærum. Málnevnd er eisini í Grønlandi.

Í standardiseringartilgongdini eru m.a. serligar norðurgrønlendskar orðingar um vetrarveiði á ísinum og suðurgrønlendskar orðingar um djórahald og jarðarbrúk tiknar upp í felags orðatilfarið. Tað hevur styrkt grønlendska málið. Lok er lagt á kjakið um, hvør rættskriving skal nýtast sum tann almenna, men samstundis verða málførisfrábrigdi í talumálinum viðurkend. Eitt rugbreyð eitur t.d. alment *iffiaq*, men staðbundin orð eru eisini: *ikkiaq*, *ippiaq*, *tiggaliaq*, *timiusiaq*. Standardisering krevur haraftrat, at nýtt verða felags staðar- og fólkanøvn, men eisini her eru staðbundin frábrigdi loyvd.



Tøkuorð og fremmandaorð

Í grønlendskum málpolitikki verður, sum í øðrum málum, skilt ímillum tøkuorð og fremmandaorð.

Samskifti við ymisk fólk hevur ført nógv ymisk fremmand orð inn í málið. Nevnast kunnu t.d. fimm orð, sum verða hildin at stava frá norðbúgvum:

niisa	nísa
sava	seyður
kuanneq	hvonn
kona	kona
musaq	gularót (sbr. norskt: 'mura', svenskt: 'morot')

Fólk, sum upprunaliga eru komin úr Íslandi, Føroyum, Danmark, Noregi, Fraklandi, Onglandi, Skotlandi, Írlandi, Russlandi, men sum settu seg niður í Grønlandi, eru komin við sínum íkasti til orðatilfarið í kalaallisut á fleiri økjum, t.d. talorðum, tøkniorðum, heitum á tilfari, í siglingarfrøði, landbúnaði, djórahaldi umframt heitum á matvørum og øðrum nýtsluvørum.

Inuit-mál nú á døgum líkjast nógv bygnaðarliga, og tey eru fyri ein stóran part sínámillum fatilig. Tó eru tey ymisk, m.a. tá ið ræður um talorð frá 1 til 12, sum eru litað av sterkastu evropeisku ávirkanini í hvørjum málsamfelag sær. Russisk talorð eru í Inuit í Chukotka, amerikonsk/ensk talorð í Inuit í Alaska og Kanada, ávís talorð úr týskum í Inuit í Labrador og áður eisini hjá Herrnhutiskum trúarsamkomum í Grønlandi og donsk talorð í grønlendskum Inuit.

Sama er við orðum fyri tær fyrstu innfluttu matvørurnar, lutirnar og hugtøkini. Yup'ik í Alaska hevur t.d. nógv orð fyri matvørur og átrúnaðarligar orðingar frá russiska tíðarskeiðnum í Alaska. Fleiri inuit-málføri hava harafturat umlagað ein hóp av tøkniligum orðingum til inuit-mál: *qaammataasaq* 'okkurt, ið virkar sum eitt slag av mána' = fylgisveinur; *silakkuarun* (iñupiaq) 'okkurt, sum gjørt verður í luftini' = útvarp; *nagguteeraq* (grønlendskt) 'okkurt, ið líkist einum borðiski við ísi' = skipskeks (við elliptiskum sniði). Tað tók fleiri ár at týða hugtøkini 'synd' og 'heilagur' til grønlendskt.

Fleiri nýggj tiltøk eru vorðin gerandiskostur, eitt nú *inussiarnersumik inuulluaqqusillunga* 'blíða heilsan'. Agglutinerandi orðagerðin í kalaallisut setur tó greið mørk fyri orðatøku. Tað ber ikki til beinleiðis at laga alt orðalag at inuit-málinum, og tí eru í veruleikanum bara heilt fáar grammatiskar tøkur í kalaallisut.

Eftir fleiri ára ávirkan av donskum og øðrum evropeiskum málum eru við tíðini komin málljóð og ljóðreglur, sum áður ikki kundu nýtast. Tí eru nú nógv *beinleiðis fremmandaorð* í málinum.

Sum viðurkend *fremmandaorð* verða roknað altjóða hugtøk og heiti. Tó ber til at nýta eitt sonevnt grønlendskt *avloysingarorð*, t.e. eitt orð, sum er gjørt við eindum úr kalaallisut og skal rúma tí sama sum fremmandaorðið. Sum dømi um slík nýggjyrði kann nevnast: *qarasaasiaq* 'telda' (orðarætt: 'ein viðgjørdur lutur, sum líkist einum heila', samanber 'elektronheili').

Tøkuorð eru tey orð, sum eru so inngrógvin í grønlendska málnýtslu, at tey ikki longur verða roknað sum fremmandaorð. Tey eru lagað til ljóðliga bygnaðin í grønlendska málinum: *januaari*, *sukulupooq* (skyrbjóg), *kaffi*. Onnur eru endurgjørd á grønlendskum, so tey verða heimligari: *sioraasat* (sukur), *qarasaasiaq* (telda), *nagguaatsoq* (fílur), *pujorsiut/sammivissiut* (kumpass).

Í málpolitikkinum úteftir er grønlendskt høvuðsmál og danskt og enskt ávikavist fyrsta og annað fremmandamál.

Støðan hjá málinum

Í grønlendskum málkjaki hevur støðan hjá málinum verið nógv umrødd. Fer málið í framtíðini at missa øki til danskt og enskt? Er vandi kanska fyri, at tað heilt hvørvur? Og ber tað til at venda eini slíkari gongd? Í løtuni ræður eitt ávíst bjartskygni. Kalaallisut livir sum skriftmál og verður rættiliga lívliga nýtt í øllum samfelagsbólkum: Landstingið nýtir tað sum sítt mál: lóggávan verður skrivað, umrødd og samtykt á grønlendskum. Grønlendskt hevur fingið størri rúm í útbúgvingarskipanini, soleiðis at fólkaskúlaundirvísingin sum heild fer fram á kalaallisut, og grønlendskt er partur í studentaskúlaundirvísingini.

Umráðandi er, at grønlendingar, tá ið teir taka framhaldsútbúgvingar, velja at nýta grønlendskt í sínum arbeiði. Tað eru ávís øki sum eitt nú handilsyrki, tøkningayrki, løgfrøði og verkfrøðiútbúgvingar, har ið tørvur er á at menna grønlendskt orðatilfar, men tann

største avbjóðingin er eisini at vinna økini í teimum hálvlongu og longu útbúgvingunum: At fáa lærubøkur á kalaallisut til fólkaskúla, studentaskúla, læraraskúla og hægri lærustovnar og undirvísa á kalaallisut í øllum framhaldsútbúgvingum.

Symbolvirðið í málinum er ov stórt til, at tað ikki verður nýtt í framhaldsútbúgving, og hetta er neyðugt til tess at halda uppi serkunnleika á grønlendskum í framtíðini.

Fólk hava ásannað, at kalaallisut ikki er støðugt, og málið kann sigast at vera í skjótari menning. Har ið fólk aðrastaðni telja tjúgu ár ímillum hvørt málsligt ættarlið, eru tað í Grønlandi heldur bara fimm til tíggju ár ímillum hvørt málsligt ættarskifti. Men Grønland er eisini eitt ungt samfelag, ið krevur, at tænastur verða veittar á egnum máli. Framtíðin fer at vísa, um politikarar megna at reka ein grønlendskan málpolitikk, ið sampakkar við, at Grønland er ein partur í altjóðagerðini.

Týtt úr donskum hava Zakaris Svabo Hansen og Óli Jákup Niclasen

Bókmentir

Kolte, Svend (1999): »Kalaallit Oqaasii – det grønlandske sprog«. *Inuit – Kultur og Samfund*. Systime.

Oqaatsivut kulturerpullu – vort sprog – vor kultur. (Frágreiðing og framløgur frá ráðstevnu um mál og fornfrøði). Nunatta Katersugaasivia/Landsgripasavn Grønlands og Ilisimatusarfik/Universitetið í Grønlandi 1986.

Internet

Um máførabýti og ljóðbroytingar í grønlendskum:
www.oqaasileriffik.gl/documents/doc/joergen_rischel_dk.doc

Bílegg bókina um www.norden.org/agenter

Prísurin er DKK 95 (uttan meirvirðisgjald). Avsláttur verður latin fyri flokssett. Prísurin er leiðbeinandi og í donskum krónum og kann tí vera ymiskur hjá søluumboðum okkara í teimum ymsu londunum. Aftur at prísinum skal leggjast møguligt avgreiðslugjald.

Á SVENSKUM	*Nordens språk med rötter och fötter*	Nord 2004:8	ISBN 92-893-1043-X
Á NORSKUM	*Nordens språk med røtter og føtter*	Nord 2004:9	ISBN 92-893-1042-1
Á DONSKUM	*Nordens sprog med rødder og fødder*	Nord 2004:10	ISBN 92-893-1041-3
Á ÍSLENDSKUM	*Norðurlandamálin með rótum og fótum*	Nord 2004:11	ISBN 92-893-1040-5
Á FØROYSKUM	*Norðurlandamál við rótum og fótum*	Nord 2004:12	ISBN 92-893-1039-1